LANDSGRANNSKOÐANIN

# FRÁGREIÐING

## um at grannskoða einskiljingar

latin

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

Januar 2006

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

1 INNGANGUR 5

2 SAMANDRÁTTUR AV FRÁGREIÐINGINI 7

2.1 ALMENT UM EINSKILJINGARÆTLANIR LANDSSTÝRISINS 7
2.2 TÝDNINGUR AV GJØGNUMSKYGNI 7
2.3 SAMANBERING AV FØROYSKU OG ÍSLENDSKU LEIÐREGLUNUM 7
2.4 FØROYSKU LEIÐREGLURNAR Í VERKI 8
2.5 TILMÆLI UM AT GRANNSKOÐA EINSKILJINGAR 10

3 ALMENT UM EINSKILJINGARÆTLANIR LANDSSTÝRISINS 11

4 TÝDNINGUR AV GJØGNUMSKYGNI 13

5 SAMANBERING AV FØROYSKU OG ÍSLENDSKU LEIÐREGLUNUM 15

5.1 INNGANGUR 15
5.2 UPPGÁVUR, SUM BÁÐAR EINSKILJINGRNEVNDIRNAR NEVNDIRNAR HAVA 15
5.3 UPPGÁVUR, SUM ÍSLENDSKA EINSKILJINGARNEVNDIN HEVUR UMFRAMT 16
5.4 UNDANKANNINGAR 16
5.5 SERKØN HJÁLP 16
5.6 SERRÆTTINDI OG SKYLDUR HJÁ EINSKILDUM FYRITØKUM 16
5.7 UM AT KUNNA ALMENNING UM EINSKILJINGARTILGONGDINA 16
5.8 FRÁVIK FRÁ LEIÐREGLUNUM 17

6 FØROYSKU LEIÐREGLURNAR Í VERKI 19

6.1 HVØRJAR LANDSFYRITØKUR KOMA UNDIR LEIÐREGLURNAR 19
6.2 § 1. ENDAMÁL (VIÐ AT EINSKILJA FYRITØKUR LANDSINS) 21
6.3 § 2. POLITISK SAMSKIPAN (AV EINSKILJINGARÆTLANUM) 21
6.4 § 3. FYRISITINGARLIG SAMSKIPAN (EINSKILJINGARNEVNDIN) 22
6.5 § 4. GREINING (AV RAKSTRI OG RAKSTRARUMHVØRVI) 24
6.6 § 5. KUNNGERÐ (UM SØLU AV ALMENNARI FYRITØKU) 25
6.7 § 6. SØLUHÁTTUR 26
6.8 § 7. SØLA VIÐ ALMENNUM PARTABRÆVAÚTBOÐI 29
6.9 § 8. SØLA TIL STRATEGISKAR ÍLEGGJARAR O.T. 29
6.10 § 9. RÁÐGEVING OG VIRÐISBRÆVAHANDIL 29
6.11 § 10. SØLUAVMARKINGAR 30
6.12 § 11. UPPLÝSINGAR 30
6.13 § 12. FRÁVIK 31
6.14 DAGFØRING AV EINSKILJINGARLEIÐREGLUNUM 31
6.15 JÁTTAN OG KOSTNAÐUR AV AT UMSKIPA OG EINSKILJA LANDSFYRITØKUR 31

7 UM AT GRANNSKOÐA EINSKILJINGAR 33

7.1 LÓGARGRUNDARLAG 33

7.2 FÍGGJARGRANNSKOÐAN OG VANLIG FYRISITINGARGRANNKOÐAN 33
7.3 VÍÐKAÐ FYRISITINGARGRANNKOÐAN 33
7.4 FRÁGREIÐINGAR 34
7.5 TILMÆLI 34

8 BROT ÚR LEIÐREGLUM AT MIÐA SEG EFTIR, TÁ IÐ EINSKILJINGAR VERÐA GRANNSKOÐAÐAR 35

8.1 INNGANGUR 35
8.2 KRØV TIL FØRLEIKA HJÁ GRANNSKOÐANINI O.A. 35
8.3 UM FYRIREIKINGAR UNDAN SØLU 35
8.4 SERKØN RÁÐGEVING 37
8.5 UM LEIÐSLUNA Á FYRITØKU, IÐ SKAL VERÐA EINSKILD 38
8.6 VIÐGERÐ AV BOÐUM UPPÁ FYRITØKUNA 39
8.7 SØLA AV PARTABRØVUM 39

FYLGISKJAL 1: LEIÐREGLUR UM AT EINSKILJA FYRITØKUR LANDSINS (FØROYAR) 41

FYLGISKJAL 2: REGLUR FYRI MANNAGONGDIR Í SAMBANDI VIÐ ÚTBOÐ OG SØLU AV ALMENNUM FYRITØKUM (ÍSLAND) 45

FYLGISKJAL 3: SAMANBERING AV EINSKILJINGARLEIÐREGLUM 49

FYLGISKJAL 4: SAMSKIFTIÐ UM FØROYAGRUNNIN O.A. 51

FYLGISKJAL 5: LEIÐREGLUR AT MIÐA SEG EFTIR, TÁ IÐ EINSKILJINGAR VERÐA GRANNSKOÐAÐAR 55

# 1 Inngangur

Løgtingsgrannskoðararnir hava heitt á Landsgrannskoðanina um at kanna gjøllari, hvønn leiklut ein almenn grannskoðan eigur at hava í sambandi við einskiljing av fyritøkum landsins.

Í frágreiðingini hava vit valt fyrst í stuttum at kunna alment um einskiljingarætlanir Landsstýrisins seinnu árini, og vit hava eisini víst á eitt brot um týdningin av gjøgnumskygni.

Í einskiljingartilgongdini verður ofta víst til leiðreglurnar um at einskilja fyritøkur landsins, ið Landsstýrið samtykti 12. februar 2004. Fyrimyndin er íslendsku leiðreglurnar frá 1996, sum eru royndar í verki í sambandi við mongu einskiljingarnar, ið hava verið í Íslandi.

Vit hava tí valt at samanbera føroysku og íslendsku leiðreglurnar. Í frágreiðingini hava vit víst á, hvar reglurnar líkjast, og á hvørjum økjum tær víkja frá hvørjari aðrari.

Síðani hava vit roynt at greiða frá føroysku leiðreglunum, sum tær eru framdar í verki hesi fyrstu 2 árini.

Vit hava í hesum sambandi savnað saman ymiskt tilfar, m.a. frásagnir o.a. frá fundum, ið einskiljingarnevndin og politiski samskipanarbólkurin hava havt, og vit hava havt samskifti við Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið um tilfar í ávísum málum. Vit hava eisini havt skrivligt samskifti og fund við verandi formann í einskiljingarnevndini um leiklutin hjá nevndini higartil í einskiljingartilgongdini. Vit eru í hesum sambandi kunnað um, at einskiljingarnevndin heldur, at tørvur er á at endurskoða verandi einskiljingarleiðreglur, og okkum kunnugt verður arbeitt við uppskoti um at broyta reglurnar.

Endamálið við at gjøgnumganga leiðreglurnar í verki er at kunna løgtingsgrannskoðararnar gjøllari um hesar yvirskipaðu reglur, og um í hvønn mun tær verða fylgdar. Vit hava eisini nomið við møguligar veikleikar í reglunum. Vónandi kunnu viðmerkingar okkara eisini verða til gagns, í arbeiðinum at endurskoða leiðreglurnar.

Við støði í hesi vitan, ber eisini betur til hjá løgtingsgrannskoðarunum at taka støðu til, hvønn leiklut ein almenn grannskoðan eigur at hava í sambandi við einskiljing av fyritøkum landsins, og hvussu grannskoðanararbeiðið kann verða skipað.

Avgerandi fyri leiklutin hjá grannskoðanini er tó fyrst og fremst galdandi grannskoðanarlóggáva. Í frágreiðingini verður greitt gjøllari frá hesari lóggávu, og kunnað verður um, hvussu grannskoðan av einskiljingartilgongdini kann verða skipað.

Grannskoðan av einskiljing liggur uttanfyri vanliga roknskapargrannskoðan. Tí er umráðandi at finna fram til alment viðurkendar leiðreglur, sum grannskoðanin kann halda seg til.

Í frágreiðingini hava vit í stuttum kunnað um altjóða viðurkendar leiðreglur at miða seg eftir, tá einskiljingar verða grannskoðaðar. Vit hava týtt tær til føroyskt, og lagt tær við sum fylgiskjal.

Í desember 2005 sendi Landsgrannskoðanin løgmanni og landsstýrismonnunum í fíggjar- og vinnumálum frágreiðingina til viðmerkingar, og eru viðmerkingarnar tiknar við í frágreiðingina.

Tórshavn, 26. januar 2006

Leivur Harryson

# 2 Samandráttur av frágreiðingini

Sum nevnt, er endamálið við frágreiðingini at lata løgtingsgrannskoðarunum eitt tilmæli um, hvussu einskiljingar kunnu verða grannskoðaðar. Í hesum sambandi hava vit fyrst valt at kunna løgtingsgrannskoðararnar um verandi einskiljingarreglur, og um hvussu tær hava roynst í verki.

## 2.1 Alment um einskiljingarætlanir Landsstýrisins

Í 2000 setti Landsstýrið ein arbeiðsbólk at gera eina frágreiðing, sum kundi verða nýtt sum grundarlag undir politiskari viðgerð av spurninginum, í hvønn mun tað almenna eigur at selja fyritøkur.

Í januar 2002 legði táverandi løgmaður "frágreiðing um einskiljing" (einskiljingarálitið) fyri tingið til aðalorðaskiftis. Í einskiljingarálitinum frá 2001 helt arbeiðsbólkurin, at sølan av Føroya Tele, Atlantic Airways, Føroya Banka, Føroya Fiskavirking, Faroe Seafood, Føroya Lívstrygging og av útlánunum hjá landskassanum kundi byrja fyri 2004. Sølan av Framtaks-grunninum, fyritøkum hjá Føroyagrunninum, Húsalánsgrunninum, Realkredittstovni Føroya, Postverki Føroya og av útlánsrøðunum hjá Jarðargrunninum kundi byrja í 2004 ella seinni.

Arbeiðið at fyrireika einskiljingarnar hevur tikið væl longri tíð enn mett varð, og ætlanirnar eru fleiri ferðir broyttar, sum fráboðað í m.a. samgonguskjølum og løgmansrøðum síðani.

## 2.2 Týdningur av gjøgnumskygni

Í heimshøpi eru vandamálini viðvíkjandi einskiljing nógv viðgjørd, og nógv er skrivað um evnið. Ein av størstu politisku trupulleikunum er vantandi gjøgnumskygni, sum hevur við sær skuldsetingar – og mong skjalfest dømi – um korruptión. Hetta kann hava við sær, at íleggjarar og almenningurin sum heild taka stuðul sín til einskiljingartilgongdina aftur.

Fyri at tryggja gjøgnumskygni hevur tað m.a. týdning:

- at framíhjárættindini ikki eru fyri tey, ið hava servitan (t.d. leiðslu og starvsfólk)
- at almannakunngjørdar mannagongdir og leiðreglur verða hildnar
- at fjølmiðlar ella onnur óheft kanna skuldsetingar um óreglusemi
- at fyrstu tilboðini verða almannakunngjørd í fjølmiðlunum
- at sølutreytir ella einskiljingarsáttmálar verða almannakunngjørdar
- at einskiljingartilgongdin fer fram í kapping – líka frá at ráðgevarar verða tilnevndir

## 2.3 Samanbering av føroysku og íslendsku leiðreglunum

Føroysku leiðreglurnar frá 12. februar 2004 "um at einskilja fyritøkur landsins" eru formliga rættiliga líkar teimum íslendsku, ið vórðu samtyktar í mai 1996.

Einskiljingarmál verða samskipað av politiskum samskipanarbólki, mannaður við løgmanni og landsstýrismonnunum í ávikavist fíggjar- og vinnumálum, og av einari embætisnevnd (einskiljingarnevndin), ið virkar undir politiska samskipanarbólkinum. Einskiljingarnevndin skal lata tilmæli um søluhátt, skipa fyri útboði av tænastum frá ráðgevum, lata tilmæli at víkja frá leiðreglunum og samskipa í spurningum viðvíkjandi starvsfólkarættindum.

Tað eru tó týðandi munir á virkseminum og heimildini hjá føroysku og íslendsku einskiljingarnevndini. Íslendska einskiljingarnevndin hevur eitt nógv breiðari arbeiðsøki: hevur yvirumsjón við allari umskipan av almennum fyritøkum til partafeløg, við sølu av almennum fyritøkum, almennum ognum, sølu av partabrøvum, sum tað almenna eigur í øðrum feløgum, umframt at bjóða út arbeiði og tænastur vegna tað almenna og almennar stovnar.

Niðanfyri hava vit víst á aðrar týðandi munir ímillum íslendsku (IS) og føroysku (FO) leiðreglurnar:

Hvør fyrireikar og samskipar arbeiðið við einskiljingum

IS: Einskiljingarnevndin.
FO: Avvarðandi landsstýrismaður.

Hvør fyrireikar undankanningar

IS: Einskiljingarnevndin útvegar greiningar og lýsingar av rakstri og rakstrarumhvørvi.
FO: Landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av at fyrirreika og fremja einskiljingarnar.

Hvør veitir serkøna hjálp

IS: Greiningar, virðismetingar, ráðgeving um søluhátt o.a. skulu latast løggildum fyritøkum upp í hendi. Einskiljingarnevndin skipar fyri útboðsumfari.
FO: Somu tænastur kunnu útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum og øðrum fyritøkum við hóskandi førleika. Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing av slíkum uppgávum.

Kunnu einskildar fyritøkur varðveita serrættindi og skyldur

IS: Allar lógarásettar skyldur og øll lógarátt rættindi verða strikað, áðrenn almenn fyritøka verður einskild.
FO: Einki ásett.

Hussu kunnar einskiljingarnevndin um einskiljingartilgongdina

IS: Einskiljingarnevndin kunnar alment um einskiljingarpolitikkin hjá stjórnini, og ger ársfrágreiðing um gongdina at einskilja og umskipa fyritøkur til partafeløg.
FO: Einki ásett um kunnandi leikutin hjá einskiljingarnevndini.

Hvussu verður kunnað um frávik frá leiðreglunum

IS: Frávik frá leiðreglunum skulu verða almannakunngjørd
FO: Einki ásett um at almannakunngera frávik.

## 2.4 Føroysku leiðreglurnar í verki

Hvørjar landsfyritøkur koma undir leiðreglurnar

Í einskiljingarreglunum er m.a. ásett, at ein ætlan um at einskilja fyritøku, sum landskassin eigur, í hvørjum føri sær verður at leggja fyri Løgtingið at viðgera.

Í mong ár hava løgtingsgrannskoðararnir mælt Landsstýrinum til at fáa greiði á, um landskassin eigur ávísar grunnar, ella talan er um veruligar sjálvsognarstovnar. Hesin spurningur er ikki minst viðkomandi, tá ræður um einskiljingar og einskiljingarreglur. Sambært Løgmansfyrisitingini er ivi framvegis um nakrar grunnar, m.a. Realkredittstovn Føroya.

Framtaksgrunnurin og Føroyagrunnurin eru skrásettir sum vinnurekandi grunnar, sum ikki koma undir einskiljingarreglurnar. Landsgrannskoðanin hevur tó mælt til at kanna, um talan er um veruligar sjálvsognargrunnar.

Fíggingargrunnurin frá 1992 er skrásettur sum vinnurekandi grunnur, men Landskassin eigur grunnin, sum eigur Føroya Banka. Sambært Fíggjarmálaráðið er einskiljingin av Føroya Banka fevnd av einskiljingarreglunum.

Einskiljingarnevndin lat Landsstýrinum tilmæli í sambandi við ætlaðu einskiljingina av P/F Føroya Lívstrygging, men tilmælið varð ikki fylgt.

Einskiljingarnevndin, vantandi orka og førleiki

Í einskiljingarnevndini sita løgmansstjórin, aðalstjórin í Vinnumálaráðnum, aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum og ein deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, sum eisini er formaður í nevndini.

Limirnir í einskiljingarnevndini hava ikki neyðuga orku og førleika at loysa tær uppgávur, ið álagdar eru nevndini sambært einskiljingarleiðreglunum, og ongin játtan hevur verið til at keypa serkøna hjálp. Tað er helst orsøkin til, at nevndin óformliga hevur latið "arbeiðsbólkum" nakrar av uppgávum sínum. Tað kann vera ein skynsom neyðloysn, men framferðarhátturin er ikki tann, ið leiðreglurnar leggja upp til. Einskiljingarnevndin hevur gjørt uppskot um at broyta einskiljingarleiðreglurnar soleiðis, at heimildar- og arbeiðsbýtið millum nevndina og arbeiðsbólkarnar verður greinað.

Vantandi samskipan av einskiljingarætlanunum

Einskiljingarnevndin hevur ikki uppgávuna at fyrireika og samskipa einskiljingarnar. Hvør landsstýrismaður í sínum lagi setir eina "einskiljingarnevnd/arbeiðsbólk", ið hansara vegna fyrireikar einskiljingina. Ein partur av fyrireikingararbeiðinum verður gjørdur av leiðslunum (og ráðgevarum teirra) á fyritøkunum, sum skulu verða einskildar.

Tað tykist, sum leiðslurnar á almennu fyritøkunum, sum skulu verða einskildar, byrja fyrireikingarnar at umskipa/einskilja seg sjálvar, uttan nakra samskipan við aðrar ætlaðar einskiljingar, og uttan nakrar yvirskipaðar mannagongdir. Í fleiri førum tykist tað, sum Landsstýrið og einskiljingarnevndin ikki rættiliga hava vitað, hvat fyrifórst í fyritøkunum, sum skulu einskiljast, og hava tí ikki havt neyðugu vitanina at kunna um gongd og støðu í málunum.

Helst vantar ein samskipandi eind í Føroyum, sum hevur orku og førleika at fyrireika og hava yvirskipaða umsjón við gongdini í øllum einskiljingarmálum. Ein fyrimunur hevði verið, at ein tílík eind hevði kunnað savnað, gagnnýtt og endurnýtt vitan og royndir frá einstøku einskiljingunum. Í Íslandi er tað einskiljingarnevndin, ið er fyrireikandi og samskipandi eindin.

Politiskur fylgibólkur

Hóast tað ikki er ásett í leiðreglunum, er ein "politiskur fylgibólkur", við einum løgtingsumboði fyri hvønn samgonguflokk, skipaður, sum hevur havt ein ávísan leiklut í einskiljingartilgongdini. Vinnumálaráðið vísir á, at politiskur fylgibólkur verður brúktur fyri at vita, um undirtøka er í samgonguni fyri fyrireikingararbeiðinum hjá landsstýrismanninum.

Yvirskipaðar mannagongdir vanta

Einskiljingarnevndin hevur ikki, sum ásett í einskiljingarreglunum, gjørt uppskot til yvirskipaðar mannagongdir viðvíkjandi einskiljingum, eitt nú tá ið fyritøka verður umskipað til partafelag, tá ið umskipan av kapitalviðurskiftum fer fram, og tá ið ræður um mál viðvíkjandi rættindum hjá starvsfólki.

Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið ein fyrimunur fyri einskiljingartilgongdina, um yvirskipaðar mannagongdir vórðu gjørdar, m.a. tí talan er um nógvar sera torgreiddar spurningar.

Ráðgeving ikki samskipað og ikki bjóðað út

Sambært leiðreglunum kunnu ráðgevaratænastur útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum, og skal einskiljingarnevndin bjóða út tílíkar uppgávur. Einskiljingarnevndin hevur ikki fyrireikað útbjóðing av nakrari ráðgevaratænastu.

Tað hevði helst verið ein fyrimunur, um einskiljingarnevndin í størri mun var ein samskipandi eind, sum hevði orku og førleika at hava yvirskipaða umsjón við gongdini í øllum einskiljingarmálum frá byrjan, eisini viðvíkjandi útbjóðing av ráðgeving. Tað hevði kunnað

tryggjað eina betri og meira gjøgnumskygda ráðgeving, sum kanska í síðsta enda eisini hevði verið bíligari. Var ráðgevingin meira samskipað, hevði óivað borið til at gagnnýtt og endurnýtt ráðgevingina frá einum máli til annað.

Játtan og kostnaðurin av at umskipa og einskilja landsfyritøkur

Higartil hevur sjálvstøðug játtan ikki verið á fíggjarlógini til útreiðslur av at einskilja fyritøkur landsins, og eingin serstøk játtan hevur verið til útreiðslurnar av virkseminum hjá einskiljingarnevndini. Eftir at fíggjarlógin 2006 varð løgd fram á heysti 2005, skeyt Landsstýrið upp at játta 15 mió.kr. til serkønar ráðgevarar. Hetta uppskotið kom ikki í Tingið, men játtaðar vórðu 1 mió.kr. til endamálið.

Trupult er at gera upp, hvat einskiljingartilgongdin hevur kostað higartil. Flestu útreiðslur eru hildnar uttanfyri fíggjarlógina, t.d. av Fíggingargrunninum, Framtaksgrunninum og Føroya Tele. Almenningurin kennir sostatt ikki samlaða kostnaðin av fyrireikingunum til at umskipa og einskilja fyritøkur landsins.

## 2.5 Tilmæli um at grannskoða einskiljingar

Grannskoðan av einskiljing liggur uttanfyri vanliga roknskapargrannskoðan, men kemur undir hugtakið ”víðkað fyrisitingargrannskoðan” sambært § 14 í grannskoðanarlógini, og grannskoðanin kann tí verða skipað innanfyri verandi lógarkarmar.

Sambært § 14 eru tað løgtingsgrannskoðararnir, ið kunnu áleggja Landsgrannskoðanini ella privatum grannskoðarum at lata teimum frágreiðingar um víðkaða fyrisitingargrannskoðan, og kunnu løgtingsgrannskoðararnir síðani sambært § 18 lata Løgtinginum frágreiðingina saman við møguligum viðmerkingum.

Ein tílík frágreiðing verður sambært tingskipanini viðgjørd sum skriv til Løgtingið, og løgtingsgrannskoðararnir og aðrir tingmenn hava møguleika til at seta løgmanni og landsstýrismonnum fyrispurningar viðvíkjandi viðurskiftum, sum eru lýst í frágreiðingini.

Eftirsum talan ikki er um vanliga roknskapargrannskoðan, er umráðandi at finna fram til alment viðurkendar leiðreglur, grannskoðanin kann halda seg til. Altjóða felagsskapurin av ríkisgrannskoðanum, INTOSAI, hevur í 1998 gjørt leiðreglur um at grannskoða einskiljingar av almennum fyritøkum, ið byggja á royndir hjá ríkisgrannskoðanum í fleiri enn 100 londum. Hesar 40 leiðreglurnar eru týddar til føroyskt og liggja við frágreiðingini sum fylgiskjal.

Leiðreglurnar er bólkaðar í 8 øki. Allar leiðreglurnar fylgja einum ávísum leisti. Greitt verður frá um evnið, og hví evnið er umráðandi, síðani er leiðreglan orðað í stuttum, og at enda er ein grundgeving fyri leiðregluni. Síðst í frágreiðingini er ein stuttur samandráttur av brotum úr flestu leiðreglunum.

Í nógvum førum verður í leiðreglunum mælt grannskoðarunum til at kanna, um seljarin (ráðharri ella einskiljingarnevnd), sum hevur ábyrgdina av einskiljingini, hevur sett í verk hóskandi fyriskipanir, sum skulu tryggja, at einskiljingin - frá byrjan til enda - fer rætt og reiðiliga fram. Tí kunnu hesar leiðreglur helst eisini verða nýttar sum íblástur hjá Landsstýrinum til at áseta yvirskipaðar leiðreglur fyri einskiljingartilgongdini.

Landsgrannskoðanin vil mæla til, at leiðreglurnar verða brúktar sum útgangstøði í sambandi við grannskoðan av einskiljingum. Vit hava í hesum sambandi eisini ráðført okkum við íslendsku ríkisgrannskoðanina, sum seinnu árini hevur kannað og skrivað fleiri frágreiðingar um einskiljingar í Íslandi.

Fleiri góðar grundir eru til at grannskoða eina einskilјing. Talan er um eina almenna ogn, og almenningurin hevur tørv á óheftari váttan um, at tilgongdin var hóskandi, og at skattgjaldarin fekk rætta virðið fyri fyritøkuna. Seljari og keypari eiga at vera greiðir yvir, at ein óheft grannskoðan helst fer at gjøgnumganga søluna fyri at verja áhugamálini hjá almenninginum, at úrslitið av kanningini kann verða almannakunngjørt, og at partarnir kunnu verða drignir til svars fyri sín leiklut.

## 3 Alment um einskiljingarætlanir Landsstýrisins

Løgmansrøðan 2000

Í ólavsøkurøðuni í 2000 boðaði táverandi løgmaður frá, at Landsstýrið hevði í hyggju at seta eina nevnd at virðismeta stovnar og partafeløg, sum landið eigur. Nevndin skuldi gera uppskot um, hvørjar ognir landið hóskandi átti at selt, nær tað skuldi verða gjørt og í hvørjari raðfylgju.

Einskiljingarálitið 2001

Í 2000 varð ein arbeiðsbólkur settur at gera kanningararbeiði. Kanningararbeiðið varð gjørt í samstarvi millum Løgmansskrivstovuna, Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið. 22. januar 2002 legði táverandi løgmaður "frágreiðing um einskiljing" (einskiljingarálitið) fyri tingið til aðalorðaskiftis.

Endamálið var at kunna nýta frágreiðingina sum grundarlag undir politiskari viðgerð av spurninginum, í hvønn mun tað almenna eigur at selja fyritøkur. Í øðrum lagi skuldi frágreiðingin lýsa, hvussu áhugamálini hjá tí almenna og samfelagnum sum heild kundu verða tryggjað (Einskiljingarálitið, s. 13).

> *"Einskiljingar eru at meta sum drúgv og torgreidd tilgongd, og er tí sjálvfylgja, at Landsstýrið afturvendandi leggur mál, sum hava við ítøkilig stig í einskiljingartilgongd at gera, fyri Løgtingið. Við hesum kann gjøgnumskygni og fólkaræðislig tilgongd tryggjast."* (Einskiljingarálitið, s. 11)

Í einskiljingarálitinum frá 2001 helt arbeiðsbólkurin, at sølan av Føroya Tele, Atlantic Airways, Føroya Banka, Fiskavirking, Faroe Seafood, Føroya Lívstrygging og av útlánunum hjá landskassanum kundi byrja fyri 2004. Sølan av Framtaksgrunninum, fyritøkum hjá Føroyagrunninum, Húsalánsgrunninum, Realkredittstovni Føroya, Postverki Føroya og av útlánsrøðunum hjá Jarðargrunninum kundi byrja í 2004 ella seinni.

Samgonguskjalið hjá samgonguni 2002-2004

Í samgonguskjalinum hjá samgonguni, sum sat 2002-2004, varð ásett viðvíkjandi einskiljing, at *"Tá virðisbrævamarknaður er settur á stovn, verður farið undir varliga og gjøgnumskygda einskiljing av vinnuligu fyritøkunum hjá landinum.*

*Partabrøv í fyritøkunum kunnu eftir greiðum reglum og fullum gjøgnumskygni verða boðin til sølu. Møgulig søla av partabrøvum eigur at órógva virksemið í fyritøkunum minst møguligt. Sølan skal geva fullan vinning og fult endurgjald fyri kreppuloysnirnar (í 1990'unum).*

*Almennar fyritøkur kunnu, um Løgtingið samtykkir tað, selja ella skipa fyri nýtekning av partabrøvum, sum verða boðin út – lutvíst sum starvsfólkapartabrøv, til almenningin og/ella til strategiskar íleggjarar. Málið er, at landskassin fær sum mest burturúr, og at selt verður til hægstbjóðandi. Peningurin kann nýtast at gjalda niður almennu skuldina."*

Samgonguskjalið hjá verandi samgongu, ið varð skipað í januar 2004:

Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu er ásett, at *"Samgongan er samd um, at partabrøv í almennum fyritøkum, sum til dømis Føroya Tele, Atlantsflog, Føroya Banka og LÍV, kunnu verða boðin út til almenningin og/ella til strategiskar íleggjarar, har tað kann gerast við fyrimuni. Vinningurin fer til at gjalda niður almenna skuld og/ella konsolidering."*

Løgmansrøðan 2005

Í ólavsøkurøðuni 2005 boðaði løgmaður frá, at ætlanin um at einskilja fevnir um Føroya Banka, Atlantsflog, Føroya Tele, Farmaleiðir og Føroya Lívstrygging. Somuleiðis er ætlanin at selja útlánsrøðirnar hjá Húsalánsgrunninum, í sambandi við at grunnurin verður umskipaður við nýggjum bústaðarpolitiskum endamáli.

Sambært vegleiðandi tíðarætlan, sum løgmaður legði fram saman við ólavsøkurøðuni, er ætlanin at selja Føroya Lívstrygging, útlánsrøðirnar hjá Húsalánsgrunninum og Farmaleiðir í 2006. Føroya Banki verður seldur í fleiri umførum í tíðarskeiðinum 2006 til 2009. Ein partur av Føroya Tele verður seldur í 2006, restin verður seld í 2008. Tveir triðingar av Atlantic Airways verða seldir í 2006, restin verður seld um nøkur ár.

Talan er um skipaða tilgongd við fyriliti fyri samfelagsligum áhugamálum. Í sambandi við søluna av Føroya Banka verður ansað eftir, at elvt verður ikki til monopollíknandi viðurskifti í føroysku fíggjarvinnuni. Harafturat verða eginkapitalviðurskiftini í bankanum tillagað, áðrenn farið verður undir fyrsta søluumfarið.

Fyri at tryggja strategisk áhugamál hjá landinum í sambandi við einskiljing av t.d. Atlantsflogi, kann verða neyðugt at seta sum treyt, at keyparin, í eitt ávíst áramál, bindur seg til at varðveita høvuðsvirksemið hjá felagnum í Føroyum.

Fyri at tryggja eina javna og rættvísa kapping millum fyritøkur, er ætlanin at skilja Føroya Tele sundur, soleiðis at undirstøðukervið verður lagt í felag fyri seg.

Løgmaður boðaði frá, at einskilt verður eftir leiðreglunum hjá Landsstýrinum, ið byggja á opinleika og fult gjøgnumskygni.

# 4 Týdningur av gjøgnumskygni

Í heimshøpi eru vandamálini viðvíkjandi einskiljing nógv viðgjørd, og nógv er skrivað um evnið.

Í greinini “An Assessment of Privatization”[1] skriva Sunita Kikeri, ið er ráðgevi hjá Heimsbankanum, og John Nellis, sum er granskari við “the Center for Global Development” í Washington D.C., m.a. “at ein av størstu politisku trupulleikunum í sambandi við einskiljing er óttin fyri vantandi gjøgnumskygni og fyri korruptión.”

Sambært Transparency International, ein óheft NGO[2]-rørsla, hvørs aðalmál er at stríðast ímóti korruptión, er talan um ymisk sløg av korruptión:

Mutur: tað gjald (í pengum ella góðgripum), sum er latið, móttikið ella lovað í einum korruptum sambandi. Mutur hevur mong nøvn, m.o. “returkommissión”, “smyrsl”, “gáva” ella “vælvild”.

Fíggjarsvik: tá persónur stjelur av tí tilfeingi, sum hann er settur at umsita, tvs. stuldur frá arbeiðsplássinum ella skattaborgaranum.

Tvingsil: tá tey, ið hava vald, ríka seg við tvingsli, harðskapi ella hóttan um harðskap.

Framíhjárættindi: nýtsla av almennum tilfeingi til at varða um floksfelagar, vinir, familju ella onnur, ið hava serligt samband við embætishavaran.

Nepotisma: tann partur av framíhjárættindum, ið verður latin familju og ættarfólki.

Í greinini stendur víðari, at “Vantandi gjøgnumskygni hevur við sær skuldsetingar – og mong skjalfest dømi – um korruptión, og tað gevur teimum, ið eru ímóti einskiljing, viðrák. Somuleiðis kann tað hava við sær, at íleggjarar og almenningurin sum heild taka stuðul sín til einskiljingartilgongdina aftur, og tað kann steðga einskiljingartilgongdini ella gera, at fyritøkurnar verða almenn ogn aftur.

Harafturat kemur óttin fyri arbeiðsloysi, og fyri at almennar ognir skulu verða seldar útlendingum.

Fyri at fremja gjøgnumskygni hevur tað týdning at tryggja:

- at sølur fara fram, uttan at serlig framíhjárættindini eru galdandi fyri tey, ið hava servitan (t.d. leiðslu og starvsfólk);
- at almannakunngjørdar mannagongdir og leiðreglur verða hildnar;
- at fjølmiðlar ella onnur óheft kanna skuldsetingar um óreglusemi;
- at fyrstu tilboðini verða almannakunngjørd í fjølmiðlunum;
- og at sølutreytir ella einskiljingarsáttmálar verða almannakunngjørdiar.

Harafturat má verða arbeitt fyri, at einskiljingartilgongdin fer fram í kapping – líka frá at ráðgevarar verða tilnevndir, eftir at tænastan er boðin út, og til endaligi keyparin verður valdur út – tað er tann mest effektivi hátturin at tryggja gjøgnumskygni, og tað hevur eisini við sær størstu fíggjarligu fyrimunirnar.

Í summum førum er einasti møguleiki at samráðast við einstakar keyparar, men vanliga er tað so, at jú størri opinleikin og kappingin er í útveljingartilgongdini, og tess fleiri bjóða, tess hægri verður søluprísurin – og harvið nøgdsemið hjá almenninginum. Alment partabrævaútboð verður hildið at vera søluhátturin við størsta gjøgnumskygni.

Meginreglan er, at tá ið almennar fyritøkur virka á marknaðum, har kapping er, skal einskiljingin fara fram skjótt, men áðrenn fyritøkur, ið veita týdningarmiklar tænastur (bankar,

[1] The World Bank Research Observer, vol. 19, no. 1 (Spring 2004), s. 111-112

[2] NGO – Non Governmental Organisations (t.d. Greenpeace, Amnesty International o.s.fr.)

fjarskifti, el, vatn) verða einskildar, skal tíð vera sett av til at fáa eftirlitsvirksemi o.a. í rættlag.”

# 5 Samanbering av føroysku og íslendsku leiðreglunum

## 5.1 Inngangur

Í januar 2002 legði táverandi Landsstýri fyri tingið til orðaskiftis "frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins".

Í uppriti 18. november 2002 til landsstýrisfund, um fyrisitingarliga skipan av einskiljingartilgongd, varð m.a. umrøtt, at politiskur samskipanarbólkur skuldi áleggja embætisligum stýrisbólki (einskiljingarnevnd) uppgávur. Sambært uppritinum skuldi einskiljingarnevndin fyrireika og samskipa einskiljingartilgongdina. Hon skuldi samskipa greiningar- og fyrireikingarvirksemi, fáa til vega kanningar viðvíkjandi kappingarumhvørvi, gera tilráðingar um søluhátt og fáa til vega virðismetingar. Nevndin kundi útvega sær løgfrøðiliga og aðra servitan hjá uttanhýsis ráðgevingafyritøkum.

Í frágreiðing frá fundi 20. januar 2003 í einskiljingarnevndini verður m.a. víst á, at fakligi førleikin, sum eigur at vera í nevndini – beinleiðis ella óbeinleiðis –, fevnir um økini corporate-finance, virðisbrævahandil, sáttmála-/vinnulívsrætt, roknskap/grannskoðan, kappingarviðurskifti og búskap á mikro- og makrostøði.

Á fundi í einskiljingarnevndini í mars 2003 varð samtykt at taka upp samband við íslendsku einskiljingarnevndina um íslendsku einskiljingarleiðreglurnar, og á fundi í apríl 2003 millum politiska samskipanarbólkin og embætisliga stýrisbólkin vórðu "føroysku leiðreglurnar" viðgjørdar.

12. februar 2004 samtykti Landsstýrið leiðreglur "um at einskilja fyritøkur landsins" (sí **fylgiskjal 1**).

Føroysku leiðreglurnar eru formliga rættiliga líkar teimum íslendsku (sí **fylgiskjal 2**), ið vórðu samtyktar í mai 1996. Tær komu í staðin fyri leiðreglur, sum vórðu samtyktar í oktober 1993. Íslendska stjórnin fór undir at einskilja almennar fyritøkur í 1991, men ikki fyrr enn í 1998 kom ferð á einskiljingarnar.

Í báðum leiðreglunum verða at kalla somu hugtøk og evnir viðgjørd. Bæði føroysku og íslendsku leiðreglurnar hava 12 greinir. Niðanfyri hava vit samanborið føroysku leiðreglurnar við tær íslendsku. Í **fylgiskjali 3** hava vit sett føroysku leiðreglurnar upp ímóti teimum íslendsku.

## 5.2 Uppgávur, sum báðar einskiljingrnevndirnar nevndirnar hava

Í føroysku og íslendsku leiðreglunum er ásett, at einskiljingarmál verða samskipað av politiskum samskipanarbólki, ið er mannaður við landsstýrismonnum/ráðharrum, og eini embætisnevnd (einskiljingarnevndin), ið virkar undir politiska samskipanarbólkinum.

Sambært leiðreglunum skal bæði føroyska og íslendska einskiljingarnevndin:

- lata avvarðandi landsstýrismanni/ráðharrastovu tilmæli um, hvør søluháttur skal verða nýttur (§ 6 í føroysku leiðreglunum og § 5 í íslendsku);
- skipa fyri útboði av tænastum frá ráðgevum, og lata landsstýrismanni/ráðharrastovu tilmæli um val av ráðgevum (§ 9 í føroysku leiðreglunum og § 7 í íslendsku leiðreglunum)
- lata landsstýrismanni/ráðharrastovu tilmæli, um ætlanin er at víkja frá mannagongdunum í leiðreglunum (§ 12 í føroysku leiðreglunum og § 10 í íslendsku leiðreglunum)
- samskipa í spurningum viðvíkjandi starvsfólkarættindum, bæði í sambandi við broytt løgfrøðiligt skap (t.d. tá almennar fyritøkur verða umskipaðar til partafeløg) og í sambandi við sølu (ávikavist § 3 í føroysku leiðreglunum og § 2 í íslendsku leiðreglunum).

## 5.3 Uppgávur, sum íslendska einskiljingarnevndin hevur umframt

Tað er tó týðandi munur á virksemi og heimild hjá føroysku og íslendsku einskiljingarnevndini.

Sambært § 2 í føroysku leiðreglunum er tað avvarðandi landsstýrismaður, ið hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av fyritøkum samsvarandi Løgtingsins vilja. Sambært § 1 í íslendsku leiðreglunum skal einskiljingarnevndin fyrireika og samskipa arbeiðið við einskiljingunum.

Harumframt hevur íslendska einskiljingarnevndin eitt nógv breiðari arbeiðsøki enn føroyska einskiljingarnevndin. Nevndin skal hava yvirumsjón við allari umskipan av almennum fyritøkum til partafeløg, við sølu av almennum fyritøkum, almennum ognum, sølu av partabrøvum, sum tað almenna eigur í øðrum feløgum, umframt at bjóða út (útlisitera) arbeiði og tænastur vegna tað almenna og almennar stovnar.

## 5.4 Undankanningar

Sambært § 3 í íslendsku leiðreglunum er tað einskiljingarnevndin, ið biður um at fáa til vega greiningar og nágreiniligar lýsingar av rakstri og rakstrarumhvørvi, áðrenn ráðharrastova ger av at broyta løgfrøðiliga skapið hjá einari fyritøku ella at selja eina fyritøku.

Tað gongur ikki fram av § 4 í føroysku leiðreglunum, hvør skal fáa til vega nevndu kanningar o.a. Einskiljingarnevndin er ikki nevnd í § 4, og tí er tað landsstýrismaðurin, sum sambært § 2 hevur ábyrgdina av at fyrirreika og fremja einskiljingarnar.

## 5.5 Serkøn hjálp

Sambært § 7 í íslendsku leiðreglunum skulu greiningar, virðismetingar, ráðgeving um søluhátt o.a. latast løggildum virðisbrævahandlarum og ráðgevum, sum teir boðsenda. Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing av slíkum uppgávum.

Sambært § 9 í føroysku leiðreglunum kunnu somu tænastur útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum og øðrum fyritøkum við hóskandi førleika. Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing av slíkum uppgávum.

## 5.6 Serrættindi og skyldur hjá einskildum fyritøkum

Sambært § 9 í íslendsku leiðreglunum skulu allar lógarásettar skyldur og øll lógarásett rættindi verða strikað, áðrenn almenn fyritøka verður einskild. Einskildu fyritøkurnar fáa ikki serrætt at veita almennum fyritøkum tænastur, og teimum verður ikki áløgd skylda at veita tænastur til lægri prís ella uttan viðurlag.

Ein tílík áseting er ikki í føroysku leiðreglunum.

## 5.7 Um at kunna almenning um einskiljingartilgongdina

Meinlíkar ásetingar eru í ávikavist § 5 í føroysku leiðreglunum og í § 4 í íslendsku leiðreglunum um, at landsstýrismaður/ráðharrastova skal almannakunngera, at almenn fyritøka verður einskild. Ásetingarnar í § 11 í føroysku og í § 11 í íslendsku leiðreglunum um, at landsstýrismaður/ráðharrastova skal kunna um gongdina í einskiljingarmálum, eru eisini rættiliga líkar.

Harumframt er í § 11 í íslendsku leiðreglunum ásett, at einskiljingarnevndin tekur sær av almennari kunning um einskiljingarpolitikkin hjá stjórnini, og nevndin letur úr hondum eina ársfrágreiðing um gongdina í einskiljingarmálum, herímillum eisini um ætlanir at umskipa almennar fyritøkur til partafeløg.

Ein tílík áseting er ikki í føroysku leiðreglunum.

## 5.8 Frávik frá leiðreglunum

Sambært ávikavist § 12 í føroysku leiðreglunum og § 10 í íslendsku leiðreglunum kunnu landsstýrismaður/ráðharrastova, eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini, gera frávik frá mannagongdunum í leiðreglunum.

Harafturat er ásett í § 10 í íslendsku leiðreglunum, at frávik frá mannagongdunum í leiðreglunum skulu verða almannakunngjørd, tá ið tey eru viðgjørd saman við stjórnini.

Ein tílík áseting er ikki í føroysku leiðreglunum.

# 6 Føroysku leiðreglurnar í verki

Sum nevnt boðaði løgmaður frá í ólavsøkurøðuni 2005, at einskilt verður eftir leiðreglunum hjá Landsstýrinum, ið byggja á opinleika og fult gjøgnumskygni.

Niðanfyri hava vit gjøgnumgingið leiðreglurnar í verki "grein fyri grein". Fyrst í hvørjum broti hava vit endurgivið leiðreglurnar orðarætt við gráum.

## 6.1 Hvørjar landsfyritøkur koma undir leiðreglurnar

Í innganginum í føroysku "leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins" stendur:

> "Føroya Landsstýri ynskir at fara undir varliga og gjøgnumskygda einskiljing av fyritøkum landsins, sum virka í kappingarkendum vinnugreinum.
>
> Landsstýrið vil virka fyri breiðari politiskari semju í einskiljingarmálum, og verður ætlan um einskiljing av fyritøku, sum landskassin eigur, í hvørjum einstøkum føri løgd fyri Løgtingið til viðgerðar.
>
> Landsstýrið hevur tí á landsstýrisfundi tann 12. februar 2004 gjørt av at fyrireika og skipa einskiljingar eftir hesum leiðreglum."

Tað gongur ikki fram av innganginum, hvørjar "fyritøkur landsins" eru fevndar av leiðreglunum. Men ásett er, at ein ætlan um at einskilja fyritøku, sum landskassin eigur, í hvørjum føri sær verður at leggja fyri Løgtingið til viðgerðar.

Løgtingsgrannskoðararnir og Landsgrannskoðanin hava síðani fyrst í nítiárunum mælt Landsstýrinum til at taka endaliga støðu til ognarrættin hjá fleiri grunnum, m.a. tí hesin spurningur eisini er avgerandi fyri, hvørjar reglur í stýrisskipanar-, roknskapar- og grannskoðanarlógini grunnarnir eru fevndir av, og um fíggjarlóg og landsroknskapur eru røtt o.s.fr. Hesin spurningur er ikki minst viðkomandi, tá ræður um einskiljingar og einskiljingarreglur.

Sum kunnugt, læt Fíggjarmálaráðið í november 2001 úr hondum eitt álit: *"Um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti" (Grunnaálitið)*. Stýrini hjá fleiri av grunnunum/stovnunum og ráðgevarar teirra hava síðani víst á, at tey eru ikki samd við Fíggjarmálaráðið um niðurstøðurnar í álitinum. Eftir teirra áskoðan er í summum førum talan um sjálvsognarstovnar, sum ikki eru ogn landskassans.

Landsstýrið hevur síðani arbeitt við at greiða verandi ivaspurningar. Í desember 2004 kunnaði løgmaður um, at á fundi 30. november 2004, har bæði landsstýrismenn og aðalstjórar vóru við, varð gjørt av, at Fíggjarmálaráðið skuldi taka stig til at gjøgnumganga og finna hóskandi loysnir fyri teir einstøku grunnarnar/stovnarnar saman við avvarðandi stjórnarráðum. Uppskot um loysnir skuldi síðani verða lagt fyri aftur á landsstýrisfundi, so at hvør landsstýrismaður kundi taka endaliga avgerð í sínum málum. Løgmaður skuldi fylgja við gongdini til tess at tryggja, at komið varð á mál.

Í januar 2006 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at enn er ikki fingin politisk semja um ognarrættin til hesar stovnar/grunnar:

- Fróðskaparsetur Føroya - Sjálveigandi stovnur
- Føroya Realkreditstovnur
- Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
- Arbeiðsloysisskipanin

Føroyagrunnurin og Framtaksgrunnurin, ognarrættur og einskiljingarreglur

Í frágreiðingini frá Løgmansskrivstovuni "um at einskilja fyritøkur landsins" frá 2001 (einskiljingarálitið), sum varð løgd fyri tingið til aðalorðaskiftis 22. januar 2002, verða m.a. Fram-

taksgrunnurin og Føroyagrunnurin frá 1971 tiknir við sum "fyritøkur hjá landinum, uttanfyri landskassan".

Í einskiljingarálitinum verður tó gjørt vart við, at støða er ikki tikin til, um grunnarnir við fyritøkuognum, sum hoyra uppí, eru ogn hjá landinum, og um grunnarnir kunnu verða einskildir. Í álitinum verður mælt til, at løgfrøðiligar kanningar fara fram av grunnunum, og víst verður til Grunnaálitið, sum Fíggjarmálaráðið lat gera í 2001. Um báðar grunnarnar verður í grunnaálitinum víst á, at talan er um vinnurekandi grunnar, veruligar sjálvsognarstovnar, ið eiga seg sjálvar.

Í frásøgn frá fundi í einskiljingarnevndini 20. januar 2003 verða Framtaksgrunnurin og Føroyagrunnurin umrøddir soleiðis: *"Neyðugt verður tó rættiliga skjótt eisini at taka viðurskiftini viðvíkjandi Framtaksgrunninum og Føroyagrunninum til viðgerðar"*.

Sambært frásøgnum frá fundum í 2003 og 2004, sum vit síðani hava lisið, tykjast viðurskiftini ikki verða tikin til viðgerðar.

Í skrivi 29. september 2005 mælti Landsgrannskoðanin Fíggjarmálaráðnum til at kanna gjøllari, hvør er "ultimativi" eigarin av Føroyagrunninum og Framtaksgrunninum, eftirsum grunnarnir eru stovnaðir við almennum pengum.

Hóast grunnarnir í dag eru skrásettir sambært lógini um vinnurekandi grunnar, er kanska ivasamt, um teir eru "veruligir" sjálvsognarstovnar. Landsgrannskoðanin vísti til nøkur sjónarmið um munin ímillum (privatar) "ægte" sjálvsognarstovnar, og sjálvsognarstovnar "inden for den statslige forvaltning", sum verða førd fram í hægstarættardómi um Københavns Havn A/S 23. august 2004. Í dóminum verður m.a. víst til notat frá "Justitsministeriet" um "Københavns Havns retlige stilling". Dómurin staðfestir, at staturin hevur ultimativa ognarrættin til "sjálvsognarstovnin" Københavns Havn, og tí kundi Fólkatingið við lóg umskipa grunnin til partafelag, ið staturin átti, uttan at tað var at meta sum ognartøka, hóast eitt av endamálunum hjá Fólkatinginum við umskipanini var at fáa pening í statskassan.

Í svarskrivi sínum 15. desember 2005 heldur Fíggjarmálaráðið, at hægstarættardómur um Københavns Havn ikki kann verða nýttur sum samanberingargrundarlag, tá tað snýr seg um Føroyagrunnin. Víst verður m.a. á, at Føroyagrunnurin er ikki stovnsettur við lóg, men við viðtøkum, og at endamálið hevur ongantíð verið at røkja eina "samfelagsuppgávu". Víst verður eisini á, at Føryagrunnurin er fevndur av lógini um vinnurekandi grunnar, tað var Københavns Havn ikki. Viðvíkjandi Framtaksgrunninum verður víst til Vinnumálaráðið.

Í svarskrivi sínum vísir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í fleiri førum til lógina um vinnurekandi grunnar og til leiklutin hjá Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, í sambandi við at Føroyagrunnurin varð skrásettur sum vinnurekandi grunnur. Landsgrannskoðanin hevur ikki somu fatan av hesum máli. Í hjálagda **fylgiskjali 4** hava vit endurgivið skriv til Fíggjarmálaráðið, har vit hava greitt frá okkara fatan av málsgongdini. Landsgrannskoðanin ger ikki meira við hetta mál, *og vil mæla løgmanni til at taka spurningin upp, um Føroyagrunnurin og Framtaksgrunnurin eru veruligir sjálvsognargrunnar.*

Fíggingargrunnurin frá 1992

Grunnurin er fevndur av lógini um vinnurekandi grunnar, og er skrásettur hjá Skráseting Føroya. Sambært serlóg eigur landskassin grunnin. Í frágreiðing um einskiljing av Føroya Banka, ið varð latin landsstýrismanninum í fíggjarmálum í desember 2005, stendur m.a., at Fíggingargrunnurin kann bert við loyvi frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum selja partabrøv í Føroya Banka ella vera við til at niðurskriva virðið á partabrøvunum í Føroya Banka. "Fíggingargrunnurin skal kortini sjálvur gera av, hvussu ein einskiljingartilgongd skal leggjast til rættis".

Eftir hesum at døma er ógreitt í hvønn mun, einskiljingarreglurnar fevna um ætlaðu einskiljingina av Føroya Banka, men sambært Fíggjarmálaráðnum skulu einskiljingarreglurnar verða fylgdar í sambandi við einskiljingina.

## 6.2 § 1. Endamál (við at einskilja fyritøkur landsins)

“Endamálið at einskilja fyritøkur landsins er:

- at skipa greitt mark millum almenna og einskilda geiran
- at verja virði skattgjaldarans, sum liggja bundin í fyritøkum landsins
- at minka um skuld landskassans
- at bøta um møguleikar hjá fyritøkum, sum í dag eru í almennari ogn
- at virka fyri virðisskapan
- at víðka skaran av partaeigarum í vinnuligum fyritøkum og
- at styrkja føroyska kapitalmarknaðin, soleiðis at íløgutørvur hjá langfreistaðari uppsparing finnur vegin fram til mótsvarandi fíggingartørv”

## 6.3 § 2. Politisk samskipan (av einskiljingarætlanum)

“Einskiljingarmál verða samskipað av politiskum bólki, mannaður av løgmanni og landsstýrismonnunum í ávikavist fíggjarmálum og vinnumálum.

Avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni samsvarandi Løgtingsins vilja.”

Ásett er, at avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni.

Verður ásetingin í § 2 samanborin við § 1 í íslendsku leiðreglunum, er tað einskiljingarnevndin, ið fyrisitingarliga skal fyrireika og samskipa arbeiðið við einskiljingunum.

Politiskur fylgibólkur

Sambært fundarfrásagnum hjá einskiljingarnevndini og uppritum frá Vinnumálaráðnum er skipaður ein “politiskur fylgibólkur”, sum hevur ein ávísan leiklut í einskiljingartilgongdini. Sambært innganginum til leiðreglurnar vil Landsstýrið virka fyri breiðari politiskari semju í einskiljingarmálum. Andstøðan á Løgtingi er tó ikki umboðað í “politiska fylgibólkinum”. Í januar 2006 hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum boðað frá, at hann hevur í hyggju at bjóða andstøðuni á fund, tá ið lógaruppskot er tilevnað um at einskilja.

Í fyrireikingunum at einskilja Atlantsflog, Føroya Lívstrygging og Føroya Tele er politiski fylgibólkurin mannaður við Kaj Leo Johannesen, úr Sambandsflokkinum, Heðini Zachariassen, úr Fólkaflokkinum, og Kristiani Magnussen, úr Javnaðarflokkinum.

Í sambandi við Atlantsflog hevur politiski fylgibólkurin verið á fundum við einskiljingarnevndina og ein “arbeiðsbólk”. Sambært fundarfrásagnum hjá “arbeiðsbólkinum” verður víst til semjur og avtalur, ið eru gjørdar við politiska fylgibólkin. Eitt nú um, undan søluni av Atlantsflogi, at skjóta 2 ognir inn í felagið; tyrluna, sum Atlantsflog rekur fyri landið, og hangarin á flogvøllinum í Vágum, sum Atlantsflog leigar frá landinum. Eftir fundarfrásagnunum at døma gevur politiski fylgibólkurin sín stuðul til arbeiðið hjá “arbeiðsbólkinum” so hvørt.

Sambært formanninum í einskiljingarnevndini hevur politiski fylgibólkurin ongar heimildir. Vinnumálaráðið hevur í januar 2006 greitt frá, at politiskur fylgibólkur verður brúktur fyri at vita, um undirtøka er í samgonguni fyri fyrireikingararbeiðinum hjá landsstýrismanninum. Vinnumálaráðið heldur ikki, at “góðkenningin”, politiski fylgibólkurin veitir landsstýrismanninum, kann samanberast við “semjur og avtalur”.

Sambært uppriti hjá Vinnumálaráðnum um at einskilja Atlantsflog hevur svensk tyrlufyritøka mett virðið á tyrluni til 1,3 mió.$ ella 8 mió.kr. Hangarurin er av byggiserkønum mettur til 29,2 mió.kr. Tað gongur ikki fram av uppritinum, hvørt talan er um t.d. søluvirði. Upprunaliga kostaði hangarurin umleið 60 mió.kr. at byggja. Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at tað hevur biðið um eina nýggja virðismeting av hangarinum.

## 6.4 <u>§ 3. Fyrisitingarlig samskipan</u> (einskiljingarnevndin)

"Undir politiska samskipanarbólkinum starvar embætisnevnd (einskiljingarnevndin).

Einskiljingarnevndin er mannað við umboðum, vald av løgmanni og nevndu landsstýrismonnum. Í serstøkum einskiljingarmálum kann nevndin víðkast við umboði, valt av viðkomandi landsstýrismanni.

Einskiljingarnevndin ger uppskot til yvirskipaðar mannagongdir viðvíkjandi einskiljingum, eitt nú tá fyritøka verður umskipað til partafelag, tá umskipan av kapitalviðurskiftum fer fram, og tá ið ræður um mál viðvíkjandi rættindum hjá starvsfólki."

Sum eisini víst á frammanfyri undir § 2, er tað, samanborið við íslendsku leiðreglurnar, ikki í føroysku einskiljingarreglunum álagt einskiljingarnevndini at fyrireika og samskipa arbeiðið við einskiljingunum.

### *6.4.1 Einskiljingarnevndin*

Limirnir í politiska samskipanarbólkinum hava valt einskiljingarnevndina. Í henni sita løgmansstjórin, aðalstjórin í Vinnumálaráðnum, aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum og ein deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, sum eisini er formaður í nevndini. Nevndin er sostatt einans mannað við embætisfólki. Til samanberingar kann verða nevnt, at íslendska einskiljingarnevndin hevur verið mannað við løggildum grannskoðara, hægstarættarsakførara og tveimum embætismonnum. Í íslendsku leiðreglunum er ásett, at 2-3 starvsfólk hjá Fíggjarmálaráðnum eru nevndini til hjálpar.

Í einum uppriti 18. november 2002 til landsstýrisfund varð umrøtt, at føroyska einskiljingarnevndin skuldi hava sama leiklut sum tann íslendska, nevniliga at fyrireika og samskipa einskiljingartilgongdina.

Tá ið einskiljingarleiðreglurnar vórðu samtyktar í februar 2004, var tað í § 2 ásett, at avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljingartilgongdina. Føroyska einskiljingarnevndin hevur tó nakrar av teimum ráðgevandi og samskipandi uppgávunum, sum íslendska einskiljingarnevndin hevur.

Á fundi 20. januar 2003 helt einskiljingarnevndin, at fakligi førleikin, sum átti at verið í nevndini – beinleiðis ella óbeinleiðis – fevndi um økini corporate-finance, virðisbrævahandil, sáttmála-/vinnulívsrætt, roknskap/grannskoðan, kappingarviðurskifti og búskap á mikro- og makrostøði.

Sambært frásøgn 3. apríl 2005 frá fundi hjá politiska samskipanarbólkinum og einskiljingarnevndini er einskiljingarnevndin *"ikki væl mannað við fólki, ið hevur tímar til taks."*

Sambært frásøgn 28. juni 2005 frá fundi millum ein "arbeiðsbólk", sum er settur at fyrireika og ráðgeva landsstýrismanninum í einskiljingini av Atlantsflogi, og einskiljingarnevndina, vísti limur í einskiljingarnevndini á, at skuldi nevndin kunna ráðgeva landsstýrismanninum um søluhátt, skuldi hon hava serstaka ráðgeving til tess, og tað hevði hon ikki, sum var. Tí fór at verða neyðugt, at nevndin útvegaði sær ráðgevarar og neyðuga peningin. Einskiljingarnevndin ynskti eisini at kunna keypa sær kvalifiseraða ráðgeving, tá tørvur var á tí. Nevndin ynskti ein "Grayhead"/professionellan ráðgeva knýttan at sær at fylgja einskiljingararbeiðinum, men tað lat seg ikki gera. Harafturat vildi einskiljingarnevndin hava, at uppgávan at gera tilmæli til landsstýrismannin um søluhátt varð løgd til nevnda "arbeiðsbólk".

Í Føroyum eru 4 landsstýrismenn, sum hvør í sínum lagi hava ábyrgdina av at einskilja fyritøkur hjá landinum. Av tí at føroyska einskiljingarnevndin ikki hevur uppgávuna at fyrireika og samskipa einskiljingarnar, skal hvør landsstýrismaður í sínum lagi seta eina “einskiljingarnevnd/arbeiðsbólk”, ið hansara vegna fyrireikar einskiljingina. Ein partur av fyrireikingararbeiðinum verður gjørdur av leiðslunum (og ráðgevarum teirra) á fyritøkunum, sum skulu verða einskildar.

Helst vantar ein samskipandi eind í Føroyum, sum hevur orku og førleika at fyrireika og hava yvirskipaða umsjón við gongdini í øllum einskiljingarmálum. Ein fyrimunur hevði verið, at ein tílík eind hevði kunnað savnað, gagnnýtt og endurnýtt vitan og royndir frá einstøku einskiljingunum. Í Íslandi er tað einskiljingarnevndin, ið er fyrireikandi og samskipandi eindin.

### *6.4.2 Arbeiðsbólkar*

Arbeiðsbólkar eru skipaðir sum partar í fyrireikingini at einskilja Atlantsflog, Føroya Lívstrygging og Føroya Tele. Arbeiðsbólkarnir eru vanliga mannaðir við formanninum í einskiljingarnevndini, 1-2 embætisfólkum úr avvarðandi aðalráði og umboði fyri leiðsluna á fyritøkuni, sum verður einskild.

Í einskiljingini av Atlantsflogi er arbeiðsbólkurin mannaður við umboði frá Vinnumálaráðnum, formanninum í einskiljingarnevndini og nevndarformanninum í Atlantsflogi. Í málinum um at einskilja Føroya Lívstrygging er arbeiðsbólkurin mannaður við umboði frá Vinnumálaráðnum, formanninum í einskiljingarnevndini og einum umboði úr umboðsráðnum hjá Føroya Lívstrygging.

Sambært fundarfrásøgn 28. juni 2005 hjá arbeiðsbólkinum viðvíkjandi Atlantsflogi ynskti aðalstjórin í vinnumálum, ið eisini er limur í einskiljingarnevndini, at uppgávan hjá einskiljingarnevndini sambært § 6, at lata avvarðandi landsstýrismanni tilmæli um søluhátt, varð latin arbeiðsbólkinum, og semja var um, at arbeiðsbólkurin skuldi taka sær av hesi uppgávu.

Sambært formanninum í einskiljingarnevndini tekur ein arbeiðsbólkur sær av tí “operationella arbeiðinum” hjá einskiljingarnevndini. Harafturat skal arbeiðsbólkurin – sambært “arbeiðssetninginum” - fyrireika og ráðgeva landsstýrismanninum í allari einskiljingartilgongdini.

Ongar ásetingar um tílíkar arbeiðsbólkar eru í einskiljingarleiðreglunum. Ásett er, at einskiljingarnevndin í serstøkum einskiljingarmálum kann verða víðkað við umboði, valt av viðkomandi landsstýrismanni.

At limirnir í einskiljingarnevndini ikki hava neyðugu orkuna og neyðuga førleikan til at loysa tær uppgávur, ið álagdar eru nevndini sambært einskiljingarleiðreglunum, er helst orsøkin til, at nevndin óformliga letur “arbeiðsbólkum” nakrar av uppgávum sínum. Tað kann vera ein skynsom neyðloysn, sum arbeiðsumstøðurnar hjá einskiljingarnevndini eru í løtuni, men framferðarhátturin er ikki tann, ið leiðreglurnar leggja upp til.

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at í uppskotinum til nýggjar einskiljingarleiðreglur eru ásetingar um “arbeiðsbólkarnar”, og hvørjar uppgávur og heimildir teir hava.

### *6.4.3 Yvirskipaðar mannagongdir*

Í § 3 stendur m.a., at *“Einskiljingarnevndin ger uppskot til yvirskipaðar mannagongdir viðvíkjandi einskiljingum, eitt nú tá fyritøka verður umskipað til partafelag, tá umskipan av kapitalviðurskiftum fer fram, og tá ið ræður um mál viðvíkjandi rættindum hjá starvsfólki.”*

Landsgrannskoðanin spurdi í mai 2005 Fíggjarmálaráðið, hvørjar yvirskipaðar mannagongdir einskiljingarnevndin hevur gjørt. Fíggjarmálaráðið greiddi frá, at einskiljingarleiðreglurnar eru yvirskipaðu mannagongdirnar, sum sipað verður til í § 3, og at hesar yvirskipaðu mannagongdir verða nýttar, tá ið aðrar mannagongdir verða gjørdar.

Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið ein fyrimunur fyri einskiljingartilgongdina, um yvirskipaðar mannagongdir verða gjørdar, m.a. tí, at í eini einskiljingartilgongd er talan um nógvar sera torgreiddar spurningar. Seinni í frágreiðingini er víst á altjóða leiðreglur um at grannskoða einskiljingar. Hesar reglur kundu kanska eisini verið nýttar sum íblástur til at áseta skynsamar yvirskipaðar mannagongdir.

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at einskiljingarnevndin hevur gjørt yvirskipaðar mannagongdir, tá landið selur minnilutapartabrøv. Einskiljingarnevndin hevur ikki gjørt mannagongdir fyri umskipan av fyritøkum og fyri rættindum hjá starvsfólki í sambandi við sølu av fyritøkum.

## 6.5 § 4. Greining (av rakstri og rakstrarumhvørvi)

"Áður enn landsstýrismaður fer undir at gera uppskot um broyting av løgfrøðiligum skapi á almennari fyritøku ella at gera uppskot um at selja hana heilt ella lutvíst, skal nágreinilig lýsing av rakstri og rakstrarumhvørvi hjá fyritøkuni fáast til vega. Mett verður um avleiðingar, ið einskilijing ella broytt løgfrøðiligt skap hevur á hesi viðurskifti.

Lýsingin av fyritøkuni skal somuleiðis fevna um marknaðarliga virðismeting, ið er grundað á nútíðarvirðið av framtíðar peningastreymi, fyritøkan kann skapa eigarum sínum.

Aðrir virðismetingarhættir verða eisini at nýta til samanberingar."

Tað gongur ikki greitt fram av ásetingunum, hvør skal gera ella útvega nevndu greiningar. Sambært formanninum í einskiljingarnevndini er tað landsstýrismaðurin, ið skal útvega hesar greiningar.

Sambært íslendsku leiðreglunum er tað einskiljingarnevndin, ið við útboði biður løggildar virðisbrævafyritøkur um slíkar greiningar.

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at tað er landsstýrismaðurin, ið varðar av og hevur ábyrgdina av at einskilja P/f Atlantsflog, P/f Føroya Lívstrygging og P/f Føroya Tele. Einskiljingarnevndin ger yvirskipaðar leiðreglur og hevur eitt umboð í arbeiðsbólkinum, sum avvarðandi landsstýrismaður velur.

### Greiningar í sambandi við einskiljing av Føroya Banka

Fíggingargrunnurin frá 1992, sum eigur Føroya Banka, hevur latið serfrøðingar gera eina kanning um Føroya Banka. Ráðgevingarfyritøkan Alfred Berg, ABN AMRO, hevur saman við grannskoðaravirkjunum Spekt og Rasmussen & Weihe staðið fyri kanningini. Kostnaðurin av kanningini verður goldin av Fíggingargrunninum.

### Greiningar í sambandi við einskiljing av Atlantsflogi

Í fundarfrásøgn 24. august 2005 hjá arbeiðsbólkinum, sum fyrireikar einskiljingina av Atlantsflogi, mælir nevndarformaðurin í Atlantsflogi til, *"at sølan ikki verður gjørd fløkt við ov nógvari óneyðugari ráðgeving. Felagið eigur saman við internum ráðgevum at lýsa felagið, men skal nýta eksternar ráðgevarar til at virðismeta felagið og sjálva søluna."*

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at landsstýrismaðurin er ósamdur við nevndarformanninum í Atlantsflogi. Landsstýrismaðurin heldur tað vera týdningarmikið at hava serkøna og óhefta ráðgeving, tá ið fyritøkur landsins verða einskildar.

### Umskipan av Postverki Føroya til partafelag

Í mai 2005 spurdu vit Fíggjarmálaráðið, um leiðreglurnar eru nýttar í sambandi við umskipanina av Postverki Føroya til partafelag, og hvønn leiklut einskiljingarnevndin hevur havt í hesum máli. Fíggjarmálaráðið greiddi frá, at einskiljingarnevndin ikki hevur viðgjørt umskipanina av Postverki Føroya, og at leiðreglurnar ikki eru nýttar í sambandi við umskipanina.

Greiningar av rakstri og rakstrarumhvørvi o.a. í.s.v. einskiljing av Føroya Lívstrygging

15. oktober 2004 lat einskiljingarnevndin landsstýrismanninum í vinnumálum tilmæli í málinum um at einskilja Føroya Lívstrygging. Nevndin mælti m.a. til:

1. at kappingarstøðan í føroyska tryggingargeiranum verður lýst, áðrenn farið verður undir at evna til ítøkiligt lógaruppskot um at einskilja Føroya Lívstrygging.
2. at mett eigur í hesum sambandi eisini at verða um, hvussu landið kann minka um kappingaravlagandi leiklut sín á eftirlønarmarknaðinum. T.d. eigur at verða kannað, hvussu kundar í Føroya Lívstrygging kunnu flyta eftirlønaruppsparingar við landskassaveðhaldi til peningastovnar ella aðrar fíggjarstovnar, ið kunnu umsita eftirlønaruppsparing.
3. at tað eigur at verða kannað, um tað við lóg skal setast hámark fyri, hvussu stóran kostnað tryggingarfelag kann áleggja kundum, ið vilja flyta eftirlønaruppsparingina úr einum stovni í annan.
4. at virðismeting verður gjørd av Føroya Lívstrygging, grundað á t.d. hesar fortreytir:
    1. Øll partabrøv verða boðin út í almennum útboði, har roynt verður at fáa so nógvar nýggjar partaeigarar, sum til ber, tó soleiðis, at eingin partur (ella fíggjarliga samantengdir partar) kann eiga meira enn t.d. 1% av partabrøvunum.
    2. Øll partabrøv verða seld strategiskum íleggjara, sum skal lúka krøv um kapitalgrundarlag, førleika o.a.
    3. Kombinatión av almennari sølu og sølu til strategiskan íleggjara við atliti til tey kritisku ognarlutføllini smb. partafelagslógini, t.v.s. ognarpartar svarandi upp til 33% og 50% av partabrøvunum.

Vit hava biðið landsstýrismannin greiða frá viðgerðini av tilmælunum og hava spurt, hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til hvørt tilmæli sær.

Landsstýrismaðurin hevur ikki svarað beinleiðis upp á spurningin, sum varð settur, men í januar 2006 hevur hann greitt frá, at hann hevur sett arbeiðsbólk við umboðum fyri Vinnumálaráðið, einskiljingarnevndina, Føroya Lívstrygging og umboðsráðið hjá tryggingartakarunum. Arbeiðsbólkurin skal m.a. lýsa marknaðarstøðuna á føroyska eftirlønartryggingarøkinum, herímillum hvørji atlit skulu verða tikin til kapping og brúkaraáhugamál.

Arbeiðsbólkurin skal eisini kanna, í hvønn mun kundar við landskassaveðhaldi kunnu flyta eftirlønaruppsparing til aðrar fíggjarstovnar. Landsstýrismaðurin arbeiðir við at dagføra tryggingarlóggávuna, herímillum at liberalisera marknaðin, so tað verður lættari hjá kundum at skifta veitara. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið í august 2006.

Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at virðismeta Føroya Lívstrygging, tá ið landsstýrismaðurin hevur fingið heimild at selja og avhenda partabrøvini í felagnum.

## 6.6 **§ 5. Kunngerð** (um sølu av almennari fyritøku)

> "Fyri at tryggja øllum pørtum javngóðan møguleika at vísa áhuga og at leggja fram boð, verður ítøkilig ætlan um sølu av landsfyritøku kunngjørd alment."

## 6.7 § 6. Søluháttur

> “Avvarðandi landsstýrismaður fær tilmæli frá einskiljingarnevndini um søluhættir, eitt nú um søla skal fremjast við almennum útboði, ella um tiltøk skulu setast í verk fyri at finna strategiskar íleggjarar. Landsstýrismaðurin ger við støði í hesum tilmælum uppskot um søluhátt at leggja fyri Løgtingið.”

Sum víst á frammanfyri, vildi einskiljingarnevndin hava, at uppgávan hjá nevndini at geva avvarðandi landsstýrismanni tilmæli um søluhátt varð latin “arbeiðsbólkinum”, sum hevur átikið sær uppgávuna.

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið greitt frá, at sambært uppskotinum til nýggjar einskiljingarleiðreglur, er tað arbeiðsbólkurin, ið letur landsstýrismanninum tilmæli um søluhátt.

Einskiljing av P/f Føroya Lívstrygging

Landið eigur allan partapeningin í P/f Føroya Lívstrygging, sum sambært landsroknskapinum er 500 t.kr. Partapeningurin hevur tó munandi hægri virði. Eginpeningurin í felagnum við árslok 2004 var sambært ársroknskapinum góðar 80 mió.kr. Vinnumálaráðið hevur í januar 2006 víst á, at stórur partur av eginpeninginum er bundin tiltakspeningur, sum leiðsla og eigari ikki frítt kunnu ráða yvir.

Í einum uppriti 13. februar 2004 mælti landsstýrismaðurin í vinnumálum Landsstýrinum til at arbeiða eftir ætlan, sum undanfarna Landsstýrið 23. februar 2003 hevði tikið undir við, har helvtin av partabrøvunum, sum landið eigur í P/f Føroya Lívstrygging, verða latin einum felag við tryggingartakarunum í Føroya Lívstrygging sum limum. Ætlanin er at selja hini 50% av partapeninginum til ein strategiskan íleggjara. Víst varð á, at hægri søluprísur fæst, um øll partabrøvini verða lýst til sølu, men fyrimunurin við ætlaðu loysnini er, at málið um Føroya Lívstrygging verður loyst í semju við tey fakfeløg, sum hava kravt størri ávirkan til tryggingartakararnar.

25. februar 2004 fekk einskiljingarnevndin til ummælis tvinni upprit frá Vinnumálaráðnum um at avhenda partabrøvini, har annað var um ætlanina at geva 50% av partabrøvunum til løgfrøðiliga eind, ið skal umboða kundarnar hjá Føroya Lívstrygging.

*Tilmæli frá einskiljingarnevndini viðv. sølu av partapeninginum í P/f Føroya Lívstrygging*

Í tilmæli sínum 15. oktober 2004 mælir einskiljingarnevndin m.a. til, at partabrøvini verða einskild eftir tí leisti, sum einskiljingarleiðreglurnar og samgonguskjalið leggja upp til. Nevndin heldur, at ætlanin at geva 50% av partabrøvunum til løgfrøðiliga eind, ið skal umboða kundarnar hjá Føroya Lívstrygging, kann skaða álitið á einskiljingartilgongdina sum heild og kann gerast óheppið fordømi í øðrum málum.

Á landsstýrisfundi 16. november 2004 mælti landsstýrismaðurin í vinnumálum frá at fylgja tilmælinum hjá einskiljingarnevndini, og mælti í staðin til at halda fast við ta kós, ið fyrr var avtalað, og landsstýrismaðurin fekk undirtøku fyri, at Vinnumálaráðið kundi fara undir at fyrireika sølu av 50% av Føroya Lívstrygging.

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2006 greitt frá, at við at halda fast við avtalaðu kósina, fylgdi hann løgtingssamtyktini 13. mars 2002 “um at umskipa Føroya Lívstrygging, so at tryggingartakararnir fáa fulla ávirkan og innlit”, og hann fylgdi eisini samtyktini frá landsstýrisfundi 23. februar 2003, tá landsstýrismaðurin fekk undirtøku fyri, at helvtin av partabrøvunum skuldi verða latin felag við tryggingartakarunum í Føroya Lívstrygging, og at hin helvtin skuldi verða seld. Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tilgongdin í sambandi við einskiljing av Føroya Lívstrygging kann skaða samlaðu einskiljingartilgongdina, og hann heldur ikki, at einskiljingin av Føroya Lívstrygging er eitt fordømi, tá talan er um aðrar einskiljingar, sum landsstýrismaðurin varðar av.

Landsgrannskoðanin bað í oktober 2005 landsstýrismannin greiða frá:

1. hvat endamálið var við at biðja einskiljingarnevndina um at ummæla uppritini,
2. hví hann ikki fylgdi tilmælunum frá einskiljingarnevndini,
3. og hvørjar sakligar grundgevingar eru fyri at geva burtur 50% av partabrøvunum.

*ad 1)* Landsstýrismaðurin hevur í januar 2006 víst til einskiljingarleiðreglurnar, har tað er ásett, at øll einskiljingarmál verða at leggja fyri einskiljingarnevndina til ummælis.

*ad 2)* Landsstýrismaðurin vísir á, at orsøkin til, at hann ikki fylgir tilmælunum frá einskiljingarnevndini, er, at einskiljingarleiðreglurnar vórðu staðfestar næstan eitt ár eftir, at landsstýrismaðurin fór undir arbeiðið at fyrireika einskiljingina av Føroya Lívstrygging eftir frammanfyri nevnda leisti.

*ad 3)* Landsstýrismaðurin vísir á, at Landsstýrið hevur tikið undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum um, at málið verður loyst soleiðis, at eitt felag (ognarfelag tryggingartakaranna) verður stovnað. Landið avhendar helvtina av partabrøvunum til felagið. Limir í felagnum eru tey, ið til eina og hvørja tíð eru tryggingartakarar hjá Føroya Lívstrygging.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at landsstýrismaðurin svarar beinleiðis spurningunum um, hvørjar sakligar grundgevingar eru fyri at geva burtur partabrøv, sum landið sambært lóg eigur.

*Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum*

Í einum uppriti í november 2004 helt Fíggjarmálaráðið, at ætlanin um at lata tryggingartakarunum 50% av partabrøvunum í Føroya Lívstrygging, og selja hini 50% til strategiskan íleggjara, var tann mest óhepna loysnin, ið hugsast kundi. Við einum 50/50 hevur eingin meirilutan, og tí kann eingin aðalfundaravgerð verða tikin, uttan at báðir partar eru fullkomiliga samdir.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur í januar 2006 víst á, at trupulleikarnir, ið kunnu standast av einari 50/50-loysn, kunnu verða loystir við einum partaeigarasáttmála og við viðtøkum fyri felagið.

<u>Søla av partabrøvum, sum Framtaksgrunnurin eigur í P/f Faroe Seafood</u>

Í tíðindaskrivi 22. mars 2005 boðaði Framtaksgrunnurin frá, at í seinasta lagi 24. oktober 2005 fór “Faroe Seafood” (navnið á samanlagda felagnum, P/f United Seafood og P/f Faroe Seafood) at verða sett til sølu. Sølan fór at verða skipað í samráði við Corporate Finance deildina hjá KPMG í Keypmannahavn, og sølan fór at verða framd eftir einum leisti, soleiðis at allir áhugaðir keyparar fóru at kunna bjóða uppá partabrøvini í felagnum.

Í tíðindaskrivi 20. oktober 2005 boðaði Framtaksgrunnurin frá, at farið var undir sølutilgongdina. Sølan verður skipað sum ein stýrd <u>uppboðssøla</u>, har møguligir keyparar fáa høvi at bjóða uppá samlaða partapeningin í P/f Faroe Seafood. Sølutilgongdin verður umsitin av Corporate Finance deildini hjá KPMG í Keypmannahavn, og tilgongdin verður í 3 stigum.

Í 1. stigi kunnu áhugaðir keyparar seta seg í samband við KPMG í Keypmannahavn. Hesir áhugaðu keyparar skriva undir trúnaðaravtalu og fáa útflýggjað sølutilfar um P/f Faroe Seafood, nevnt “Information Memorandum”. Áhugaðir keyparar kunnu skrivliga lata KPMG í Keypmannahavn eitt óbindandi “indikativt” boð”.

KPMG í Keypmannahavn fer eisini at seta seg í samband við útvaldar keyparar í Føroyum og í útlandinum við tí fyri eyga at vekja áhuga fyri fyritøkuni. Sølutilgongdin er tí ikki ein “rein uppboðssøla”.

Í 2. stigi velur Framtaksgrunnurin, við støði í innkomnu “indikativu” boðunum, út avmarkað tal av keyparum, sum halda fram í tilgongdini. Útvaldu keypararnir fáa fleiri upplýsingar um felagið, og teir skulu lata inn eitt bindandi boð.

Í 3. stigi velur Framtaksgrunnurin, við støði í bindandi boðunum, út teir keyparar, sum skulu verða við í endaligu samráðingunum.

Framtaksgrunnurin boðaði í tíðindaskrivinum frá, at grunnurin tilskilar sær rætt at steðga ella broyta sølutilgongdina og at góðtaka ella vraka tilboð, óansæð um talan er um hægsta boð ella ikki.

Einskiljingarnevndin hevur ikki, sum ásett í § 6 í einskiljingarreglunum, latið landsstýrismanninum tilmæli um søluhátt, og landsstýrismaðurin hevur ikki, við støði í tilmæli frá einskiljingarnevndini, gjørt uppskot um søluhátt at leggja fyri Løgtingið. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir á, at talan er um ein sjálvsognargrunn, sum er fevndur av lógini um vinnurekandi grunnar.

Søla av partabrøvum, sum Føroyagrunnurin átti í P/f J.F.K.-samtakinum

Í tíðindaskrivi 22. juli 2005 boðaði nevndin í Føroyagrunninum frá, at nevndin hevði selt 2/3 av partabrøvunum í P/f J.F.K.-samtakinum.

Í skrivi 25. juli 2005 til løgmann vísti einskiljingarnevndin á, at sølan av partabrøvunum hjá Føroyagrunninum í J.F.K.-samtakinum varð framd uttan útboð, og at tað ikki var í samsvari við mannagongdirnar í einskiljingarleiðreglunum. Einskiljingarnevndin helt, *“at Føroyagrunnurin er ein vinnurekandi grunnur, og at hann tí ikki løgfrøðiliga er bundin at fylgja einskiljingarleiðreglunum.”*

Í september 2005 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin í fíggjarmálum:

- hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til, at nevndin seldi partapening til stjóran og til ein peningastovn, uttan at bjóða partapeningin út, og uttan at fylgja leiðreglunum um at einskilja fyritøkur landsins,
- hvønn leiklut landsstýrismaðurin hevur havt í sambandi við søluna av partabrøvum hjá Føroyagrunninum, og
- um einskiljing av Føroyagrunninum er viðgjørd av einskiljingarnevndini og politiska samskipanarbólkinum undan søluni av partabrøvum hjá Føroyagrunninum.

Spurningarnir eru endurgivnir á s. 21 í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 26. oktober 2005. Har hava vit skrivað, at nevndin seldi partapeningin til ein peningastovn, “hvørs stjóri er nevndarlimur í grunninum”. Stjórin í peningastovninum er ikki nevndarlimur í grunninum, og í skrivi til landsstýrismannin í fíggjarmálum og til allar løgtingsgrannskoðararnar hava vit í november 2005 greitt frá mistaki okkara. Vit hava eisini boðað frá, at Landsgrannskoðanin er sera hørm um mistakið.

Í desember 2005 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann hevur ongan leiklut havt í sambandi við søluna, tí hann metir Føroyagrunnin vera ein sjálvsognargrunn, ið landsstýrismaðurin onga ávirkan hevur á.

Einskiljingarnevndin hevur ikki, sum ásett í § 6 í einskiljingarreglunum, latið landsstýrismanninum tilmæli um søluhátt, og landsstýrismaðurin hevur ikki, við støði í tilmæli frá einskiljingarnevndini, gjørt uppskot um søluhátt at leggja fyri Løgtingið.

Sambært landsstýrismanninum í fíggjarmálum er talan um ein sjálvsognargrunn, sum er fevndur av lógini um vinnurekandi grunnar. Landsstýrismaðurin vísir eisini til brot í skrivi 5. august 2005 frá grunsmyndugleikanum: *“Erhvervs- og selskabsstyrelsen som fondsmyndighed for fonden kan godkende, at 67 % af fondens aktier afhændes...”*. Í skrivinum stendur m.a. eisini, at grannskoðari grunsins: *“har afgivet erklæring om, at den aftalte købspris i forbindelse med salget af aktierne efter revisors opfattelse mindst svarer til markedsværdien.”*

## 6.8 § 7. Søla við almennum partabrævaútboði

> "Í førum, har almenn fyritøka heilt ella partvíst verður seld í almennum partabrævaútboði, skal sami prísur setast á øll partabrøv til sølu. Prísurin verður ásettur við støði í virðismetingum, nevndar í § 4.
>
> Vísir eftirspurningur seg at vera størri enn útboð, verða partabrøv seld eftir teirri tíðarraðfesting, keypsboð eru framkomin og skrásett eftir, tó undantikið í førum, sum nevnd eru í § 10."

Í einskiljingarálitinum verður á s. 104-105 m.a. víst á, at føroyska íløguumhvørvið er heldur óvant við at gera íløgur í partabrøv, og tí er rætt at fremja eitt varisligt útboð av partabrøvum hjá almennum fyritøkum, fyri at tryggja føroyskum íleggjarum rímiligt skotbráð at byggja upp íløguførleika og íløgumentan, so eftirspurningurin í rímiligt mát fylgir útboði.

Verkætlanarbólkurin, ið skrivaði einskiljingarálitið, heldur tað vera ilt at meta um, hvussu stórt árliga útboðið av partabrøvum eigur at vera, tí "bólkurin" veit ikki, um íleggjarar í øðrum londum hava áhuga fyri fyritøkum landsins. Harafturat er íløguhugurin treytaður av, hvørja "góðsku" fyritøkurnar, sum tað almenna selur, hava. Verkætlanarbólkurin vísir at enda á, at greitt politiskt mál er ikki orðað fyri, hvussu stóran part av útbodnu partabrøvunum føroyskir íleggjarar skulu kunna keypa.

Í einskiljingarálitinum verður lagt upp til, at sølan av almennum fyritøkum í høvuðsheitum fer fram á almennum partabrævamarknaði. Tað tykist eisini vera í samljóði við endamálsorðingarnar í § 1 í leiðreglunum um at víðka skaran av partaeigarum í vinnuligum fyritøkum og at styrkja føroyska kapitalmarknaðin.

## 6.9 § 8. Søla til strategiskar íleggjarar o.t.

> "Í førum, har ætlanin er at selja uttan alment partabrævaútboð, verður útbjóðingarumfar fyrireikað og framt. Endamálið við útbjóðingini er at tryggja sum mest av tilboðum frá íleggjarum við nøktandi eginleikum, ið skulu til fyri at tryggja framhald og menning av fyritøkuni, ætlanin er at einskilja. Í útbjóðingartilfarinum verða tí krøv sett íleggjarum, eitt nú viðvíkjandi kapitalgrundarlagi, royndum og førleika.
>
> Innkomin tilboð verða mett eftir reiðupeningsvirði. Um tilboðsveitari ynskir at gjalda við øðrum virðum enn reiðupeningi, verður serstøk meting gjørd av váða og vinningskravi, ið eru tengd at gjaldmiðli.
>
> Tikið verður av keypstilboði, ið tryggjar bestu gjalding og hægsta prís í reiðupeningi, tó undantikið í førum, sum nevnd eru í § 10. Ónøktandi tilboð verða afturvíst."

## 6.10 § 9. Ráðgeving og virðisbrævahandil

> "Óheftar virðismetingar og aðrar tænastur viðvíkjandi §§ 4, 6, 7, 8 og 10 kunnu útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum og øðrum fyritøkum við hóskandi fakligum førleika.
>
> Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing viðvíkjandi slíkum uppgávum. Nevndin ger tilmæli til viðkomandi landsstýrismann um val av tænastuveitara. Tilmæli verða grundað á innkomin tilboð, har greiða er á vavi av tænastum, prísi og treytum annars."

Landsgrannskoðanini kunnugt, hevur einskiljingarnevndin ikki fyrireikað útbjóðing av nakrari ráðgevaratænastu.

Sum víst á frammanfyri, hevði tað helst verið ein fyrimunur, um einskiljingarnevndin í størri mun var ein samskipandi eind, sum hevði orku og førleika at hava yvirskipaða umsjón við gongdina í øllum einskiljingarmálum frá byrjanini, eisini viðvíkjandi útbjóðing av ráðgeving. Tað hevði kunnað tryggjað eina betri og meira gjøgnumskygda ráðgeving, sum

kanska í síðsta enda eisini hevði verið bíligari. Var ráðgevingin meira samskipað, hevði óivað borið til at gagnnýtt og endurnýtt ráðgevingina frá einum máli til annað.

Sambært § 7 í íslendsku leiðreglunum skulu greiningar, virðismetingar, ráðgeving um søluhátt o.a. latast løggildum virðisbrævahandlarum og ráðgevum, sum teir boðsenda. Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing av slíkum uppgávum.

Viðmerkingar frá Vinnumálaráðnum

Vinnumálaráðið hevur í januar 2006 boðað frá, at bíðað verður við at bjóða út ráðgevaratænastu, til landsstýrismaðurin hevur fingið heimild at einskilja.

## 6.11 § 10. Søluavmarkingar

> "Har viðurskiftini tala fyri tí, ger avvarðandi landsstýrismaður uppskot at leggja fyri Løgtingið um hámark fyri sølu av partabrøvum til einstakan part ella fíggjarliga samantengdar partar. Hetta verður gjørt við støði í greiningum sambært § 4. Atlit skulu í slíkum førum takast til endamálið at einskilja fyritøkur landsins, sum nevnt er í § 1. Somuleiðis skulu atlit takast, ið tryggja nøktandi kapping á teimum marknaðum, fyritøkan virkar á.
>
> Útlendingar eiga rætt at ogna sær partabrøv í tann mun, serstøk føroysk lóggáva ikki avmarkar hesum."

Ongin søluætlan er komin so langt, at avvarðandi landsstýrismaður hevur gjørt av at selja við almennum partabrævaútboði. Tí eru heldur ongar ásetingar gjørdar um hámark fyri sølu av partabrøvum til einstakan part ella fíggjarliga samantengdar partar.

## 6.12 § 11. Upplýsingar

> "Landsstýrismaður skal, skjótast til ber, kunna almenningin um gongd og støðu í einskiljingarmálum, hann varðar av."

Landsgrannskoðanini kunnugt, hava avvaraðandi landsstýrismenn ikki á skipaðan hátt kunnað um gongd og støðu í einskiljingarmálum.

Tað tykist, sum leiðslurnar á almennu fyritøkunum, sum skulu verða einskildar, byrja fyrireikingarnar at umskipa/einskilja seg sjálvar uttan nakra samskipan við aðrar ætlaðar einskiljingar og uttan nakrar yvirskipaðar mannagongdir.

Í fleiri førum tykist tað, sum Landsstýrið og einskiljingarnevndin ikki rættiliga hava vitað, hvat fyrifórst í fyritøkunum, sum skulu einskiljast, og hava tí ikki havt neyðugu vitanina at kunna um gongd og støðu í málunum.

Sum víst á frammanfyri, er í § 11 í íslendsku leiðreglunum ásett, at einskiljingarnevndin tekur sær av almennari kunning um einskiljingarpolitikkin hjá stjórnini, og nevndin letur úr hondum eina ársfrágreiðing um gongdina í einskiljingarmálum, herímillum eisini um ætlanir at umskipa almennar fyritøkur til partafeløg.

Á heimasíðuni hjá íslendska forsætismálaráðnum verður kunnað um einskiljingarmálini, bæði á íslendskum og á enskum máli.

Viðmerkingar frá Vinnumálaráðnum

Vinnumálaráðið hevur í januar 2006 víst á, at landsstýrismaðurin, saman við arbeiðsbólkinum, sum fyrireikar einskiljing av Atlantsflogi, hevur kunnað starvsfólkini í felagnum um gongdina í málinum.

Vinnumálaráðið vísir eisini á, at kunningartilfar um gongdina í einskiljingarmálum nú er á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum. Ein "leinkja" vísir til eitt yvirlit yvir tey einskiljingarmál,

ið landsstýrismaðurin varðar av, og haðani eru leinkjur til lógaruppskot um at einskilja Atlantsflog og til fráboðan um sølu av minnilutapartabrøvum.

## 6.13 § 12. Frávik

> “Um landsstýrismaður ætlar at gera frávik frá mannagongdum v.m., sum omanfyri eru lýstar, skal hann fáa til vega ummæli av ætlan síni frá einskiljingarnevndini. Ætlan um frávik og ummæli frá nevndini verða løgd fyri landsstýrisfund til viðgerðar.”

Landsgrannskoðanini kunnugt, hevur eingin landsstýrismaður, sum ætlar at gera frávik frá mannagongdunum í einskiljingarleiðreglunum, fingið til vega ummæli frá einskiljingarnevndini.

Sambært íslendsku leiðreglunum skulu frávik verða almannakunngjørd, tá ið nevndin og stjórnin hava viðgjørt tey. Ein tílík skipan er til frama fyri størri gjøgnumskygni.

## 6.14 Dagføring av einskiljingarleiðreglunum

Í januar 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at einskiljingarnevndin hevur gjørt uppskot um at broyta einskiljingarleiðreglurnar soleiðis, at heimildar- og arbeiðsbýtið millum einskiljingarnevndina og arbeiðsbólkarnar verður greinað.

Broytingarnar av einskiljingarleiðreglunum verða gjørdar fyri á skynsaman hátt at gagnnýta førleikan í landsumsitingini. Uttanhýsis ráðgevarar verða brúktir til nærri ásettar uppgávur, t.d. at eftirmeta lýsingar og greiningar og í sambandi við sjálva søluna. Sambært Vinnumálaráðnum eru endurskoðaðu leiðreglurnar ikki staðfestar.

## 6.15 Játtan og kostnaður av at umskipa og einskilja landsfyritøkur

Higartil hevur sjálvstøðug játtan ikki verið á fíggjarlógini til útreiðslur av at einskilja fyritøkur landsins, og eingin serstøk játtan hevur verið til útreiðslurnar av virkseminum hjá einskiljingarnevndini.

### *6.15.1 Kostnaður higartil av einskiljingartilgongdini*

Trupult er at gera upp, hvat einskiljingartilgongdin hevur kostað higartil. Flestu útreiðslur eru hildnar uttanfyri fíggjarlógina, t.d. rindar Fíggingargrunnurin ráðgevum fyri fyrireikandi kanning av at einskilja Føroya Banka, Framtaksgrunnurin rindar ráðgevum fyri sínar einskiljingar, Føroya Tele rindar fyri sínar fyrireikingar, og hevur m.a. býtt virksemið upp í 3 ymisk feløg (kervi, tænastur og uttanlandstænastur), Postverk Føroya útvegaði greiningararbeiðið, sum varð lagt við lógaruppskotinum um at umleggja virksemið hjá Postverkinum og rindaði metingarmonnum fyri at virðismeta bygningar og aðrar ognir o.s.fr.

Almenningurin kennir sostatt ikki samlaða kostnaðin av fyrireikingunum til at umskipa og einskilja fyritøkur landsins.

Hvørki í føroysku ella íslendsku leiðreglunum eru nakrar reglur fyri, hvussu kostnaðurin av at einskilja skal verða fíggjaður.

<u>Viðmerkingar frá Vinnumálaráðnum</u>

Sambært Vinnumálaráðnum í januar 2006 er tað “arbeiðsbólkurin” í málinum at fyrireika at einskilja Føroya Tele, ið stendur fyri arbeiðinum at lýsa umhvørvi, søluhættir og avleiðingar o.a. Ætlanin er at útvega ráðgeva, um tørvur er á tí, at gera viðmerkingar til ávís evni í hesum sambandi, umframt at ráðgevarar skulu verða brúktir í sambandi við søluna. Tørvur er á játtan til ráðgevarar, bæði til ávísar uppgávur í sambandi við fyrireikandi arbeiðið og til ráðgevarar í sambandi við søluna.

### *6.15.2 Játtan á fíggjarlóg*

Í Íslandi hevur einskiljingarnevndin eina sjálvstøðuga játtan undir málsøkinum hjá forsætismálaráðharranum. Sambært frágreiðing í 2003 frá íslendsku ríkisgrannskoðanini hevur einskiljingarkostnaðurin, sum er fíggjaður á íslendsku fíggjarlógini, árini 1998-2003 verið umleið 680 mió. ISK (68 mió. DKK). Harav eru umleið 63 mió. DKK rindaðar serfrøðingum (t.e. grannskoðaravirkjum, íløgubankum o.s.fr.), og umleið 5 mió. DKK eru játtaðar til útreiðslur hjá einskiljingarnevndini.

Eingin játtan er á løgtingsfíggjarlógini 2005 til kostnaðin at einskilja fyritøkur landsins.

Í broytingaruppskoti til løgtingsfíggjarlógaruppskotið 2006 skeyt Landsstýrið upp at játta 15 mió.kr. til serkønar ráðgevarar, ið veita landsstýrismanninum fíggjarliga og løgfrøðiliga ráðgeving, t.d. at virðismeta fyritøkur, at meta um innkomin tilboð, at gera sølusáttmála o.s.fr. Í uppskotinum varð roknað við, at inntøkan at selja partabrøv fór at verða í minsta lagi 15 mió.kr. Eingin játtan var til útreiðslurnar av virkseminum hjá einskiljingarnevndini. Játtanin til “einskiljingarætlanina” skuldi vera á egnari grein á fíggjarlógini, § 24 Einskiljingar.

Broytingaruppskotið hjá Landsstýrinum varð ikki tikið við í álitið hjá Fíggjarnevndini. Millum 2. og 3. viðgerð av løgtingsfíggjarlógaruppskotinum 2006 skeyt Fíggjarnevndin upp at játta 1 mió.kr. til “uttanhýsis útgreiningar viðvíkjandi einskiljingarætlanum” á høvuðskontu 11.1.02. “Løgmansskrivstovan”.

# 7 Um at grannskoða einskiljingar

## 7.1 Lógargrundarlag

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini, har ásett er, at Løgtingið velur nakrar grannskoðarar at grannskoða landsroknskapin og roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

## 7.2 Fíggjargrannskoðan og vanlig fyrisitingargrannkoðan

Sambært § 4 í grannskoðanarlógini skulu løgtingsgrannskoðararnir m.a. ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði (fíggjargrannskoðan).

Løgtingsgrannskoðararnir skulu eisini ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um. Her er talan um "vanliga fyrisitingargrannskoðan", sum vanliga fer fram, samstundis sum fíggjargrannskoðanin.

Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir í stóran mun á frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini, sum verður útint av Landsgrannskoðanini og løggildum og skrásettum grannskoðarum.

Áðrenn roknskapargrannskoðanin letur løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing, skal hon sambært § 12 leggjast fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, uttan so at brævaskifti áður hevur verið um tey mál, sum eru umrødd í frágreiðingini. Í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar skulu takast við møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til.

## 7.3 Víðkað fyrisitingargrannkoðan

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu harafturat sambært § 14 áleggja roknskapargrannskoðanini at gera frágreiðingar um "víðkaða fyrisitingargrannskoðan" á ávísum roknskaparøkjum, og teir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um "víðkaða fyrisitingargrannskoðan" á øllum roknskaparøkjum.

Sambært viðmerkingunum til § 14 í grannskoðanarlógini er "víðkað fyrisitingargrannskoðan":

> *"ein størri og meira djúptgangandi kanning enn vanlig fyrisitingargrannskoðan og kann gerast sum ein gjøgnumgongd av eini deild/stovni, eini serligari funktión, virksemi ella umsiting av lóggávu o.a. Víðkað fyrisitingargrannskoðan skilir seg hvørki endamáls- ella evnisliga frá vanligari fyrisitingargrannskoðan, men her eru tað løgtingsgrannskoðararnir, sum nærri útgreina endamálið við kanningini og kunnu seta víðkað krøv til tað tilfar, sum verður tikið við í kanningina, og til, hvussu grannskoðanarfrágreiðingin verður gjørd.*
>
> *Ein nágreinilig ætlan, bæði í tíð og evnisliga, umframt ein kostnaðarmeting og støðutakan til fígging av kanningini, skal gerast, áðrenn kanningin kann byrja. Tað kundi verið ein fyrimunur, at løgtingsgrannskoðararnir høvdu eina játtan at nýta til hetta endamál. Roknskapargrannskoðanin eigur at lata landsstýrismannin fáa høvi til at kunna seg um og gera viðmerkingar til kanningina og úrslitið av henni, áðrenn ein endalig niðurstøða verður gjørd, og ein frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum."*

## 7.4 Frágreiðingar

Sambært § 14 eru tað løgtingsgrannskoðararnir, ið kunnu áleggja Landsgrannskoðanini ella privatum grannskoðarum at lata teimum frágreiðingar um víðkaða fyrisitingargrannskoðan, og kunnu løgtingsgrannskoðararnir síðani sambært § 18 lata Løgtinginum frágreiðingina saman við møguligum viðmerkingum.

Ein tílík frágreiðing verður sambært tingskipanini viðgjørd sum skriv til Løgtingið, og løgtingsgrannskoðararnir og aðrir tingmenn hava møguleika til at seta løgmanni og landsstýrismonnum fyrispurningar viðvíkjandi viðurskiftum, sum eru lýst í frágreiðingini.

## 7.5 Tilmæli

Landsgrannskoðanin heldur, at grannskoðan av einskiljingum kemur undir hugtakið ”víðkað fyrisitingargrannskoðan” sambært § 14 í grannskoðanarlógini, og kann verða skipað innanfyri verandi lógarkarmar.

Grannskoðan av einskiljing liggur uttanfyri vanliga roknskapargrannskoðan. Tí er umráðandi at finna fram til alment viðurkendar leiðreglur, grannskoðanin kann halda seg til.

Altjóða felagsskapurin av ríkisgrannskoðanum, INTOSAI, hevur í 1998 gjørt leiðreglur um at grannskoða einskiljingar av almennum fyritøkum (***“Guidelines for Best Practice in the Audit of Privatisations”)***, ið byggja á royndir hjá ríkisgrannskoðanum í fleiri enn 100 londum. Vit hava týtt hesar reglur til føroyskt og lagt tær við sum **fylgiskjal 5.**

Landsgrannskoðanin vil mæla til, at hesar 40 leiðreglur verða brúktar sum útgangstøði í sambandi við grannskoðan av einskiljing. Vit hava í hesum sambandi eisini ráðført okkum við íslendsku ríkisgrannskoðanina, sum seinnu árini hevur kannað og skrivað fleiri frágreiðingar um einskiljingar í Íslandi.

Vit kunnu eisini vísa á, at sambært leiðreglu nr. 3 eru tað fleiri góðar grundir til, at ein ríkisgrannskoðan skal kanna eina einskiljing. Tílíkar uppgávur eru vanliga fevndar av heimildini hjá eini ríkisgrannskoðan, tí talan er um eina almenna ogn, og almenningurin hevur tørv á óheftari váttan av, at tilgongdin var hóskandi, og at skattgjaldarin fekk rætta virðið fyri fyritøkuna. Seljari og keypari eiga at vera greiðir yvir, at ríkisgrannskoðanin helst fer at gjøgnumganga søluna, og at partarnir kunnu verða drignir til svars fyri sín leiklut.

Sambært leiðreglu nr. 11 vísa royndirnar, at tað tænir áhugamálunum hjá øllum, ið vilja at sølan fer rætt fram, at allir partar í søluni vita, at ríkisgrannskoðanin, fyri at verja áhugamálini hjá almenninginum, púra óheft og nágreiniliga kann kanna søluna, og at úrslitið av kanningini kann verða almannakunngjørt.

Viðmerkingar

Vinnumálaráðið hevur í januar 2006 boðað frá, at tað tekur undir við sjónarmiðinum um, at grannskoðanin, sum nevnt í m.a. leiðreglu 3, so tíðliga sum gjørligt, og í tann mun stýrisskipan o.a. loyva tí, gerast partur av einskiljingartilgongdini, samstundis sum grannskoðanin varðveitir sína óheftu støðu.

Fíggjarmálaráðið hevur í januar 2006 boðað frá, at tað tekur undir við sjónarmiðinum um, at grannskoðanin av einskiljingartilgongdini tekur støði í leiðreglunum hjá INTOSAI um at grannskoða einskiljingar.

# 8 Brot úr leiðreglum at miða seg eftir, tá ið einskiljingar verða grannskoðaðar

## 8.1 Inngangur

Altjóða felagsskapurin av ríkisgrannskoðanum INTOSAI gjørdi í 1998 nakrar leiðreglur um at grannskoða einskiljingar av almennum fyritøkum.

Leiðreglurnar bera enska heitið ***"Guidelines for Best Practice in the Audit of Privatisations"*** (www.nao.org.uk/intosai/wgap/bestprac.htm).

Í hjálagda **fylgiskjali 5** er ein føroysk týðing av hesum leiðreglum. Flestu leiðreglurnar mæla ríkisgrannskoðarunum til at kanna, um seljarin (ráðharri ella einskiljingarnevnd), sum hevur ábyrgdina av einskiljingini, hevur sett í verk hóskandi fyrskipanir, sum skulu tryggja, at einskiljingin frá - byrjan til enda - fer rætt og reiðiliga fram. Tí kunnu hesar leiðreglur helst eisini verða nýttar sum íblástur hjá Landsstýrinum til at áseta yvirskipaðar leiðreglur fyri einskiljingartilgongdini.

Niðanfyri hava vit gjørt ein stuttan samandrátt av brotum úr flestu leiðreglunum (LR).

## 8.2 Krøv til førleika hjá grannskoðanini o.a.

LR 1: Bæði ting og almenningur seta sítt álit á ríkisgrannskoðanina til tess at vissa seg um, at einskiljingar eru farnar greidliga og reiðiliga fram, serliga við tí í huga, at fyritøkur og ognir hava verið rætt virðismettar.

Tey vilja vita, hvat ið vit hava lært, sum kann verða brúkt, tá ið aðrar einskiljingar standa fyri tørni.

Hevur ríkisgrannskoðanin ikki serkunnleikan, kann hon ikki veita vissu, tá ið vissa krevst, og ei heldur útgreina mál, um eitthvørt skeivt er farið fram.

LR 2: Ríkisgrannskoðanin skal tryggja sær, at hon hevur ta kjarnuvitan, henni tørvar fyri at kanna einskiljingartilgongdina til botns. Eyðvitað veldst um, hvat slag av einskiljing talan er um, umframt tíðarætlan, og hvussu víðfevndar einskiljingarætlanirnar hjá stjórnini eru. Ríkisgrannskoðanin skal umframt egna kjarnuvitan keypa sær uttanhýsis serfrøði, tá ið tørvur er á tí.

LR 3: Ríkisgrannskoðanin skal so tíðliga sum gjørligt, í tann mun stýrisskipan o.a. loyva tí, gerast partur av einskiljingartilgongdini, samstundis sum hon varðveitir sína óheftu støðu. Um ríkisgrannskoðanin kannar einskiljingina, áðrenn hon fer fram, hevur ríkisgrannskoðanin møguleika at rættleiða, áðrenn einskiljingin verður framd.

LR 5: Røtt og nágreinilig ráðlegging er serliga týdningarmikil, tá ið ein einskiljingartilgongd skal verða grannskoðað. Tað fevnir m.a. um at staðfesta, hvørji endamálini eru við einskiljingini, eisini tey, ið ikki eru borin fram (óalmenn), og hvørjir týðandi luttakarar eru í tilgongdini, vandamál og møguleikar við einskiljingini, og hvørt skyldan at kunna løggávutingið var nóg væl røkt. Ríkisgrannskoðanin skal royna at staðfesta, hvør lærdómur fæst úr einari einskiljing, og hvørt lærdómurin kann verða nýttur í einskiljingum, sum eru fyri stavn.

## 8.3 Um fyrireikingar undan sølu

### *8.3.1 Um at umskipa almenna fyritøku undan sølu*

LR 6: Umráðandi er, at ríkisgrannskoðanin skilir, hvussu og hví fyritøkan varð umskipað til tess at fata sjálva einskiljingina. Í londum, sum í skundi hava roynt at fara frá planbúskapi til marknaðarbúskap, hevur dentur ofta verið lagdur á í skundi at einskilja nógvar fyritøkur, samstundis sum roynt hevur verið at fáa løgfrøðiligar og aðrar skipanir upp á pláss, fyri at stuðla undir ein marknaðarbúskap. Broytingar í løggávuni hava við sær, at mátin, ríkisgrann-

skoðanir nýta at kanna einskiljingar, broytist. Ríkisgrannskoðanin má vera serliga ansin, um óvissa er um ognarrættin til ognirnar, sum staturin roynir at selja ella hevur selt.

### *8.3.2 Um at gera sær greitt, hvat endamálið er við at einskilja*

LR 7: Tá ið ríkisgrannskoðanin fer undir at kanna eina einskiljingartilgongd, skal hon greidliga fata, hvat seljarin ætlar sær við einskiljingini, og hvussu sambandið er millum ætlanirnar at einskilja og høvuðsmálini fyri búskapin annars. Fatar ríkisgrannskoðanin ikki greidliga tey mangan torgreiddu endamálini hjá seljaranum, ikki minst politisku endamálini, er vandi fyri, at ríkisgrannskoðanin fer undir eina fyrisitingargrannskoðan, sum ikki megnar at staðfesta og kanna, hvørji mál seljarin royndi at røkka.

### *8.3.3 Um ikki at skunda sølutilgongdina (ov nógv) ígjøgnum*

LR 8: Seljarar eru ofta undir stórum trýsti at avgreiða sølu eftir krevjandi tíðarætlan. Hetta ger ofta um seg, tá ið lond til dømis royna at fara frá planbúskapi til marknaðarbúskap so skjótt, sum til ber. Tílíkt kemur eisini fyri í rættiliga framkomnum búskapum, t.d. tá ið ein stjórn ætlar at fíggja útreiðslur á fíggjarlógini ella minka um almenna skuld við at selja fyritøkur.

Eisini verður tað hildið at vera góður skikkur at avgreiða søluna so skjótt, sum til ber, bæði so at fyritøkan ikki er fyri missi, av tí at ótryggleiki valdar um framtíð hennara, og fyri at varðveita kappingina millum bjóðarar fyri at fáa ein góðan handil.

At halda krevjandi tíðarætlan er eingin umbering fyri at gera mistøk. M.a. skal verða kannað, um farið varð fram eftir fummum í týðandi liðum í sølutilgongdini t.d.:

- tá ið uttanhýsis ráðgevar verða útnevndir,
- tá ið fyritøkan verður løgfrøðiliga fyrireikað til søluna,
- tá ið søluhátturin verður avgjørdur,
- tá ið roknskaparligar og aðrar fíggjarligar upplýsingar verða fyrireikaðar um at gera upp og virðismeta ogn og fyritøku,
- tá ið sølan av fyritøkuni verður marknaðarførd,
- tá ið samráðingar eru við keypara.

Eisini skal verða kannað, um týðandi lið vórðu lopin um ella avgreidd, og fólk ikki hugsaðu seg nóg væl um. Varð farið fram eftir fummum, ella vóru týðandi lið í tilgongdini lopin um, skal ríkisgrannskoðanin kanna, hvørt tað hevði skaðiliga ávirkan (sum kann verða gjørd upp í tølum) á úrslitið av einskiljingini, t.d. inntøkumiss.

### *8.3.4 Um at útvega óhefta virðismeting undan sølu*

LR 9: At fyritøka verður virðismett óheft, er umráðandi í væl fyriskipaðari sølu, tí hon ger seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar.

Virðismetingina kann eingin gera, ið hevur áhuga í søluúrslitinum, t.d. leiðslan á fyritøkuni, sum er til sølu. Sama um leiðslan bjóðar upp á fyritøkuna. Viðhvørt er neyðugt, at óheftur partur kannar virðismetingina.

### *8.3.5 Um at velja (rættan) søluhátt*

LR 10: Søluhátturin kann hava stóran týdning fyri, hvussu einskiljingin hilnast. Stundum er avgerðin løtt, t.d. kann almenn uppboðssøla vera einfaldasti og bíligasti framferðarhátturin, tá ið smáar fyritøkur verða seldar. Tá ið talan er um stórar fyritøkur, er truplari at velja ímillum marknaðarførda sølu til strategiskan íleggjara ella sølu á almennum partabrævaútboði. Seinna

loysnin hevur fleiri søluútreiðslur við sær, men eydnast at fáa íleggjararnar at kappast, kann søluprísurin hækka. Harafturat kann henda loysn hava annað árin, t.d. at innlendis kapitalmarknaðurin verður mentur.

Hvussu nærlagdur seljari er (ella ikki er), tá ið hann avger søluhátt, kann varpa ljós á, hvussu væl seljarin hevur skilt virksemið hjá fyritøkuni, sum verður seld, og hvussu áhugaverd hon kann vera á marknaðinum. Um seljarin ikki hugsar væl um, hvat slag av fyritøku hann skal selja, áðrenn hann velur søluhátt, kann hann fáa minni fyri søluna.

### *8.3.6 Um rættlæti (integritet) seljara í sambandi við sølu*

LR 11: Vandi er fyri, at teir, ið hava ábyrgdina av søluni, royna at fáa persónligan vinning heldur enn at fáa skattgjaldaranum sum mest burturúr. Váðin kann vera so ymisligur, og váðin kann vaksa í stórum í tí ógreiðu og óvissu, sum er í slíkum avhendingum.

Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, um seljarin hevði hóskandi mannagongdir fyri, hvussu bjóðarar vórðu vrakaðir, og hvussu áhugamálini hjá almenninginum í royndum vórðu vard.

Gáloysni seljarans kann hava við sær, at einskiljingin verður framd, og eingin gevur sær far um áhugamálini hjá almenninginum. Hetta hevur komið fyri, t.d. tá ið seljarin ikki gav øllum bjóðarum somu atgongd til upplýsingar um fyritøkuna. Á tann hátt komu nakrir bjóðarar at standa sterkari enn aðrir, og soleiðis varð kappingin um fyritøkuna doyvd.
Ósambærilig áhugamál kunnu koma fyri, tá t.d. leiðsla og/ella ráðgevar, sum kenna trúnaðarupplýsingar, hava fingið serstøðu sum bjóðarar.

## 8.4 Serkøn ráðgeving

**Um at útvega óhefta, skikkaða ráðgeving**

LR 13: Vanliga heitir seljari á nakrar útvaldar søluráðgevar um at bjóða upp á tænastuna at ráðgeva og stuðla honum í sølutilgongdini. Søluráðgevar skulu ikki bara hava neyðuga førleikan og hava kravda kunnleikan til marknaðin, sum fyritøkan virkar á, men teir skulu heldur ikki hava ósambærilig áhugamál í fyritøkuni, sum verður seld. Í lítlum búskapum kann hetta seinna fyrilitið útiloka summar søluráðgevar, tí har er oftari áhugamál, sum skarast.

**Um hvussu serfrøðingar verða valdir**

LR 38: Tað er góður skikkur at velja út uttanhýsis ráðgevar, eftir at tænastan er boðin út. Effektiv kapping leggur trýst á uttanhýsis ráðgevar, so teir geva so lág boð, sum til ber. Tað hevur helst eisini við sær, at uttanhýsis ráðgevar royna at finna besta háttin at røkka søluendamálunum. Tað hjálpir eisini seljara at skilja, hvønn tørv hann hevur, og tað lættir um hjá seljara at taka neyvar avgerðir um, hvør uttanhýsis ráðgevi verður valdur út. At kappast um at verða valdur er eisini ein hjálp hjá seljara, um honum verður kastað fyri, at hann veitir framíhjárættindi, tá hann tilnevnir ráðgevar.

**Um eftirlit við útreiðslum til serfrøðingar**

LR 39: Ráðgevaútreiðslur kunnu vera stórar. Tí ræður um, at seljari við harðari hond stýrir og hevur eftirlit við útreiðslunum og tryggjar sær, at hann fær fult virði fyri pengarnar.

Fíggjarætlanir eiga at byggja á grundarlag, sum greidliga er knýtt at arbeiðsætlanum og avtalum, sum eru gjørdar við ráðgevar.

Seljarar raðfesta ikki altíð eftirlit við sáttmálakostnaði nóg høgt. Tað hendir serliga, tá ið ráðgevar verða løntir eftir tíma- ella dagsgjaldi, og einki loft er á samlaða gjaldinum.

## 8.5 Um leiðsluna á fyritøku, ið skal verða einskild

### Um rættlæti hjá leiðsluni í einskiljingartilgongdini

LR 14: Starvsfólk í leiðsluni skulu vera tøk í einskiljingartilgongdini, samstundis sum tey skulu taka støðu til, hvørja ávirkan einskiljingin hevur á teirra støðu og starvsmøguleikar. Ynskiligt er, at høvuðsfólk í leiðsluni í øllum førum verða við í tilgongdini, og møguliga er neyðugt at eggja hesum bólki at verða verandi í starvi, til einskiljingartilgongdin er av (við partabrøvum fyri lægri prís o.s.fr.).

Hesi starvsfólk hugsa eisini um sína egnu framtíð, og tí kunnu tey verða freistað til at vísa einum bjóðara vælvild fram um annan fyri at tryggja síni egnu setanarviðurskifti í framtíðini, annaðhvørt hjá tí almenna ella hjá nýggja eigaranum. Tey kunnu skifta trúskap frá seljara til keypara, tá ið sáttmálin er undirskrivaður.

Seljarin má byrgja upp fyri hesum vanda, t.d. við at áseta greiðar reglur fyri samskiftið, ið leiðsla og starvsfólk hava loyvi at hava við bjóðarar.

### Um eftirlit við leiðsluni í einskiljingartilgongdini

LR 21: Seljari kann eggja leiðslu og starvsfólki til at bjóða upp á fyritøkuna, bæði fyri at vísa uttanhýsis bjóðarum, at fyritøkan er verd at keypa, og fyri at eggja leiðslu og starvsfólki til at verða verandi, meðan fyritøkan verður seld. Leiðslan kennir fyritøkuna betur enn nakar, so um seljarin ikki setir í verk serligar trygdaratgerðir, er vandi fyri, at uttanhýsis bjóðarar verða stygdir burtur til bága fyri søluna.

Fyri at byrgja upp fyri hesum váða skal seljarin hugsa um at halda leiðslu og starvsfólk, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru partar av leiðslubólki, sum ætlar at keypa fyritøkuna, burtur frá at taka avgerðir. Tað verður eisini mælt seljara til at áseta reglur fyri, hvussu leiðslukeyparabólkurin skal bera seg at. T.d. reglur sum áleggja leiðslukeyparabólkinum at skráseta síni áhugamál og at greina út, hvørjar upplýsingar teir kunnu geva teimum, ið skulu fíggja ætlaða keypið.

### Um at forða fyri, at leiðslan keypir fyritøkuna bíliga

LR 23: Av tí at leiðslan hevur stóra vitan um fyritøkuna, er váðin, at leiðslan keypir fyritøkuna fyri ein lágan prís og við lagaligum sølutreytum. Tað gevur leiðsluni møguleika at selja fyritøkuna fyri fult virði stutt eftir søluna. Størsta trygdin móti hesum váða er ein sølutilgongd, sum fer fram í kapping – stuðlað av einari virðismeting, seljarin hevur gjørt av fyritøkuni (sí leiðreglu 9) – sum er grundað á, at allir bjóðarar hava javnbjóðis atgongd til týdningarmiklar upplýsingar.

Seljari kann halda tað vera skynsamt at halda limum í leiðslukeyparabólkinum burtur frá at taka avgerðir á serligum økjum, eitt nú tá ið einskiljingin verður fyrireikað; Tað er eisini galdandi tá ið ognir og tilfeingi verða umskipað; tá ið partar av fyritøkuni verða seldir, áðrenn sjálv einskiljingin verður framd; tá ið skuldarviðurskifti verða umskipað; og ymiskar íløgur verða avgjørdar. Her er talan um avgerðir, ið ávirka virðið á fyritøkuni.

### Um gjøgnumskygni, tá partabrøv verða tilutað leiðslu og starvsfólki

LR 32: At lata leiðslu og starvsfólki partabrøv, ella rætt at keypa partabrøv, er viðkvæmt evni, og tað kann vekja áhuga hjá almenninginum og elva til ósemju. Tí er tað góður siður, at seljari, áðrenn hann gevur tilboðið, kunnger alment, hvørjir partar av leiðsluni og starvsfólkunum hava rætt til hvørjar tilstuðlanir, millum annað partabrøv (upphædd, virði, prísur ella onnur tilstuðlan). At veita slíkar møguleikar kann minka um mótstøðuna millum starvsfólk móti einskiljingini. Ein illa umhugsað ætlan fyri, hvussu tillutanin fer fram, t.d. um hildið verður, at hon gevur leiðsluni, ið situr, framíhjárættindi, kann hava júst øvuta úrslitið.

Opinleiki (herímillum almannakunngerð) er ein týdningarmikil liður, skal almenningurin hava álit á tilgongdini.

## 8.6 Viðgerð av boðum uppá fyritøkuna

### Um at tryggja øllum bjóðarum javnbjóðis upplýsingar

LR 16: Um seljari ikki tryggjar øllum bjóðarum nóg góðar upplýsingar javnbjóðis, er vandi fyri, at bjóðarar taka seg aftur, lækka boðið nógv ella lækka boðið seinni í sølutilgongdini. Tað kann henda, um t.d. upplýsingar, sum seinni eru latnar teimum, fær teir at lækka sína virðismeting av fyritøkuni. Um keypari ikki verður varugur við hesar upplýsingar fyrrenn eftir søluna, kann tað hava við sær, at endurgjaldskrav verður reist.

### Um at viðgera boð uppá fyritøkuna

LR 17: Um seljari ikki hevur reglur fyri, hvussu innkomnu tilboðini skulu verða viðgjørd, er vandi fyri, at úrslitið av søluni ikki verður tað best møguliga. Tað kann vera trupult at staðfesta nøktandi reglur, serliga um endamálini við søluni eru í andsøgn við hvørt annað, og um nøkur teirra eru kvalitativ, t.d. at geva kensluna av, at sølan er væleydnað.

Verða boðini ikki javnbjóðis viðgjørd, verður trupult hjá seljara at vísa á, í hvønn mun søluavtalan leyk sølutreytirnar, og vandi er fyri, at seljari verður ákærdur fyri at hava borið seg óreiðiliga at.

### Um at taka ein bjóðara fram um aðrar

LR 19: Seljari eigur at kunna vísa á, at bjóðari, sum varð tikin burturúr, var bjóðarin, sum best leyk søluendamálini; og sum fór at verða góðtikin av øllum luttakarum, sum høvdu áhuga í einskiljingini. Talan skal eisini vera um ein bjóðara, sum ikki fór at taka boðið aftur ella at royna at minka munandi um boðið í teimum endaligu samráðingunum.

### Um at fyribyrgja, at bjóðari ger sær dælt av serstøðu síni

LR 20: Ein útvaldur bjóðari tingast vanliga einsamallur við seljaran, og um seljarin ikki hugsar seg væl um í hesum liði í einskiljingartilgongdini, kann útvaldi bjóðarin trýsta sølu-prísin niður ella krevja aðrar veitingar, t.d. endurgjøld. Seljarin skal tí seta í verk trygdaratgerðir fyri at minka um henda váða, við t.d.:

- at hava ásett ein minstiprís, sum byggir á eina djúptøkna meting av fyritøkuni (sí leið-reglu 9);
- at upplýsingar, sum kunnu fáa bjóðara at lækka sína meting av virðinum á fyritøkuni, sum verður seld, verða almannakunngjørdar so tíðliga, sum til ber;
- at tiltøk verða sett í verk, sum tryggja, at spenningurin í samráðingunum við útvalda bjóðaran verður varðveittur, soleiðis at ein avtala verður gjørd skjótast gjørligt, sum eisini samstundis gevur eitt nøktandi úrslit;
- at dyrnar ikki verða latnar aftur fyri øðrum bjóðarum, soleiðis at teir kunnu verða bodnir aftur til samráðingarborðið, um útvaldi bjóðarin roynir at vinna sær ov stórar fyrimunir.

## 8.7 Søla av partabrøvum

### Um at nýta søluháttin hópeinskiljing

LR 24: Aðalmálið við hópeinskiljingum er sum skjótast at spjaða partabrøvini í almennum fyritøkum, sum verða seldar, til almenningin sum stakar íleggjarar. Hópeinskiljing verður nýtt

í londum, har almenningurin hevur lítlar ella ongar royndir sum íleggjarar. Fyri at stuðla almenninginum at gerast íleggjarar krevst, at seljari og ráðgevar hansara læra almenningin um einskiljingartilgongdina, um hvussu stóran týdning tað hevur at eiga partabrøv, um rættindini hjá partaeigarum, og um hvørji partabrøv verða seld o.s.fr.

**Um at leggja væl umhugsaða søluætlan**

LR 30: Fyrsta stigið í væl eydnaðari partabrævaútgávu er ein væl umhugsað søluætlan. Næsta stigið er at seta søluætlanina í verk við at handfara søluna skjótt og væl. Hvussu tað verður framt í verki, er treytað av, um staturin vil hava mest møguligt burtur úr søluni í krónum og oyrum, ella um staturin vil spjaða ognarrættin, ella at selja innan fyri ávísa tíðarfreist o.s.fr.

Í summum førum er fyrimunur við at selja partabrøvini í fleiri umførum, t.d. tá ið óvissa er um, hvussu marknaðurin metir virðið á fyritøkuni. Eftir fyrsta søluumfar er seljari betur førur fyri at áseta neyvan prís á partabrøvini í næsta søluumfari.

**Um at meta um, hvørt partabrøv eisini skulu seljast útlendingum**

LR 33: Hvussu væleydnað partabrævaútgávan er, er m.a. tengt at, hvussu væl tað eydnaðist seljara at finna og stuðla áhugan at keypa millum teir best skikkaðu íleggjararnar. Íleggjarar kunnu vera bæði einstaklingar og íløgufeløg, bæði innan- og uttanlands. Tað hevur týdning at skilja teir partar av innlendis og útlendis marknaðinum burturúr, sum munnu hava størsta áhugan í partabrævaútgávuni. Um seljari megnar at skapa kapping millum hesar partar, kann hann ivaleyst selja partabrøvini fyri ein góðan prís. Best er, um hann finnur íleggjarar, ið ætla at eiga partabrøvini leingi, og um eigaraskarin er stórur.

Tess meira spjaddur ognarrætturin til partabrøvini er, tess størri undirtøku fær einskiljingin millum fólk.

Seljari eigur at meta um, hvørt kapitalmarknaðurin í landinum er førur fyri at taka ímóti allari partabrævaútgávuni. Um ikki, verður seljari noyddur at selja í øllum førum ein part av útgávuni á altjóða marknaði.

**Um at meta um eftirspurningin eftir partabrøvunum**

LR 35: Tá ið óvissur eru á marknaðinum, og tá ið tørvur er á at tryggja eina væleydnaða sølu, hóast tíðarætlanin er krevjandi, er vandi fyri, at prísurin á partabrøvunum verður settur ov lágt. Tað hevur við sær, at eftirspurningurin verður størri enn útboðið, og tað merkir, at íleggjarar verða vónsviknir, og at seljarin missir sølupening.

Seljarin eigur at meta neyvt um, hvør tann sannlíki eftirspurningurin er eftir partabrøvunum, sum verða seld. T.d. við at hann spyr stovnsligar íleggjarar (pensiónsgrunnar o.o.), hvussu nógv partabrøv teir hava hug at keypa, til ymiskar prísir. Tá ið óvissar umstøður gera um seg, er skynsamt, at seljari selur partabrøvini í fleiri umførum.

**Um at tilluta keyparum partabrøv**

LR 36: Seljarin má framman undan sølu kunngera tillutanarreglurnar, fyri at tryggja, at íleggjarar skilja, á hvørjum grundarlagi partabrøvini verða latin.

Verður tillutanin av partabrøvum ikki umsitin væl, og halda íleggjarar, at tillutanin ikki er rættvís, er vandi fyri, at trúvirðið hjá seljara verður skatt, og at aðrar partabrævasølur seinni fara at kenna sviðan av tí.

# Fylgiskjal 1: Leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins (Føroyar)

**Inngangur**

Føroya Landsstýri ynskir at fara undir varliga og gjøgnumskygda einskiljing av fyritøkum landsins, sum virka í kappingarkendum vinnugreinum.

Landsstýrið vil virka fyri breiðari politiskari semju í einskiljingarmálum, og verður ætlan um einskiljing av fyritøku, sum landskassin eigur, í hvørjum einstakum føri løgd fyri Løgtingið til viðgerðar.

Landsstýrið hevur tí á landsstýrisfundi tann 12. februar 2004 gjørt av at fyrireika og skipa einskiljingar eftir hesum leiðreglum:

**§ 1. Endamál**

Endamálið at einskilja fyritøkur landsins er:

- at skipa greitt mark millm almenna og einskilda geiran
- at verja virði skattgjaldarans, sum liggja bundin í fyritøkum landsins
- at minka um skuld landskassans
- at bøta um møguleikar hjá fyritøkum, sum í dag eru í almennari ogn
- at virka fyri virðisskapan
- at víðka skaran av partaeigarum í vinnuligum fyritøkum og
- at styrkja føroyska kapitalmarknaðin, soleiðis at íløgutørvur hjá langfreistaðari uppsparing finnur vegin fram til mótsvarandi fíggingartørv

**§ 2. Politisk samskipan**

Einskiljingarmál verða samskipaði av politiskum bólki, mannaður av løgmanni og landsstýrismonnunum í ávikavist fíggjarmálum og vinnumálum.

Avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni samsvarandi Løgtingsins vilja.

**§ 3. Fyrisitingarlig samskipan**

Undir politiska samskipanarbólkinum starvar embætisnevnd (Einskiljingarnevndin).

Einskiljingarnevndin er mannað við umboðum, vald av løgmanni og nevndu landsstýrismonnum. Í serstøkum einskiljingarmálum kann nevndin víðkast við umboði, valt av viðkomandi landsstýrismanni.

Einskiljingarnevndin ger uppskot til yvirskipaðar mannagongdir viðvíkjandi einskiljingum, eitt nú tá fyritøka verður umskipað til partafelag, tá umskipan av kapitalviðurskiftum fer fram, og tá ið ræður um mál viðvíkjandi rættindum hjá starvsfólki.

**§ 4. Greining**

Áður enn landsstýrismaður fer undir at gera uppskot um broyting av løgfrøðiligum skapi á almennari fyritøku ella at gera uppskot um at selja hana heilt ella lutvíst, skal nágreinilig lýsing av rakstri og rakstrarumhvørvi hjá fyritøkuni fáast til vega. Mett verður um avleiðingar, ið einskiljing ella broytt løgfrøðiligt skap hevur á hesi viðurskifti.

Lýsingin av fyritøkuni skal somuleiðis fevna um marknaðarliga virðismeting, ið er grundað á nútíðarvirðið av framtíðar peningastreymi, fyritøkan kann skapa eigarum sínum.

Aðrir virðismetingarhættir verða eisini at nýta til samanberingar.

**§ 5. Kunngerð**

Fyri at tryggja øllum pørtum javngóðan møguleika at vísa áhuga og at leggja fram boð, verður ítøkilig ætlan um sølu av landsfyritøku kunngjørd alment.

**§ 6. Søluháttur**

Avvarðandi landsstýrismaður fær tilmæli frá einskiljingarnevndini um søluhættir, eitt nú um søla skal fremjast við almennum útboði, ella um tiltøk skulu setast í verk fyri at finna strategiskar íleggjarar. Landsstýrismaðurin ger við støði í hesum tilmælum uppskot um søluhátt at leggja fyri Løgtingið.

**§ 7. Søla við almennum partabrævaútboði**

Í førum, har almenn fyritøka heilt ella partvíst verður seld í almennum partabrævaútboði, skal sami prísur setast á øll partabrøv til sølu. Prísurin verður ásettur við støði í virðismetingum, nevndar í § 4.

Vísir eftirspurningur seg at vera størri enn útboð, verða partabrøv seld eftir teirri tíðarraðfesting, keypsboð eru framkomin og skrásett eftir, tó undantikið í førum, sum nevnd eru í § 10.

**§ 8. Søla til strategiskar íleggjarar o.t.**

Í førum, har ætlanin er at selja uttan alment partabrævaútboð, verður útbjóðingarumfar fyrireikað og framt. Endamálið við útbjóðingini er at tryggja sum mest av tilboðum frá íleggjarum við nøktandi eginleikum, ið skulu til fyri at tryggja framhald og menning av fyritøkuni, ætlanin er at einskilja. Í útbjóðingartilfarinum verða tí krøv sett íleggjarum, eitt nú viðvíkjandi kapitalgrundarlagi, royndum og førleika.

Innkomin tilboð verða mett eftir reiðupeningsvirði. Um tilboðsveitari ynskir at gjalda við øðrum virðum enn reiðupeningi, verður serstøk meting gjørd av vága og vinningskravi, ið eru tengd at gjaldmiðli.

Tikið verður av keypstilboði, ið tryggjar bestu gjalding og hægsta prís í reiðupeningi, tó undantikið í førum, sum nevnd eru í § 10. Ónøktandi tilboð verða afturvíst.

**§ 9. Ráðgeving og virðisbrævahandil**

Óheftar virðismetingar og aðrar tænastur viðvíkjandi §§ 4, 6, 7, 8 og 10 kunnu útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum og øðrum fyritøkum við hóskandi fakligum førleika.

Einskiljingarnevndin fyrireikar útbjóðing viðvíkjandi slíkum uppgávum. Nevndin ger tilmæli til viðkomandi landsstýrismann um val av tænastuveitara. Tilmæli verða grundað á innkomin tilboð, har greiða er á vavi av tænastum, prísi og treytum annars.

**§ 10. Søluavmarkingar**

Har viðurskiftini tala fyri tí, ger avvarðandi landsstýrismaður uppskot at leggja fyri Løgtingið um hámark fyri sølu av partabrøvum til einstakan part ella fíggjarliga samantengdar partar. Hetta verður gjørt við støði í greiningum sambært § 4. Atlit skulu í slíkum førum takast til endamálið at einskilja fyritøkur landsins, sum nevnt er í § 1. Somuleiðis skulu atlit takast, ið tryggja nøktandi kapping á teimum marknaðum, fyritøkan virkar á.

Útlendingar eiga rætt at ogna sær partabrøv í tann mun, serstøk føroysk lóggáva ikki avmarkar hesum.

**§ 11. Upplýsingar**

Landsstýrismaður skal, skjótast til ber, kunna almenningin um gongd og støðu í einskiljingarmálum, hann varðar av.

**§ 12. Frávik**

Um landsstýrismaður ætlar at gera frávik frá mannagongdum v.m., sum omanfyri eru lýstar, skal hann fáa til vega ummæli av ætlan síni frá einskiljingarnevndini. Ætlan um frávik og ummæli frá nevndini verða løgd fyri landsstýrisfund til viðgerðar.

# Fylgiskjal 2: Reglur fyri mannagongdir í sambandi við útboð og sølu av almennum fyritøkum (Ísland)

**Inngangur**

Einskiljing fevnir um sølu av partabrøvum, ið tað almenna eigur, og útboð av almennum rakstri.

Við tí fyri eyga at samskipa arbeiðshættir og tryggja fakliga haldgóða fyrireiking á hesum øki, samtykti íslendska stjórnin 9. februar 1996 reglur fyri mannagongdir í sambandi við einskiljing.

Reglurnar tryggja javna atgongd, og samstundis øllum borgarum í landinum høvi at ognast part í fyritøkum og á jøvnum føti at vera við í útboðum hjá tí almenna. Somuleiðis skulu reglurnar beina burtur tann iva, sum higartil hevur staðist av ójavnari framferð í sambandi við sølu av ognarpørtum í almennum fyritøkum og almenn útboð.

Hesar eru leikreglurnar, sum galda. Eingin kann, vegna peningaogn ella á annan hátt, taka lut í keypi av almennum parti í fyritøku ella í útboðum eftir øðrum reglum enn hesum. Hesar reglur fyri mannagongdir eru tískil ein ósvitaligur bati.

At hava eina fyrisitingarnevnd at skipa fyri einskiljing hevur roynst ógvuliga væl. Tað er sølan fyri stuttum av P/f Heilivágssølu landsins eitt gott dømi um. Bæði almenningurin og starvsfólkið hjá Heilivágssølu landsins tóku væl undir við søluni, og henda undirtøka vísir, at her var eitt stórt og rætt stig tikið fram ímóti javnrætti, tá ið um sølu av almennum fyritøkum ræður. Reglurnar niðanfyri staðfesta hetta.

## EINSKILJINGARNEVNDIN

### 1. Meginumsiting av einskiljing

Fyri einskiljingini standa stjórnin og ein ráðharranevnd við fýra limum, sum stjórnin skipar. Í ráðharranevndini sita forsætisráðharrin, uttanríkisráðharrin, fíggjarmálaráðharrin og vinnu- og handilsmálaráðharrin. Ráðharranevndin setur eina fyrisitingarnevnd (einskiljingarnevndina), sum skal fyrireika og samskipa arbeiðið við einskiljingum. Nevndin skal hava yvirumsjón við allari umskipan av almennum fyritøkum til partafeløg, sølu av almennum fyritøkum, almennum ognum, sølu av almennari partsogn í øðrum fyritøkum og somuleiðis útbjóðing av arbeiði og tænastu vegna tað almenna ella almennar stovnar. Í fyrisitingarnevndini sita umboð fyri frammanfyrinevndu ráðharrar. Tá ið einstakar einskiljingar koma til viðgerðar, kemur umboð fyri avvarðandi ráð í nevndina. 2-3 starvsfólk hjá fíggjarmálaráðnum arbeiða saman við fyrisitingarnevndini.

### 2. Samskipan

Einskiljingarnevndin skal í sambandi við einskiljing bera so í bandi, at rættindi hjá starvsfólki eru tey somu, tá ið almennar fyritøkur verða umskipaðar til partafelag ella verða seldar.

### 3. Útgreiðing

Áðrenn viðkomandi ráð ger av formliga at broyta ella at selja eina fyritøku, skal ein útgreiðing gerast av rakstrinum av fyritøkuni og rakstrarumhvørvinum hjá henni, og hvørja ávirkan einskiljing fer at hava á hesi viðurskifti. Einskiljingarnevndin biður um slíka útgreiðing . Marknaðarvirðið hjá fyritøkuni skal metast í útgreiðingini. Tá ið marknaðarvirðið verður mett, skal ætlað inntøkustroymi í framtíðini umroknast til núvirði. Aðrir virðismetingarhættir skulu eisini nýtast til samanburðar. Útgreiðingin skal tryggja, at haldgóðar upplýsingar eru tøkar um støðuna hjá einari fyritøku, áðrenn avgerð verður tikin um sølu.

**4. Lýsingar**

Fyritøkur, sum í umbúna er at selja, skulu altíð lýsast alment til sølu, soleiðis at øll áhugað fáa sama møguleika at bjóða upp á tær.

**5. Søluháttur**

Eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini ger viðkomandi ráð í hvørjum føri av, hvussu ein almenn fyritøka skal seljast, t.e. annaðhvørt fyritøkan skal seljast við almennum partabrævaútboði, ella biðjast skal um tilboð upp á fyritøkuna.

**6. Søla**

Tá ið ein almenn fyritøka verður seld eftir tilboði, skal tilboðið metast í reiðupeningsvirði í mun til rentuvinningskravið, tá ið tað almenna seinast bjóðaði lánsbrøv út. Trygd, sum tilboðsgevin veitir fyri gjaldið, skal metast sær. Takast skal av tí tilboðnum, sum veitir bestu trygd fyri gjaldi og hevur hægsta reiðupeningsvirði, smbr. tó 8. grein. Øll tilboð skulu vrakast, um tey verða mett at vera óhaldgóð. Tá ið ein almenn fyritøka verður seld við almennum partabrævaútboði, skal kursurin á hvørjum partabrævi vera fastásettur. Um eftirspurningurin verður størri enn útboðið, skulu partabrøvini verða seld í teirri tíðarrøð, sum staðfestar umbønir um keyp komu inn, smbr. tó 8. grein.

**7. Virðisbrævafyritøkur**

Útgreiðingar av fyritøkum, smbr. 3. grein um ráðgeving og umsjón við sølu, smbr. 5. og 6. grein, skulu latast løggildum virðisbrævafyritøkum í hendur og teimum ráðgevum, sum tær boðsenda. Viðkomandi ráðharrastova velur eina virðisbrævafyritøku eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini, tá ið nevndin hevur skipað fyri útboðsumfari, har tænasta og prísur eru tilskilað.

**8. Avmarkingar av sølu til einstakar keyparar**

Hámark kann setast fyri, hvussu stóran part av partapeninginum, ið hvør keypari, ella honum fíggjarliga nærbundnir partar, kunnu keypa í fyritøkum, ið verða seldar við almennum partabrævaútboði. Eitt tilboð frá einum keypara kann havnast, um líkindi eru til, at søla til viðkomandi hevur við sær, at munagóð kapping minkar á tí marknaði, sum fyritøkan virkar á, og somuleiðis um sølan er ósambærilig við sett stevnumið, og vandi tykist fyri, at hon kann skaða viðkomandi vinnugrein.

**9. Serrættindi hjá ríkisfyritøkum**

Øll lógarásett serrættindi hjá einari fyritøku skulu takast av, áðrenn hon verður seld. Eingir sáttmálar, sum skila einari fyritøku serrætt til at veita almennum stovnum tænastur, skulu fylgja við í søluni. Á sama hátt skulu allar skyldur, sum einari fyritøku eru álagdar at veita tænastur fyri undir marknaðarprís ella viðurgjaldsleyst, takast av. Kappingarráðið og kappingarstovan hava eftirlit við einskildum fyritøkum sambært kappingarlógini.

**10. Undantøk**

Viðkomandi ráðharrastova kann eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini gera undantøk frá frammanfyri nevndu reglum, um serligar umstøður gera seg galdandi. Øll slík undantøk skulu leggjast fram á stjórnarfundi, áðrenn tey verða sett í verk, og somuleiðis alment, tá ið viðgerðin í stjórnini er liðug.

**11. Upplýsingar**

Viðkomandi ráðharrastova skal so skjótt, sum til ber lata fjølmiðlum og øðrum áhugaðum upplýsingar um støðuna í einskiljingarmálum á sínum málsøki. Einskiljingarnevndin skal taka sær av almennari kunning um einskiljingarpolitikkin hjá stjórnini. Einskiljingarnevndin skal lata úr hondum eina ársfrágreiðing um einskiljing, har greitt verður frá, hvørjar fyritøkur tað almenna hevur selt, og hvussu sølan fór fram. Ætlanir um umskipan av almennum fyritøkum til partafeløg skulu eisini viðgerast í frágreiðingini, smbr. 2. og 3. grein.

**12. Gildisøki**

Hesar reglur koma í staðin fyri samnevndar reglur frá 12. oktober 1993 og fevna um allar fyritøkur, sum tað almenna ætlar at selja partvíst ella heilt. Reglurnar fevna eisini um ognarlutir í fyritøkum, sum tað almenna selur ella ætlar at selja. Viðkomandi ráðharrastova og einskiljingarnevndin svara fyri, at hesar reglur fyri mannagongdir verða hildnar.

Í samgonguskjalinum, sum stjórnin hjá Sjálvstøðisflokkinum og Framsóknarflokkinum byggir á, stendur m.a.: arbeiðast skal fyri endurskipan av almennum virksemi, eitt nú við at økja um útbjóðing, við samanlegging av stovnum, tænastusáttmálum, broyttari lønarskipan og størri leiðaraábyrgd. Miðast skal ímóti meiri gagnsemi í almennum virksemi. Arbeiðast skal fram ímóti at einfalda allan almennan rakstur og gera hann miðvísari. Støðumunur skal javnast á økjum, har tað almenna fæst við vinnuvirksemi í kapping við privatar fyritøkur. Lønsemiskrøv skulu setast almennum fyritøkum.

Leggjast skal fram ein ætlan fyri tær einskiljingar, sum arbeitt verður við at fremja í valskeiðnum. Áherðsla verður løgd á at broyta rakstrarskipanina hjá bankum og íløgugrunnum, sum tað almenna eigur. Sama er galdandi fyri fyritøkur og stovnar hjá tí almenna, sum eru í kapping við privat virksemi. Í valskeiðinum skal arbeiðið við at selja almennar fyritøkur fara fram sambært samtyktum Altingsins.

Einskiljingarnevndin
Mai 1996

Týtt úr íslendskum og enskum hava:

Carl Johan Jensen, Sprotin
Brynleif Poulsen, Landsgrannskoðanin

# Fylgiskjal 3: Samanbering av einskiljingarleiðreglum

| Føroyar | Ísland | Evni: | Føroysku leiðreglurnar | Íslendsku leiðreglurnar |
|---|---|---|---|---|
| § 1 | - | Endamál (við einskiljing) | Endamálið við einskiljingini er greinað. | Ein tílík áseting er ikki í íslendsku leiðreglunum. |
| § 2 | § 1 | Politisk samskipan | Politiskur bólkur við 3 limum (løgmaður, landsstýrismenn í fíggjarmálum og vinnumálum) hevur politisku samskipanina.<br>Avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni samsvarandi Løgtingsins vilja. (helst fyrisitingarlig samskipan). | Ráðharranevnd við 4 limum (forsætismálaráðharri, uttanríkismálaráðharri, fíggjarmálaráðharri og vinnumálaráðharri) stendur fyri einskiljingini. Ráðharranevndin setur einskiljingarnevnd at fyrireika og samskipa arbeiðið við einskiljingum. |
| § 3 | § 1 | Fyrisitingarlig samskipan | Embætisnevnd (einskiljingarnevndin) við umboðum valdum av politiska bólkinum. Nevndin kann verða víðkað.<br>Ongar ásetingar eru um fyrisitingarliga samskipan í § 3. Helst fevnir ásetingin í § 2 "avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av..." um fyrisitingarliga samskipan.<br>Einskiljingarnevndin ger uppskot til yvirskipaðar mannagongdir viðvíkjandi einskiljingum, t.d. viðvíkjandi rættindinum hjá starvsfólki, tá fyritøka verður umskipað ella seld. | Einskiljingarnevnd, vald av nevndu 4 ráðharrum, arbeiðir saman við 3 embætismonnum frá fíggjarmálaráðnum.<br>Avvarðandi ráð er umboðað í nevndini frá máli til mál. Nevndin hevur umsjón við sølu av almennum ognum, umskipan av fyritøkum til partafelag o.s.fr.<br>Einskiljingarnevndin samskipar í spurningum um rættindi hjá starvsfólki, tá fyritøka verður umskipað ella seld. |
| § 4 | § 3 | Greiningar av fyritøku | Gongur ikki greitt fram, hvør skal útvega greiningarnar, helst landsstýrismaðurin. | Einskiljingarnevndin biður um útgreiðingar av rakstri og rakstrarumhvørvi hjá fyritøku. |
| § 5 | § 4 | Almannakunngerð av sølu | Ítøkilig ætlan um sølu av landsfyritøku kunngjørd alment, so øll hava sama møguleika at bjóða. | Fyritøkur skulu lýsast alment til sølu, so øll áhugað fáa møguleika at bjóða uppá tær. |
| § 6 | § 5 | Val av sølumannagongd | Eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini leggur avvarðandi landsstýrismaður fyri Løgtingið uppskot um søluhátt. | Eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini ger viðkomandi ráð av, hvussu ein almenn fyritøka skal seljast. |
| § 7 | § 6 | Søla við almennum partabrævaútboði | Sami prísur settur á øll partabrøv. Partabrøv verða seld eftir tíðarraðfesting, ið keypsboð eru móttikin og skrásett. | Kursurin á hvørjum partabrævi skal vera fastásettur. Partabrøvini verða seld í teirri tíðarrøð, staðfestar umbønir um keyp komu inn. |
| § 8 | § 6 | Søla til strategiskar íleggjarar | Tikið verður av tí tilboði, ið tryggjar bestu gjalding og hægsta prís í reiðupeningi. | Tikið verður av tí tilboði, sum veitir bestu trygd fyri gjaldi og hevur hægsta reiðupeningsvirði. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| § 9 | § 7 | Virðisbrævahandlarar | Óheftar virðismetingar og aðrar tænastur sambært §§ 4, 6, 7, 8 & 10 kunnu útvegast frá løggildum virðisbrævahandlarum o.ø.<br>Einskiljingarnevndin bjóðar út tænasturnar og ger tilmæli til landsstýrismannin um val av veitara. | Útgreiðingar av fyritøkum (§3), ráðgeving og umsjón við sølu (§§ 5 & 6) verða latnar løggildum virðisbrævafyritøkum í hendur og teim ráðgevum, sum tær boðsenda.<br>Ráðharrastovan velur virðisbrævafyritøku eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini, tá nevndin hevur skipað fyri útboðsumfari. |
| § 10 | § 8 | Avmarkan av sølu til einstaklingar | Landsstýrismaður leggur uppskot fyri Løgtingið um hámark fyri sølu av partabrøvum til einstakan part ella fíggjarliga samantengdar partar, fyri at spjaða eigaraskaran og fyri at tryggja nøktandi kapping. | Hámark kann verða sett fyri, hvussu stóran part av partapeninginum hvør keypari, ella honum fíggjarliga nærbundnir partar, kunnu keypa í almennum partabrævaútboði. Tilboð kann verða havna, um líkindi eru til, at søla til keypara hevur við sær, at munagóð kapping minkar á marknaði, fyritøkan virkar á. |
| § 11 | § 11 | Kunning | Landsstýrismaðurin skal kunna almenningin um gongd og støðu í einskiljingarmálum. | Viðkomandi ráðharrastova skal so skjótt til ber lata fjølmiðlum o.ø. upplýsingar um støðuna í einskiljingarmálum á sínum málsøki. Einskiljingarnevndin skal taka sær av almennari kunnan um einskiljingarpolitikkin hjá stjórnini. Einskiljingarnevndin letur úr hondum ársfrágreiðing um einskiljing. Ætlanir um umskipan av almennum fyritøkum til partafeløg verða eisini umrøddar. |
| § 12 | § 10 | Frávik | Landsstýrismaður skal hava ummæli frá einskiljingarnevndini um ætlan at víkja frá leiðreglunum. Ætlan um frávik og ummæli frá nevndini verða løgd fyri landsstýrisfund at viðgera. | Eftir tilmæli frá einskiljingarnevndini kann viðkomandi ráðharrastova gera undantøk frá hesum leiðreglum. Undantøk verða løgd fram á stjórnarfundi, áðrenn tey verða sett í verk, og alment, tá viðgerðin í stjórnini er liðug. |
| - | § 9 | Serrættindi og skyldur hjá almennum fyritøkum | Ein tílík áseting er ikki í føroysku leiðreglunum. | Øll lógarásett serrættindi og skyldur verða tikin av, áðrenn fyritøka verður seld. Kappingarráð o.o. hava eftirlit við einskildum fyritøkum sambært kappingarlógini. |
| - | § 12 | Gildiskoma | Ein tílík áseting er ikki í føroysku leiðreglunum. | Viðkomandi ráðharrastova og einskiljingarnevndin svara fyri, at leiðreglurnar verða hildnar. Leiðreglurnar fevna um allar fyritøkur og/ella partabrøv, sum tað almenna ætlar at selja heilt ella lutvíst. |

# Fylgiskjal 4: Samskiftið um Føroyagrunnin o.a.

Í skrivi 29. september 2005 mælti Landsgrannskoðanin Fíggjarmálaráðnum til at kanna gjøllari, hvør er "ultimativi" eigarin av Føroyagrunninum og Framtaksgrunninum, eftirsum grunnarnir eru stovnaðir við almennum pengum. Hóast grunnarnir í dag eru skrásettir sambært lógini um vinnurekandi grunnar, er kanska ivasamt, um teir eru "veruligir" sjálvsognarstovnar.

Vit vístu til nøkur sjónarmið, sum verða førd fram um munin ímillum (privatar) "ægte" sjálvsognarstovnar, og sjálvsognarstovnar "inden for den statslige forvaltning", sum verða førd fram í hægstarættardóminum um Københavns Havn A/S 23. august 2004. Í dóminum verður m.a. víst til notat frá "Justitsministeriet" um "Københavns Havns retlige stilling". Dómurin staðfestir, at staturin hevur ultimativa ognarrættin til "sjálvsognarstovnin" Københavns Havn, og tí kundi Fólkatingið við lóg umskipa grunnin til partafelag, ið staturin átti, uttan at tað var at meta sum ognartøka, hóast eitt av endamálunum hjá Fólkatinginum við umskipanini var at fáa pening í statskassan.

Í svarskrivi sínum 15. desember 2005 heldur Fíggjarmálaráðið, at umrøddi hægstarættardómur um Københavns Havn ikki kann verða nýttur sum samanberingargrundarlag, tá tað snýr seg um Føroyagrunnin. Víst verður m.a. á, at Føroyagrunnurin er ikki stovnssettur við lóg, men við viðtøkum, og at endamálið hevur ongantíð verið at røkja eina "samfelagsuppgávu". Víst verður eisini á, at Føroyagrunnurin er fevndur av lógini um vinnurekandi grunnar, tað var Københavns Havn ikki. Viðvíkjandi Framtaksgrunninum verður víst til Vinnumálaráðið.

Landsgrannskoðanin er samd við Fíggjarmálaráðnum í, at sera stórur munur er á grunnunum báðum. Landsgrannskoðanin veit eisini fullvæl, at semja er ikki um rættleikan í notatinum frá Justitsministeriet. Hetta kemur m.a. fram í greinini, sum F. Reidar Jørgensen skrivaði í Juristen 2/2005, og sum Fíggjarmálaráðið eisini vísir til. Her verður eisini funnist at Hægstarætti fyri vantandi positiv argument fyri, at talan er um ein grunn, sum staturin eigur. Í fleiri førum verður í grundgevingunum í dóminum lagdur dentur á, hvat Københavns Havn <u>ikki</u> var:

> *"Havnen – der ikke var oprettet på grundlag af testamente eller anden privatretlig disposition – kan imidlertid efter det foran anførte ikke anses at have haft karakter af en privat ("ægte") selvejende institution, men må karakteriseres som en selvejende institution inden for den statslige forvaltning."*
>
> *"1913-loven og forarbejderne til denne lov giver således ikke grundlag for at fastslå, at det har været hensigten at anerkende Københavns Havn som en privat ("ægte") selvejende institution."*

F. Reidar Jørgensen vísir í hesum sambandi m.a. á, at *"Højesterets alternativer er, at enten er havnen en "ægte" selvejende institution (af privat karakter), eller også er den en sådan inden for den statslige forvaltning. Det oplagte alternativ, nemlig at havnen historisk bedømt var "kommunal" (i den ovenfor angivne betydning), synes ikke at have været i tankerne."*

Samsvarandi ivaspurningar um søguliga ognarrættin til Københavns Havn eru ikki til staðar, tá talan er um søguliga ognarrættin til Føroyagrunnin. Í viðtøkunum frá fyrst í 1971 stóð m.a., at verður grunnurin tikin av, fellur nettoognin til landskassan.

<u>Leikluturin hjá Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen</u>

Í svarskrivi sínum vísir landsstýrismaðurin fleiri ferðir til leiklutin hjá Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, í sambandi við at Føroyagrunnurin varð skrásettur sum vinnurekandi grunnur. Landsgrannskoðanin hevur ikki somu fatan av hesum leikluti. Vit hava gjøgnumgingið brævaskiftið við Skráseting Føroya, og niðanfyri hava vit roynt at greiða frá okkara fatan av málsgongdini.

19. august 1997 fekk Skráseting Føroya eitt fráboðanarskjal frá Føroyagrunninum við umbøn um at skráseta Føroyagrunnin sum vinnurekandi grunn. Hjálagt umbønini vóru viðtøkurnar frá 10. juni 1997. Skráseting Føroya sendi umbønina til viðgerðar í Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, sum síðani bað um fleiri upplýsingar í málinum.

Eftir nakað av samskifti um málið staðfesti Erhvervs- og Selskabsstyrelsen í skrivi 10. februar 1999 til Skráseting Føroya, at Føroyagrunnurin var vinnurekandi sambært § 1, stk. 2, nr. 3, í anordning nr. 247 fra 3. maj 1993 "om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde". Í § 1, stk. 2, nr. 3, stendur, at ein grunnur verður roknaður sum vinnurekandi, um so er, at grunnurin m.a. *"har den i aktieselskabsloven § 2, stk. 2, jf. stk. 4 og 5 anførte forbindelse med et aktieselskab eller anpartsselskab...."*, ella við øðrum orðum, um talan er um eitt móðurfelag. Sostatt helt Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, at virksemið hjá Føroyagrunninum var vinnuligt.

Í sama skrivi metti Erhvervs- og Selskabsstyrelsen eisini um, hvørt Føroyagrunnurin kundi roknast sum ein grunnur. Víst verður á, at í lógini er eingin allýsing av "fondsbegrebet". Ført verður fram, at tað, sum eyðkennir ein grunn, er m.a., at:

1. "Institutionen skal have en formue, som er uigenkaldeligt udskilt fra stifter og bidragsyders formue.
2. Institutionen skal have et formål.
3. Institutionen skal have en bestyrelse, der er selvstændig i forhold til stifter."

Í skrivinum 10. februar 1999 vísir Erhvervs- og Selskabsstyrelsen síðani á, at fleiri greinar í viðtøkunum frá 10. juni 1997 ikki sampakka við umrøddu allýsing av einum grunni. Umframt § 2 um stovnsfæið er talan um.:

- (§ 6) Landsstýrið tilnevnir allar 4 stýrislimirnar.
- (§10) Verður grunnurin tikin av, fellur nettoognin til landskassan, og ger Landsstýrið soleiðis samtykt um nýtslu av ognini.
- (§11) Broytingar í viðtøkunum og avtøka av grunninum kunnu bert fara fram við samtykki frá Landsstýrinum.

Í skrivinum viðger Erhvervs- og Selskabsstyrelsen síðani greinarnar og greiðir gjøllari frá, hvørjar orðingar forða fyri, at talan kann vera um ein veruligan grunn/sjálvsognarstovn, sum kann verða skrásettur sambært lógini um vinnurekandi grunnar. T.d. stendur um § 10:

> *"Af bestemmelsen fremgår, at hvis fonden afvikles, tilfalder nettoaktiverne landskassen, og landsstyret bestemmer således vedrørende benyttelsen af aktiverne.*
>
> *Som det fremgår af ovenstående karakteristika for en fond, er det et fondsretligt grundprincip, at fondens formue skal være uigenkaldeligt adskilt fra stifters/bidragsyders formue. Formuen kan derfor aldrig gå tilbage til stifter i tilfælde af opløsning af fonden. Dette gælder uanset hvem, der har indbetalt formuen.*
>
> *Princippet om at fondens formue skal være uigenkaldeligt adskilt fra stifters/bidragsyders formue, vil efter styrelsens opfattelse endvidere have væsentlig indflydelse på, hvorvidt der foreligger et selvstændigt retssubjekt."*

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at skrivið frá Erhvervs- og Selskabsstyrelsen má skiljast soleiðis, at virksemið hjá Føroyagrunninum er at rokna sum vinnuligt, men hildið verður ikki, at Føroyagrunnurin lýkur grundleggjandi treytirnar fyri at verða skrásettur sum ein veruligur grunnur, vegna tætta tilnýtið til Landsstýrið (landskassan), og tessvegna mátti Skráseting Føroya havna umbønini frá grunninum 18. august 1997 um at verða skrásettur sambært lógini um vinnurekandi grunnar.

Umleið eitt ár seinni, 11. februar 2000, fekk Skráseting Føroya eitt nýtt fráboðanarskjal frá Føroyagrunninum við umbøn um at verða skrásettur sum vinnurekandi grunnur. Hjálagt umbønini vóru nýggjar viðtøkur frá 11. februar 2000, har fyrr umrøddu greinar nú vóru broyttar:

*(§ 6) Landsstýrið tilnevnir 3 av teimum 4 stýrislimunum.*

*(§10) Verður grunnurin tikin av, verður nettoognin nýtt samsvarandi avgerð frá stýrinum og tess innstilling til grunsmyndugleikan, soleiðis at ognin í størst møguligan mun verður nýtt í samsvari við endamál grunsins.*

*(§11) Broytingar í viðtøkunum kunnu bert fara fram við loyvi frá grunsmyndugleikanum eftir innstilling frá stýrinum og við samtykki frá danska løgmálaráðnum. Verður grunnurin avtikin, krevst somuleiðis innstilling Landsstýrisins.*

17. februar 2000 boðaði Skráseting Føroya frá, at Føroyagrunnurin var fyribilsskrásettur, hóast einki var ásett um grunsfæ í viðtøkunum. Grunnurin fekk eina freist til 1. juli 2000 at fáa formligu viðurskiftini viðvíkjandi grunsfænum í rættlag.

20. september 2001 fekk Skráseting Føroya eina váttan um, at stovnsfæið var 20 mió.kr., sum eisini ásett í broyttu viðtøkunum frá 9. februar 2001, og 26. september 2001 varð grunnurin endaliga skrásettur sum vinnurekandi grunnur.

Í skrivi í september 2005 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvønn týdning hann helt tað hava, at ásetingin í § 10 í viðtøkunum, at *"verður grunnurin tikin av, fellur nettoognin til landskassan"* varð strikað. Eisini spurdu vit, hví landsstýrismaðurin hevði góðkent hesa broyting í viðtøkunum uttan at leggja málið fyri tingið.

Orsøkin til hesar spurningar er, at um broytingin merkir, at landskassin hevur mist ultimativa ognarrættin til grunnin, er talan um eina avgerð, ið ein landsstýrismaður vanliga ikki kann taka uttan heimild frá Løgtinginum. Umskipanin av Føroyagrunninum er tá so grundleggjandi, at tann "gamli" Føroyagrunnurin má sigast at verða tikin av, og ognirnar latnar einum vinnurekandi grunni (einum veruligum sjálvsognargrunni). Sum nevnt er tað ivasamt, um landsstýrismaðurin hevði heimild at góðkenna eina tílíka umskipan av Føroyagrunninum, og tí er kanska eisini spurningurin, um ikki ber til hjá landskassanum/Løgtinginum at koma afturumaftur og gera sín ultimativa ognarrætt galdandi.

Í svarskrivi sínum 15. desember 2005 vísir landsstýrismaðurin m.a. á:

*"at broytingin í § 10 er gjørd eftir boðum frá grunsmyndugleikanum, sum hevur avgerðarrættin í slíkum málum".*

Landsgrannskoðanin heldur, at landsstýrismaðurin yvirtulkar leiklutin hjá Skráseting Føroya-/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen. Sum nevnt, hava vit gjøgnumgingið brævaskiftið við Skráseting Føroya, og vit duga ikki at síggja, at § 10 er broytt eftir boðum frá grunsmyndugleikanum. Leikluturin hjá Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen hevur verið at viðgera og taka støðu til eina ítøkiliga umbøn, fyrst frá august 1997 og síðani frá februar 2000, um at skráseta Føroyagrunnin sum ein vinnurekandi grunn.

Sum víst á frammanfyri helt Erhvervs- og Selskabsstyrelsen í skrivinum 10. februar 1999, at Føroyagrunnurin, hvørs virksemi varð roknað sum vinnurekandi, ikki leyk mest grundleggjandi treytirnar fyri at verða roknaður sum ein veruligur grunnur (sjálvsognargrunnur). Skráseting Føroya kundi tí ikki í 1999 skráseta Føroyagrunnin sum ein vinnurekandi grunn. Í februar 2000 viðgjørdi Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen eina nýggja umbøn frá Føroyagrunninum, og síðani varð grunnurin endaliga skrásettur í september 2001.

Landsstýrismaðurin vísir eisini í svarskrivi sínum á:

*"at tá Løgtingið samtykti lógina um vinnurekandi grunnar, hevur Løgtingið eisini samtykt, at Løgtingið og Landsstýrið hava mist ræðisrættin yvir teimum vinnurekandi grunnunum, sum eru fevndir av lógini. Løgtingið hevur eisini avskriva sær rættin til at taka støðu til reguleringar í viðtøkunum fyri vinnurekandi grunnar. Eftir at lógin er samtykt, er tað grunsmyndugleikin, sum setir krøv til m.a. orðingar í viðtøkunum.*

*Um landsstýrismaðurin ikki góðkendi hesa broyting, hevði hann handlað í stríð við lógaráseting-arnar, sum eru samtyktar av Føroya Løgtingi, og kundi hetta fingið avleiðingar fyri hann sambært løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins."*

Sum helst kunnugt er ikki talan um eina løgtingslóg. Løgtingið tók undir við einum ríkislógartilmæli um at seta donsku lógina um vinnurekandi grunnar í gildi, og varð tað gjørt við anordning nr. 247 frá 3. mai 1993.

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja, hvat landsstýrismaðurin meinar við í endurgivna broti. Tað tykist, sum landsstýrismaðurin er av tí fatan, at allir grunnar, sum í 1993 høvdu vinnurekandi virksemi, koma undir lógina um vinnurekandi grunnar, eisini um Landsstýrið/Løgtingið hevði ræðisrættin/ognarrættin, og at leikluturin hjá Løgtingi og Landsstýri tí varð avmarkaður til at akta kravboð frá grunsmyndugleikanum, undir hóttan av løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins.

Landsgrannskoðanin heldur, at landsstýrismaðurin yvirmetir/misskilir leiklutin hjá Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen. Sum víst á frammanfyri, kundi Skráseting Føroya ikki skráseta Føroyagrunnin í 1999, júst vísandi til at Landsstýrið/Løgtingið hevði "ræðisrættin". Talan var tessvegna ikki um ein veruligan grunn, sum kundi verða skrásettur sambært lógini um vinnurekandi grunnar.

Samanbera vit at enda umskipanina av Føroyagrunninum við málið um Københavns Havn, varð grunnurin Københavns Havn tikin av, og ognirnar vóru í 2000 latnar einum partafelag, sum staturin hevði stovnað til sama endamál. Ein tílíkur framferðarháttur, har Føroyagrunnurin í 2000 varð umskipaður til eitt alment partafelag, í staðin fyri til ein vinnurekandi grunn, hevði kanska verið tann rættara og mest nærliggjandi loysnin. Sum nevnt frammanfyri, er tað ein spurningur, um ikki ein tílík umskipan kundi komið upp á tal í dag. Tað kundi verið áhugavert at umrøtt henda spurning við Skráseting Føroya/Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, eisini vísandi til úrskurðin, ið Hægstirættur kom til í sambandi við rættarmálið um Københavns Havn.

Landsgrannskoðanin ger ikki meira við hetta mál.

**Fylgiskjal 5:**

# Leiðreglur

# at miða seg eftir,

# tá ið einskiljingar verða grannskoðaðar

”Guidelines on Best Practice for the Audit of Privatisations”
www.nao.org.uk/intosai/wgap/bestprac.htm

Týtt úr enskum hava:
Jonhard Mikkelsen, Sprotin
Brynleif Poulsen, Landsgrannskoðanin

1 INNGANGUR 59

2 ØKI 1: KRØV TIL GRANNSKOÐANARFØRLEIKA 60

2.1 HVØNN FØRLEIKA SKAL RÍKISGRANNSKOÐANIN HAVA (LEIÐREGLA 1) 60
2.2 HVUSSU SKAL RÍKISGRANNSKOÐANIN ÚTVEGA FØRLEIKAN (LEIÐREGLA 2) 61

3 ØKI 2: ALMENT UM PARTIN HJÁ RÍKISGRANNSKOÐANINI Í TILGONGDINI 62

3.1 PARTUR HJÁ RÍKISGRANNSKOÐANINI Í EINSKILJINGINI (LEIÐREGLA 3) 62
3.2 SKULU ÁHUGAÐIR KEYPARAR SLEPPA FRAM AT ARBEIÐSSKJØLUM HJÁ RÍKISGRANNSKOÐANINI (LEIÐREGLA 4) 63
3.3 AT LEGGJA RÁÐ UM EINSKILJINGARGRANNSKOÐAN (LEIÐREGLA 5) 65
3.4 AT UMSKIPA ALMENNA FYRITØKU, ÁÐRENN HON VERÐUR EINSKILD (LEIÐREGLA 6) 66
3.5 ENDAMÁL VIÐ SØLU (LEIÐREGLA 7) 67
3.6 SØLUTÍÐARÆTLAN (LEIÐREGLA 8) 69
3.7 HVUSSU FYRITØKA VERÐUR VIRÐISMETT UNDAN SØLU (LEIÐREGLA 9) 70
3.8 SØLUHÆTTIR (LEIÐREGLA 10) 71
3.9 RÆTTLÆTI SELJARA Í SAMBANDI VIÐ SØLU (LEIÐREGLA 11) 72
3.10 HVUSSU MÁL, IÐ LIGGJA EFTIR, VERÐA VIÐGJØRD (LEIÐREGLA 12) 73

4 ØKI 3: TRADE SALES (BEINLEIÐIS SØLA AV LANDSFYRITØKU TIL AÐRA FYRITØKU) 74

4.1 UTTANHÝSIS RÁÐGEVING, IÐ SELJARI HEVUR FINGIÐ SÆR (LEIÐREGLA 13) 74
4.2 LEIÐSLAN Á ALMENNU FYRITØKUNI (LEIÐREGLA 14) 75
4.3 HVUSSU ALMENN FYRITØKA VERÐUR MARKNAÐARFØRD (LEIÐREGLA 15) 76
4.4 KUNNING TIL "ÁHUGAÐAR KEYPARAR" (LEIÐREGLA 16) 77
4.5 METT VERÐUR UM TILBOÐ (LEIÐREGLA 17) 77
4.6 UM AT VELJA NAKRAR BJÓÐARAR BURTURÚR (LEIÐREGLA 18) 78
4.7 UM AT TAKA EIN BJÓÐARA FRAM UM AÐRAR (PREFERRED BIDDER) (LEIÐREGLA 19) 79
4.8 ENDALIGU SAMRÁÐINGARNAR (LEIÐREGLA 20) 80

5 ØKI 4: SØLA TIL LEIÐSLU ELLA STARVSFÓLK (MANAGEMENT BUYOUTS) 80

5.1 UM AT TRYGGJA RÆTTVÍSA KAPPING (LEIÐREGLA 21) 80
5.2 UM AT EGGJA TIL KEYP (LEIÐREGLA 22) 81
5.3 UM AT TRYGGJA BEST MØGULIGAN SØLUPRÍS (LEIÐREGLA 23) 82

6 ØKI 5: HÓPEINSKILJING/BREIÐUR KEYPARASKARI (MASS PRIVATISATIONS) 83

6.1 UM AT LÆRA ALMENNINGIN AT VERA ÍLEGGJARAR (LEIÐREGLA 24) 83
6.2 MILLUMGONGUMENN (LEIÐREGLA 25) 84

6.3 SØLUTILGONGD (LEIÐREGLA 26) 85

7 ØKI 6: UPPBOÐSSØLUR (AUCTIONS) 86

7.1 KAPPING (LEIÐREGLA 27) 86
7.2 SØLUTILGONGDIN (LEIÐREGLA 28) 87

8 ØKI 7: ALMENT PARTABRÆVAÚTBOÐ (FLOTATIONS) 88

8.1 LEIKLUTURIN HJÁ SELJARA (LEIÐREGLA 29) 88
8.2 HVUSSU SELJARIN UMSAT PARTABRÆVASØLUNA (LEIÐREGLA 30) 89
8.3 AT KEYPA PARTABRØV, MARKNAÐURIN IKKI KEYPIR (LEIÐREGLA 31) 90
8.4 AT EGGJA LEIÐSLU OG STARVSFÓLKI TIL AT KEYPA PARTABRØV (LEIÐREGLA 32) 91
8.5 AT DRAGA ÍLEGGJARAR AT SÆR (LEIÐREGLA 33) 92
8.6 SØLA MIÐAÐ MÓTI "EINSTØKUM ÍLEGGJARUM" (LEIÐREGLA 34) 93
8.7 HVUSSU PRÍSUR VERÐUR SETTUR Á PARTABRØV (LEIÐREGLA 35) 94
8.8 AT LATA PARTABRØV (LEIÐREGLA 36) 95
8.9 AT FÁA PRÍS Í FASTA LEGU (LEIÐREGLA 37) 95

9 ØKI 8: SØLUKOSTNAÐUR 96

9.1 HVUSSU SERFRØÐINGAR VERÐA VALDIR (LEIÐREGLA 38) 96
9.2 UM AT LEGGJA FÍGGJARÆTLAN FYRI SERFRØÐINGAHJÁLP OG AT HAVA EFTIRLIT VIÐ HENNI (LEIÐREGLA 39) 97
9.3 FRAMFERÐARHÆTTIR, TÁ IÐ FARIÐ VERÐUR ÍGJØGNUM SAMLAÐA KOSTNAÐIN (LEIÐREGLA 40) 99

10 ORÐALISTI 101

# 1 Inngangur

Tá ið einskiljingar verða grannskoðaðar, ella stovnar verða umskipaðir til m.a. partafeløg, hevur INTOSAI orðað leiðreglur. Leiðreglurnar eru ***"Guidelines on Best Practice for the Audit of Privatisations"***. Tær vóru almannakunngjørdar í november 1998. Leiðreglurnar binda ikki ríkisgrannskoðanirnar, sum eru limir í INTOSAI.

Flestu ríkisgrannskoðanir í heiminum vísa til henda felagsskap og tær vegleiðingar og leiðreglur, ið hann hevur orðað. Lond sum Ísland og Noreg nýta leiðreglurnar, tá ið einskiljingartilgongdir verða grannskoðaðar.

Farið varð undir at orða leiðbeiningina í 1994. INTOSAI setti tá arbeiðsbólk at savna tær royndir, sum ríkisgrannskoðanir í 117 londum høvdu gjørt sær av at grannskoða einskiljingar. Arbeiðsbólkurin skuldi m.a. skriva leiðreglur fyri "bestu mannagongd" at nýta, tá ið einskiljingartilgongdir verða grannskoðaðar.

Arbeiðsbólkurin vísti á, at serliga vóru 8 "øki", ið ríkisgrannskoðanin skuldi hava vakið eyga við, tá ið einskilt verður.

<u>Almenn krøv til einskiljingartilgongd:</u>

4. Krøv til førleika hjá ríkisgrannskoðanini (leiðregla 1-2)
5. Alment um leiklutin hjá ríkisgrannskoðanini í einskiljingartilgongdini, eitt nú, nær ríkisgrannskoðanin skal gerast partur av einskiljingartilgongdini o.a. (leiðregla 3-12)

<u>Ymiskir sølu-/einskiljingarhættir:</u>

6. Søla til einstakan keypara/strategiskan íleggjara (Trade sales) (leiðregla 13-20)
7. Søla til leiðslu/starvsfólk (Management Buy-Outs) (leiðregla 21-23)
8. Hópeinskiljingar (Mass Privatisations) (leiðregla 24-26)
9. Uppboðssølur (Auctions) (leiðregla 27-28)
10. Alment útboð á virðisbrævamarknaði (Flotations) (leiðregla 29-37)

<u>Kostnaður í sambandi við einskiljing/umskipan o.a.:</u>

11. Sølukostnaður (Sale Costs) (leiðregla 38-40)

Hvørt øki fevnir um fleiri leiðreglur, og hvør leiðregla er býtt í fýra partar:

12. Evni
13. Hví evnið er umráðandi
14. Leiðreglan
15. Grundgevingar fyri leiðregluni

Í innganginum til leiðreglurnar verður m.a. víst á, at í sambandi við eina og hvørja einskiljingartilgongd eru tríggir grundleggjandi spurningar, ið ríkisgrannskoðanin kann seta, áðrenn hon ger av, um hon skal kanna eina einskiljingartilgongd:

16. Vórðu lógir, reglur, mannagongdir, leiðreglur o.a. fylgd, tá ið einskilt varð
17. Virðismetti seljari fyritøku og ognir rætt
18. Var meira enn eitt boð upp á fyritøkuna

Er svarið "nei" upp á ein av spurningunum, skal ríkisgrannskoðanin kanska kanna eina einskiljing.

Er svarið "nei" upp á tveir av spurningunum, skal ríkisgrannskoðanin helst kanna einskiljingina.

Er svarið "nei" upp á allar tríggjar spurningarnar, er eingin ivi um, at tørvur er á at kanna einskiljingina.

At enda í innganginum verður víst á, at leiðreglurnar serliga eru ætlaðar sum eftirkanningarlisti, tá ið almenn fyritøka verður seld privata marknaðinum, men reglurnar kunnu eisini verða brúktar, t.d. tá ið ognir verða seldar, tá ið sáttmálar skulu verða gjørdir í sambandi við, at almennar tænastur verða bodnar út o.a.

# 2 Øki 1: Krøv til grannskoðanarførleika

## 2.1 <u>Hvønn førleika skal ríkisgrannskoðanin hava</u> (leiðregla 1)

### *2.1.1 Evni:*

Hvønn førleika skal ríkisgrannskoðanin hava?

### *2.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Um allan heimin verða almennar fyritøkur seldar privatum fyri at menna marknaðarbúskapin og fyri at bøta um virkisførið hjá fyritøkuni. Í mongum londum fara einskiljingar fram, um somu leið sum landsbúskapurin sjálvur er fyri ógvusligum rembingum.

Ymist er, á hvønn hátt einskilt verður, og stundum verða ymiskir søluhættir tvinnaðir saman og hava við sær, at torgreidd løgfrøðilig, fíggjarfrøðilig og roknskaparfrøðilig mál taka seg upp.

Bæði ting og almenningur seta sítt álit á ríkisgrannskoðanina til tess at vissa seg um, at einskiljingar eru farnar greidliga og reiðiliga fram, serliga við tí í huga, at fyritøka og ognir hava verið rætt virðismett.

Tey vilja vita, hvat ið vit hava lært, sum kann verða brúkt, tá ið aðrar einskiljingar standa fyri tørni.

Hevur ríkisgrannskoðanin ikki serkunnleikan, kann hon ikki veita vissu, tá ið vissa krevst, og ei heldur útgreina mál, um eitthvørt skeivt er farið fram.

### *2.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin eigur at gera sær sína ábyrgd greiða, tá ið einskiljingar eru fyri, og gera av, hvussu grannskoðanin kann verða framd í verki.***

***Serkunnleiki, ið krevst til tess at grannskoða einskiljingar, fevnir vanliga um meira enn vanligan tøkan grannskoðaraførleika. Ríkisgrannskoðanin má gera sær greitt, hvør hesin serkunnleiki er.***

### *2.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Í næstan øllum londum er tað ríkisgrannskoðanin, sum hevur ábyrgdina av at grannskoða teir myndugleikar, sum hava ábyrgd av einskiljingum. Í flestu londum hevur ríkisgrannskoðanin undan einskiljingini fulla ella avmarkaða atgongd til roknskaparligar upplýsingar hjá fyritøkunum.

Ofta hevur ríkisgrannskoðanin ábyrgdina av fíggjargrannskoðanini av roknskapinum hjá fyritøkuni, tá ið hon er almenn ogn. Tá ið ríkisgrannskoðanin hevur hesa ábyrgd, má hon taka fyrilit fyri teirri sannroynd, at grannskoðanin av roknskapinum undan einskiljingini hevur ein hægri váða fyri leiklutin hjá ríkisgrannskoðanini, enn um eingin broyting verður í ognarviðurskiftunum. Orsøkin er, at partarnir í einskiljingini líta á fíggjarligu upplýsingarnar um fyritøkuna, sum ríkisgrannskoðanin hevur grannskoðað.

Grannskoðanin krevur uppaftur meira, um fyritøkan er nógv umskipað framman undan einskiljingini, og um roknskaparhættir eru broyttir til tess at fyribúgva fyritøkuna at verða

avhendaða privatum. Tí hevur ríkisgrannskoðanin tørv á at tryggja sær bæði nóg hollan førleika til roknskaparviðurskifti hjá vinnurekandi feløgum og nóg góðan kunnleika um vinnuna og marknaðin, har fyritøkan virkar.

Tá ið ríkisgrannskoðanin eisini fyrisitingargrannskoðar einskiljingartilgongd, kann førleikin hjá ríkisgrannskoðanini verða býttur í tvey. Fyri tað fyrsta skal ríkisgrannskoðanin hava vanliga førleikan til vanliga fyrisitingargrannskoðan, sum er neyðugur fyri skjótt og væl at grannskoða eina og hvørja trupla uppgávu ella uppgávu við stórum váða. Hesin førleiki fevnir m.a. um kunnleika til politiska umhvørvið, og hvussu stjórnin/umsitingin virkar.

Tað, sum eyðkennir lond, har búskapurin er í broyting, er, at lógir um almenn og privat ognarviðurskifti ofta verða broyttar og mentar, samstundis sum einskiljingin fer fram. Tí er altíð óvissa í allari einskiljingartilgongdini, t.d. um ognarrættin til fyritøkurnar, og um hvørjar skyldur liggja eftir hjá landinum. Tí má ríkisgrannskoðanin hava góða løgfrøðiliga og handilsliga ráðgeving tøka.

Tá ið einskiljingartilgongdir verða grannskoðaðar, skulu torskildar metingar verða gjørdar, og ríkisgrannskoðanin má tí vanliga seta teir grannskoðarar, sum kønastir eru í fyrisitingargrannskoðan, á arbeiðið. Teir mugu hava sínar royndir í at meta um trupul mál við ófullfíggjaðum ella fleirtýddum upplýsingum, og teir skulu duga væl at greina og at samráðast.

Harafturat má ríkisgrannskoðanin hava serligan kunnleika til fyritøkuna, sum verður einskild og til marknaðin, fyritøkan virkar á. Umframt kunnleika til avtalur og løgfrøði krevst kunnleiki:

- til íløguvirksemi, serliga tá ið hugsað verður um virðisáseting,
- til sølutilgongdina og tær upplýsingar, íleggjarar hava tørv á,
- til fígging, búskap og greining, sum fevnir um evni sum diskonteringsfaktorar og evnini at skilja grundarlagið fyri boðunum upp á fyritøkurnar, ið verða lýstar til sølu.

## 2.2 <u>Hvussu skal ríkisgrannskoðanin útvega førleikan</u> (leiðregla 2)

### *2.2.1 Evni:*

Hvussu kann ríkisgrannskoðanin á besta og bíligasta hátt útvega sær neyðuga førleikan at grannskoða einskiljingartilgongdir?

### *2.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

Einskiljingar eru ymiskar og ymiskt er, hvussu fløktar, stórar og nógvar tær eru.

Ríkisgrannskoðanin má vera før fyri at gera eina álítandi meting. Men tað hevði verið kostnaðarmikið hjá ríkisgrannskoðanini at havt alla serfrøðina, sum neyðug er fyri at kanna allar sølurnar út í æsir, í føstum starvi.

### *2.2.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal tryggja sær, at hon hevur ta kjarnuvitan, henni tørvar fyri at kanna einskiljingartilgongdina til botns. Eyðvitað veldst um, hvat slag av einskiljing talan er um, umframt tíðarætlan, og hvussu víðfevndar einskiljingarætlanirnar hjá stjórnini eru. Ríkisgrannskoðanin skal umframt egna kjarnuvitan keypa sær uttanhýsis serfrøði, tá ið tørvur er á tí.***

### *2.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Er talan um stórar ella fløktar einskiljingar, er lítið sannlíkt, at ríkisgrannskoðanin hevur allan neyðugan førleika og vitan til at loysa sínar uppgávur nóg væl. Í slíkum førum má ríkisgrannskoðanin keypa sær serfrøði uttanhýsis, annars megnar hon ikki at grannskoða til lítar, og

niðurstøðurnar kunnu vera ivasamar, og avleiðingin kann verða, at ríkisgrannskoðanin missir trúvirði millum manna.

Royndirnar vísa, at fyri at grannskoða nágreiniliga og skjótt, kann tað vera bíligari at keypa sær serfrøðina frá uttanhýsis-ráðgevum til hvørja uppgávu sær, heldur enn at hava allan førleikan í húsinum. Tað krevur sjálvandi, at ríkisgrannskoðanin greitt hevur eyðmerkt øll tey øki, har serfrøðingaráðgeving krevst. Tá ið ríkisgrannskoðanin velur ráðgevar, má hon vera varin og tryggja, at ráðgevarnir ikki hava samband við fyritøkurnar, sum verða einskildar, ei heldur við bjóðararnar. Og bæði ríkisgrannskoðanin og tann, ið grannskoðaður verður, mugu hava virðing fyri ráðgevarunum.

Tað kann vera skilagott hjá ríkisgrannskoðanini at knýta slíkar serfrøðingar at sær í langa tíð. Fer landið undir nógvar einskiljingar, hevur ríkisgrannskoðanin tørv á at økja um sína kjarnuvitan. Í slíkum førum kunnu nýggju starvsfólkini, sum hava tann førleikan, ið ríkisgrannskoðanini vantar, læra hugað og evnarík starvsfólk hjá ríkisgrannskoðanini at loysa tær nýggju uppgávurnar.

Sum lið í hesi læru, halda ríkisgrannskoðanir tað vera stóra hjálp at geva hvør øðrum royndir og upplýsingar um grannskoðanir, ið longu eru framdar, og at býta um starvsfólk. Tað kann eisini vera virðismikið hjá ríkisgrannskoðanini at senda starvsfólk at arbeiða hjá uttanhýsis serfrøðingafelag fyri at fáa neyðuga førleikan, og at vera við á námsskeiðum og ymiskum ráðstevnum, har evnið "einskiljing" verður viðgjørt.

Tá ið ríkisgrannskoðanin hevur ment førleikan hjá starvsfólkunum, er hon eisini betur før fyri at átaka sær aðrar grannskoðanaruppgávur, so hvørt parturin hjá landinum broytist í samfelagsbúskapinum. T.d. skal ríkisgrannskoðanin møguliga hava eftirlit við:

- fyritøkum, sum eru einskildar
- uppgávum hjá landinum, ið verða latnar privatum at loysa
- øðrum samstarvsháttum, har tað almenna og tað privata samstarva

Ríkisgrannskoðanin kann byggja upp og varðveita lið, sum eru serkøn í slíkum kanningum, men tað er uttan iva bíligari og betri, at ríkisgrannskoðanin leitar sær hjálp frá serfrøðingum á økjum, har tað er neyðugt at hava dagførda vitan.

# 3 Øki 2: Alment um partin hjá ríkisgrannskoðanini í tilgongdini

## 3.1 <u>**Partur hjá ríkisgrannskoðanini í einskiljingini**</u> (leiðregla 3)

### *3.1.1 Evni:*

Nær skal ríkisgrannskoðanin gerast partur av einskiljingartilgongdini?

### *3.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Í nógvum londum er ríkisgrannskoðanin grannskoðari hjá fyritøkuni, meðan hon er almenn ogn. Heitt kann eisini verða á ríkisgrannskoðanina um at útvega seljaranum ávísar váttanir, áðrenn einskiljingartilgongdin kann byrja. Tørvur kann eisini vera á, at ríkisgrannskoðanin gevur seljara ráð um fíggjarligu støðuna hjá fyritøkuni, og at ríkisgrannskoðanin útvegar váttanir og fráboðanir um fíggjarligu støðuna hjá fyritøkuni, og víst kann verða til hesar upplýsingar í sølutilfarinum.

Sama um ríkisgrannskoðanin framman undan søluni hevur grannskoðað fyritøkuna ella ei, eru góðar grundir til, at ein ríkisgrannskoðan kannar søluna. Tílíkar uppgávur koma vanliga undir heimildina hjá eini ríkisgrannskoðan, tí talan er um almenna ogn, og almenningurin hevur tørv á óheftari váttan fyri, at tilgongdin var hóskandi, og at skattgjaldarin fekk rætta virðið fyri fyritøkuna. Tað ger eisini bæði seljara og keypara greitt, at ríkisgrannskoðanin eftir

øllum sannlíkindum fer at gjøgnumganga søluna, og at partarnir kunnu verða drignir til svars fyri sín part. Alt hetta ávirkar, nær ein ríkisgrannskoðan eigur at gerast partur av tilgongdini.

### *3.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal so tíðliga sum gjørligt, í tann mun stýrisskipan o.a. loyva tí, gerast partur av einskiljingartilgongdini, samstundis sum hon varðveitir sína óheftu støðu.***

### *3.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Ríkisgrannskoðanin má gerast partur av tilgongdini skjótast til ber fyri at fáa kunnleika til øll týðandi lið í einskiljingini, m.a. tí at fleiri av teimum kunnu vera vandamál fyri ríkisgrannskoðanina. Tað er serliga galdandi, um partarnir í tilgongdini nýta roknskaparligar upplýsingar um fyritøkuna, sum ríkisgrannskoðanin hevur grannskoðað. Tað hevur sjálvandi eisini týdning fyri ríkisgrannskoðanina undan søluni at fáa tætt samband við seljaran, um ríkisgrannskoðanin hevur verið uppi í avgerðini at selja.

Ríkisgrannskoðanin grannskoðar stjórnina. Einskiljingar kunnu tó eisini verða framdar av landspartaumsitingum ella øðrum lokalum umsitingum. Hesar einskiljingar kunnu eisini vera ein partur av ábyrgdarøkinum hjá ríkisgrannskoðanini, og eru tær ikki, kann tað henda, at ríkisgrannskoðanin biður um at fáa víðkað sítt heimildarøki. Um ein ríkisgrannskoðan ikki biður um víðkað heimildarøki, verður ein óheft gjøgnumgongd møguliga ikki gjørd av hesum einskiljingum. Í øllum førum má ríkisgrannskoðanin vera greið yvir, hvør ið hevur ábyrgdina av hvørjum, tá ið einskiljingin varð framd.

Tá ið ríkisgrannskoðanin ikki er roknskapargrannskoðari hjá fyritøku, men skal gera eina fyrisitingargrannskoðan av einskiljingartilgongdini, skal ríkisgrannskoðanin seta seg í samband við seljaran við tí fyri eyga at fara undir kanningararbeiðið skjótast til ber eftir søluna, tí royndirnar vísa, at luttakarar í tilgongdini, íroknað lyklapersónarnir í samráðingunum, fara til aðrar uppgávur, tá ið sølan er framd.

Um ríkisgrannskoðanin kannar einskiljingina, áðrenn hon fer fram, hevur ríkisgrannskoðanin møguleika at rættleiða, áðrenn einskiljingin verður framd. Tað er neyðugt at eyðmerkja, hvørjir høvuðstættir skulu verða kannaðir í slíkari undangrannskoðan. Grannskoðanin kann fevna um:

- *at* staðfesta, at greiður skilnaður er millum seljara og leiðsluna á fyritøkuni, sum verður seld;
- *at* mett verður um váða og møguleikar hjá fyritøkuni, og hvørja ávirkan tað kann hava á virðið á fyritøkuni;
- *at* kanna upplýsingarnar, sum verða latnar bjóðarunum, og sølutreytirnar í sáttmálanum.

Sama um ríkisgrannskoðanin formliga er uppi í tilgongdini ella ikki, áðrenn ein einskilting fer fram, er tað týdningarmikið at tryggja, at ein og hvør luttøka undan einskiljingini ikki skaðar skylduna hjá ríkisgrannskoðanini at hava eina óhefta áskoðan á tilgongdina. Óhefta støðan hjá ríkisgrannskoðanini kann vera í vanda, um ríkisgrannskoðanin – tá ið hon góðkendi onkra fyriskipan í sambandi við einskiljingina – ikki greitt gjørdi vart við, at hetta ikki fór at ávirka, hvussu mett varð um úrslitið av einskiljingini seinni.

## 3.2 <u>**Skulu áhugaðir keyparar sleppa fram at arbeiðsskjølum hjá ríkisgrann-skoðanini**</u> (leiðregla 4)

### *3.2.1 Evni:*

Hvørja støðu skal ríkisgrannskoðanin - tá ið hon er grannskoðari hjá fyritøkuni undan søluni - hava til fyrispurningar frá áhugaðum keyparum um at síggja arbeiðsskjølini?

### *3.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

At sleppa fram at arbeiðsskjølum hjá ríkisgrannskoðanini – í førum tá ið ríkisgrannskoðanin hevur verið fíggjargrannskoðari hjá almennu fyritøkuni, ið verður seld – kann seta ríkisgrannskoðanina í vanda fyri at missa trúvirði ella verða fyri rættarsókn, um keyparin seinni setir tiltøk í verk móti ríkisgrannskoðanini, tí hann heldur, at feilir eru í grannskoðanararbeiðinum.

### *3.2.3 Leiðregla:*

***Í teimum førum, tá ið ríkisgrannskoðanin undan einskiljingini er grannskoðari hjá almennari fyritøku, eigur ríkisgrannskoðanin at hugsa um at gera neyvar leiðreglur um rættindi hjá bjóðarum at sleppa fram at arbeiðsskjølum hjá ríkisgrannskoðanini.***

### *3.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Áhugaðir keyparar biðja ofta – annnaðhvørt beinleiðis frá ríkisgrannskoðanini ella umvegis seljaran – um at sleppa framat arbeiðsskjølum sum partur av teirra “due diligence mannagongd” (sí orðalista). Tað gera teir fyri at:

- meta um, hvussu góð grannskoðanin hevur verið,
- fyri óheft at meta um, hvussu góð fíggjarstýringin er,
- at staðfesta, hvørjar fortreytir liggja undir og hvørji virði eru í seinastu grannskoðaðu fíggjarstøðu.

Summir spurningar hóska betur at seta fyritøkuleiðslum. Summum spurningum kunnu bara grannskoðarar svara.

Í summum londum kann ríkisgrannskoðanin ikki, við at vísa til lóggávu, nokta atgongd til síni arbeiðsskjøl, í øðrum londum kann hon. Um ríkisgrannskoðanin noktar atgeingi til arbeiðsskjølini, mugu bjóðararnir líta á aðrar keldur við upplýsingum, t.d. søluupplýsingar (prospekt) og sínar egnu kanningar.

Tá ið ríkisgrannskoðanin orðar eina mannagongd um innlit í arbeiðsskjøl, eigur hon at hava í huga lóggávu og mannagongdir í viðkomandi landi um atgongd til arbeiðsskjøl. Ríkisgrannskoðanin má hava áhugamálini hjá seljaranum í huga um at fáa nóg góða úrtøku burtur úr einskiljingini, og tí kann ríkisgrannskoðanin gera av at játta umbøn um innlit. Spurningar, ið bjóðarar hava ella fáa loyvi at seta, skulu verða svaraðir nágreiniliga og skjótt, tó soleiðis, at vandin fyri rættarmáli ella at missa trúvirði verður avmarkaður sum mest.

Tað kann vera skynsamt av ríkisgrannskoðanini at gera leiðreglur, sum skulu verða brúktar í øllum førum, tá ið keyparar vilja hava “due diligence-støður”. Ein slík vegleiðing skal fevna um:

- at starvsfólkið hjá ríkisgrannskoðanini skal kunna ríkisgrannskoðanina, tá ið ein keypari, sum fremur “due diligence”, hevur sett seg í samband við tey
- ríkisgrannskoðanin skal hava fingið loyvi frá fyritøkuni (sum verður einskild), áðrenn samband verður tikið upp við keyparar
- umboð fyri ríkisgrannskoðanina og fyritøkuna skulu altíð vera til staðar, tá ið samráðst verður við keyparar um at fremja “due diligence”
- eitt yvirlit við spurningum skal, umvegis fyritøkuna (sum verður einskild), verða fingið frá keyparanum undan hvørjum fundi við keyparan

- á fundinum við keyparan skulu allir spurningar, sum grannskoðarin heldur hava við ábyrgdina hjá leiðsluni á fyritøkuni (ið verður einskild) at gera, verða settir umboðnum fyri fyritøkuna

## 3.3 At leggja ráð um einskiljingargrannskoðan (leiðregla 5)

### *3.3.1 Evni:*

Hvørji fyrilit skal ríkisgrannskoðanin taka, tá ið hon leggur ætlanir um at grannskoða eina einskiljing?

### *3.3.2 Hví evnið er umráðandi:*

At leggja ráð um at grannskoða er týdningarmikil partur av grannskoðanini. Røtt og nágreinilig ráðlegging er serliga týdningarmikil, tá ið ein einskiljingartilgongd skal verða grannskoðað. Tað fevnir m.a. um at staðfesta, hvørji endamálini eru við einskiljingini, eisini tey, ið ikki eru borin fram (óalmenn), og hvørjir týðandi luttakarar eru í tilgongdini, vandamál og møguleikar við einskiljingini, og hvørt skyldan at kunna lóggávutingið var nóg væl røkt. Ríkisgrannskoðanin skal royna at staðfesta, hvør lærdómur, ið fæst úr einari einskiljing, og hvørt lærdómurin kann verða nýttur í einskiljingum, sum eru fyri stavn.

Í teimum førum, tá ið ríkisgrannskoðanin er partur av tilgongdini undan søluni, eigur ríkisgrannskoðanin at ávara seljaran um vandan fyri, at sølan ikki fer rætt fram, so seljarin hevur høvi at gera broytingar. Í londum har einskiljingarnar ikki verða framdar av sentralum stovni, verður t.d. arbeiðsbólkurin, sum stendur fyri einskiljingini, tikin av eftir einskiljingina, og limirnir í bólkinum fara hvør í sína ætt. Tí eigur ríkisgrannskoðanin vanliga at leggja soleiðis til rættis, at grannskoðanin byrjar beint eftir einskiljingartilgongdina, so ríkisgrannskoðanin hevur nøktandi atgongd til grannskoðanarprógv, sum seljari og ráðgevar hansara hava, og eisini atgongd til meiningarnar hjá triðja parti, sum høvdu stóran áhuga í einskiljingini.

### *3.3.3 Leiðregla:*

***Tá ið ríkisgrannskoðanin leggur til rættis, hvussu einskiljing skal verða grannskoðað, eigur ríkisgrannskoðanin at hugsa um øll lið í tilgongdini, sum hava týdning fyri, at alt fer rætt fram, og at rætta virðið fæst fyri fyritøkuna. Ríkisgrannskoðanin skal gera sær greitt, hvørjir týðandi luttakarar eru í einskiljingini, og útvega sær upplýsingar frá teimum. Ríkisgrannskoðanin eigur at ansa eftir, hvat ið hon kann læra av einskiljingini, m.a. um mannagongdir/leiðreglur vórðu fylgdar, hvat úrslitið av einskiljingini var, og um endamálið við einskiljingini varð rokkið.***

### *3.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Er ráðleggingin ikki góð, er vandi fyri, at ríkisgrannskoðanin fer undir eina kanning, sum manglar mál, og sum manglar breidd og dýpd í teimum prógvum, sum eru neyðug fyri at tryggja eina álítandi frágreiðing. Ríkisgrannskoðanin má kunna seg um virksemið, fíggjarligu støðuna og ognirnar hjá fyritøkuni, og gera sær greitt, hvørjar upplýsingar eru neyðugar, og hvat tað kostar at fáa hendur á teimum, fyri at vera før fyri at kanna einskiljingartilgongdina.

Ríkisgrannskoðanin má seta seg í samband við seljaran skjótast til ber, tí einskiljingarbólkurin kann verða spjaddur, serliga um einskiljingin er ein støk uppgáva hjá einskiljingarbólkinum (sammett við eina av mongum einskiljingum, sum t.d. ein sentralur einskiljingarstovnur stendur fyri). Hevur ríkisgrannskoðanin ikki hesa atgongd, verður hon ikki før fyri nágreiniliga at kanna spurningar, sum t.d. hvørji málini við einskiljingini vóru, hvat ið varð mett ein væleydnað søla, hvat seljarin lærdi av einskiljingini, og hvussu hann

kann brúka hesar royndir í framtíðini. Hesar upplýsingar hava týdning fyri, hvussu farið verður undir grannskoðanina, arbeiðshættir, nýtslu av tilfeingi og tíðarætlanir fyri, nær frágreiðingar verða latnar.

Tað hevur eisini týdning at leggja ætlanir, so viðmerkingar kunnu verða savnaðar frá øllum pørtum í einskiljingartilgongdini. Umframt seljaran eru ofta ein stórur bólkur av 3. pørtum, sum eru partur av einskiljingartilgongd. Tey kunnu vera t.d. leiðandi starvsfólk í fyritøkuni, sum verður einskild, áhugaðir keyparar, íløgufeløg, ráðgevar, umboð fyri starvsfólkið á fyritøkuni, serkøn í ymiskum vinnugreinum, akademikarar og brúkarafelagsskapir. Her hevur tað týdning, hvørt ríkisgrannskoðanin formliga hevur rætt til atgongd til hesar partar.

Ríkisgrannskoðanin má sum skjótast staðfesta, hvørjir hesir partarnir eru og ætla um, hvussu hon kann greina teirra leiklut í einskiljingini, og hvussu ríkisgrannskoðanin kann fáa upplýsingar frá teimum um einskiljingina.

Hátturin, ið verður nýttur at fáa greiði á slíkum sjónarmiðum, er vanliga viðtal, skipað spurnarbløð og kanningar, har spurt verður um áskoðanir. Er talan um stórar partabrævasølur, kann verða neyðugt hjá ríkisgrannskoðanini at savna upplýsingar kring allan heim.

Um ein tíð líður frá, at einskilt verður, til ríkisgrannskoðanin letur úr hondum eina frágreiðing, má ríkisgrannskoðanin ansa eftir tí, ið fer fram eftir einskiljingina, t.d.:

- um keyparin hevur hildið treytirnar í avtalu um, at partur av ella alt gjaldið fyri fyritøkuna kann verða útsett,
- um partabrævaprísurin eftir partabrævasøluna er hækkaður ella lækkaður,
- og um keyparin hevur hildið lyftini um, hvussu nógv starvsfólk hann skuldi hava í arbeiði, og hvussu nógvar íløgur hann skuldi gera í fyritøkuna.

Alt hetta kann geva ábending um, hvørt endamál seljarans við einskiljingini vórðu rokkin.

## 3.4 <u>At umskipa almenna fyritøku, áðrenn hon verður einskild</u> (leiðregla 6)

### *3.4.1 Evni:*

Hvat eigur ríkisgrannskoðanin at kanna, tá ið fyritøka verður umskipað, áðrenn hon verður seld?

### *3.4.2 Hví evnið er umráðandi:*

At umskipa almenna fyritøku, áðrenn hon verður einskild, fevnir bæði um, at fyritøkan fær eitt lógargrundarlag, sum ger, at hon kann kann verða seld, og at fyritøkan og hennara kapitalviðurskifti grundleggjandi vera umskipað, so tey hóska betur til langtíðarmálini við einskiljingini. Umráðandi er, at ríkisgrannskoðanin skilir, hvussu og hví fyritøkan varð umskipað til tess at fata sjálva einskiljingina. Sama, um ríkisgrannskoðanin metir um gongdina í umskipanini umframt at grannskoða, hvussu fyritøkan síðan verður seld.

### *3.4.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal tryggja sær, at hon skilir, hví seljarin umskipaði fyritøkuna undan søluni, og hvat seljarin gjørdi fyri at røkka málunum við umskipanini.***

### *3.4.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Í londum, sum í skundi hava roynt at fara frá planbúskapi til marknaðarbúskap, hevur dentur ofta verið lagdur á í skundi at einskilja nógvar fyritøkur, samstundis sum roynt hevur verið at fáa løgfrøðiligar og aðrar skipanir upp á pláss, fyri at stuðla marknaðarbúskapi. Broytingar í løggávuni hava við sær, at mátin, ríkisgrannskoðanir nýta til tess at kanna einskiljingar,

broytist. Ríkisgrannskoðanin má vera serliga ansin, um óvissa er um ognarrættin til ognirnar, sum staturin roynir at selja ella hevur selt.

Umskipan, sum fer fram framman undan einskiljingini, er ofta á byrjanarstigi, og ofta verður latið nýggju eigarunum upp í hendi at umskipa fyritøkuna grundleggjandi, eftir at hon er einskild. Tað merkir viðhvørt, at nógv færri starvsfólk verða í fyritøkuni. Í summum ídnaðarlondum verður latið nýggju eigarunum upp í hendi at minka um fyritøkuna (downsizing), tí hildið verður, at marknaðurin sjálvur er best førur fyri at avgera slíkt. Í slíkum førum kunnu sosialir kostnaðir standast av at einskilja (serliga arbeiðsloysi), sum landið seinni skal rinda. Fyri at sleppa undan tílíkum sosialum kostnaði, hava summi lond flættað inn í endamálið við einskiljingini, at ávíst starvsfólkatal verður ásett, og at íløgurnar skulu vera á ávísum støði.

Í øðrum førum hava stjórnir kortini ikki havt búskaparliga orku til at rinda stórvegis fyri at umskipa fyritøkur framman undan einskiljing. Umskipanir kunnu eisini hava við sær, at einskiljingin verður seinkað meira enn partarnir vilja finna seg í.

Ein gjøgnumgongd av mannagongdunum fyri umskipanir, sum seljarin fylgdi undan einskiljingini, kann geva ábendingar um, hví einskilt verður, og hvussu sølan av hesi fyritøkuni passar inn í vanliga framferðarháttin hjá stjórnini, tá ið ræður um einskiljing.

Ríkisgrannskoðanin má eisini greidliga skilja, hví fyritøkan varð seld, og eisini hví tað almenna umskipaði ella ikki umskipaði fyritøkuna, og á tann hátt slóðaði fyri einari ætlaðari sølu. Ella um staturin, tá ið hann umskipaði fyritøkuna, framvegis var í iva, um fyritøkan skuldi verða einskild. Ein tílík nágreinilig kanning hjá ríkisgrannskoðanini kann eisini fáa greiði á, hvørji týðandi viðurskifti ávirkaðu avgerðina at einskilja, hóast hesi viðurskifti ikki eru millum orðaðu orsøkirnar til, at einskilt verður. Eitt nú hvønn týdning avskriving av skuld hjá fyritøkuni til tað almenna væntandi hevur á yvirskipaðu fíggjarligu støðuna hjá stjórnini.

Ivaleyst eru mangir týðandi spurningar at taka støðu til, tá ið avgjørt er at umskipa. Til dømis tá ið fyritøka skyldaði stjórnini ella øðrum almennum fyritøkum nógvan pening, hvussu nógv av hesi skuld varð strikað ella umløgd til ábyrgdarpening, og hvørja ávirkan hevði tað á prísin, sum seljarin fekk fyri fyritøkuna. Í summum førum kann seljari koma til ta niðurstøðu, at fyritøkan ikki kann verða seld, uttan at øll skuld ella stórir partar av henni verða avskrivað. Harafturat kann sjálvur bygnaðurin í fyritøkuni ávirka, hvussu løtt hon er at marknaðarføra. Um alt annað er óbroytt, eigur søluprísurin at vera hægri, um ein monopol-fyritøka verður seld, enn um ein fyritøka, sum er í kapping, verður seld.

Seljarar, ið vilja eggja til kapping, býta stundum stóra fyritøku sundur í smærri eindir fyri at draga fleiri áhugaðar keyparar til sín. Tað kann bæði tryggja meira kapping í sambandi við sølutilgongdina og meira kapping eftir søluna.

Í teimum førum, tá ið ríkisgrannskoðanin hugsar um at kanna og skriva frágreiðing um umskipanina, má hon hava í huga, at burtursæð frá ávirkanini á søluna, kann rúm tíð ganga, áðrenn til ber at koma til eina niðurstøðu um, hvørt einskilda fyritøkan gevur íkast til yvirskipaðu málini, sum stjórnin hevur við einskiljingini. Tað kann t.d. vera at menna ein marknaðarbúskap, og sjálvt tá er trupult at meta um ávirkanina, sum umskipanin hevði við sær.

## 3.5 <u>Endamál við sølu</u> (leiðregla 7)

### *3.5.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin royna at staðfesta, tá ið hugsað verður um, hvat seljari ætlaði sær at fáa burtur úr einskiljingini?

### 3.5.2 Hví evnið er umráðandi:

Tá ið einskiljing verður fyrisitingargrannskoðað, er umráðandi fyrst at staðfesta, hvørji endamálini við søluni eru.

Ríkisgrannskoðanin má staðfesta, hvørji endamálini vóru við at einskilja, íroknað tær skyldur, ið vórðu lagdar á fyritøkuna, og hvussu endamálini hanga saman við langtíðarendamálunum, m.a. at menna ein marknaðarbúskap, umframt sosial og umhvørvislig atlit. Einskiljing er ikki ein statisk tilgongd, og endamálini við hvørjari einstakari einskiljing er myndað av, hvussu væl búskapurin er mentur, og tað kann broytast heilt nógv, sum frá líður.

Bæði endamálini her og nú og langtíðar-endamálini hava lyndi til at kappast sínámillum, ið hvussu er eitt sindur, og øll mál verða ikki altíð orðað. Bara við at skilja, hvussu torgreið endamálini eru, hvussu tey virka sínámillum, og hvørja ávirkan tey høvdu á, hvussu einskiljingin fór fram, kann ríkisgrannskoðanin gera sær greitt, hvørjar spurningar hon skal seta sær, tá ið hon kannar einskiljingina.

### 3.5.3 Leiðregla:

***Tá ið ríkisgrannskoðanin fer undir at kanna eina einskiljingartilgongd, skal hon greidliga fata, hvat seljarin ætlar sær við einskiljingini, og hvussu sambandið er millum ætlanirnar at einskilja og høvuðsmálini fyri búskapin annars.***

### 3.5.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:

Fatar ríkisgrannskoðanin ikki greidliga tey mangan torgreiddu endamálini hjá seljaranum, ikki minst politisku endamálini, er vandi fyri, at ríkisgrannskoðanin fer undir eina fyrisitingargrannskoðan, sum ikki megnar at staðfesta og kanna, hvørji mál seljarin royndi at røkka.

Í sambandi við nógvar einskiljingar standa seljarar til svars, og víst verður til endamálini við einskiljingini, sum stjórnin ofta hevur orðað. Endamálini við at einskilja eru ymisk í ymiskum londum. Alt veldst um búskaparligu avbjóðingarnar, sum staturin hevur fyri sær, tá ið hann einskilir, og hvussu einskiljingin verður hildin at svara til avbjóðingarnar. Endamálið kann vera at einskilja í skundi fyri at vísa ivasomum marknaði, at einskiljing ber til, og á tann hátt slóða fyri øðrum einskiljingum. Annað endamál kann vera at tryggja íløgur ella at eggja til størri partabrævaognir.

Neyðugt er hjá ríkisgrannskoðanini at kanna, hvørja ávirkan seljarans starvsfólkapolitikkur hevði á einskiljingina, t.d. um endamálið var at varðveita starvsfólkatal ella at verja rættindini hjá teimum, ið kundu verða uppsøgd, hvussu seljari og keypari samdust um at rinda uppsagnarløn o.a.

Hesi endamál hava lyndi til at vera í andsøgn hvørt við annað. Eitt mál, sum ríkisgrannskoðanin má taka støðu til, er, hvørt seljarin megnaði at fáa javnvág millum málið at selja skjótast møguligt og at fáa mest møguligt burturúr, samstundis sum søluútreiðslur vórðu avmarkaðar mest møguligt.

Tað er sjálvandi seljarin, ið ger av, hvussu hann loysir trupulleikan við søluendamálum, sum eru í andsøgn hvørt við annað, og ríkisgrannskoðanin má vara seg fyri, at hon ikki tekur á seg ábyrgd seljarans at raðfesta. Ger staturin sum seljari av at raðfesta at selja fyritøkurnar skjótt heldur enn at fáa mest møguligt fyri tær, til dømis fyri at vekja íleggjaranna álit á einskiljingartilgongdina, er tað uttanfyri heimildina hjá ríkisgrannskoðanini at siga, at seljarin átti at bíðað við at selt, fyri at fingið hægri prís. Men ríkisgrannskoðanin skal kanna avleiðingarnar av mátanum, staturin nýtti til tess at einskilja, og vísa á, hvønn ágóða almenningurin misti av ávísari einskiljing. Royndirnar vísa, at fær staturin t.d. ikki fullan prís fyri eina einskiljing, og almenningurin svíður fyri, at teir nýggju eigararnir vinna nógvan pening,

skaðar tað umdømið og trúvirðið hjá stjórnini, tí almenningurin heldur ikki, at sølutreytirnar í sambandi við einskiljingina hava verið rímiligar.

Summi endamál kunnu tykjast vera í andsøgn og kortini ikki vera tað. T.d. kann tað, at nakrir íleggjarar fáa boðið lagaligar treytir í sambandi við alment partabrævaútboð, tykjast í andsøgn við endamálið um at fáa mest møguligt fyri eina sølu, men um tileggjanin, sum ávísum íleggjarum stendur í boði, hevur við sær størri kapping millum íleggjararnar, kann tileggjanin hava við sær, at samlaða søluinntøkan verður størri. Tað er tó trupult at prógva.

Kann ríkisgrannskoðanin greidliga staðfesta avleiðingarnar av orðaðu endamálunum hjá seljaranum, kann tað hjálpa henni at fáa greiði á týðandi endamálum, ið ikki eru orðað, og eisini endamálum, sum tað hevði verið skilagott at seljari setti, men sum hann ikki gjørdi. Sama um endamálið er orðað, skal ríkisgrannskoðanin kanna, um seljarin fekk góða úrtøku burtur úr at einskilja fyritøkuna. Slík greiða hjálpir eisini statinum at orða endamál fyri tær einskiljingar, sum verða í framtíðini.

## 3.6 <u>Sølutíðarætlan</u> (leiðregla 8)

### *3.6.1 Evni:*

Tá ið sølutíðarætlan er fyri, hvat skal ríkisgrannskoðanin tá hugsa um?

### *3.6.2 Hví evnið er umráðandi:*

Ikki er óvanligt, at eitt endamál hjá seljara er at einskilja skjótast til ber. Ríkisgrannskoðanin skal staðfesta, um seljarin almannakunngjørdi týðandi tíðarfreistir, so allir bjóðarar virkaðu undir somu treytum. Ríkisgrannskoðanin skal eisini ansa eftir, at onnur endamál við einskiljingini ikki svíða fyri, at ein krevjandi tíðarætlan verður raðfest hægri.

### *3.6.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal staðfesta, hvørji mál seljarin hevði sett sær fyri, nær sølan skal fara fram, og um royndirnar at røkka hesum máli høvdu ávirkan – góða ella ringa – á søluna.***

### *3.6.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Seljarar eru ofta undir stórum trýsti at avgreiða sølu eftir krevjandi tíðarætlan. Hetta ger ofta um seg, tá ið lond til dømis royna at fara frá planbúskapi til marknaðarbúskap so skjótt, sum til ber. Tað kemur eisini fyri í rættiliga framkomnum búskapum, tá ið ein stjórn ætlar at fíggja útreiðslur á fíggjarlógini ella minka um almenna skuld við at selja fyritøkur. Tíðarætlanin kann eisini vera krevjandi, tá ið talan er um stórar partabrævaútgávur ella partabrævasølu, og útlitini ikki eru av teim bestu.

Eisini verður tað hildið at vera góður skikkur at avgreiða søluna so skjótt, sum til ber, bæði so at fyritøkan ikki er fyri missi, av tí at ótryggleiki valdar um framtíð hennara, og fyri at varðveita kappingina millum bjóðarar fyri at fáa ein góðan handil. Eisini tá ið selt verður til strategiskan íleggjara, verður sæð til, at kappingin stendur við, frá tí at fyrstu tilboðini eru fingin inn, og tilboðini verða raðfest, til sølusáttmáli er undirskrivaður.

Tá ið ríkisgrannskoðanin kannar hesar tættir, skal hon sýna fyrilit fyri slíkum trýsti. At halda krevjandi tíðarætlan er eingin umbering fyri at gera mistøk. M.a. skal verða kannað, um farið varð fram eftir fummum í týðandi liðum í sølutilgongdini t.d.:

- tá ið uttanhýsis ráðgevar verða útnevndir,
- tá ið fyritøkan verður løgfrøðiliga fyrireikað til søluna,
- tá ið søluhátturin verður avgjørdur,

- tá ið roknskaparligar og aðrar fíggjarligar upplýsingar verða fyrireikaðar um at gera upp og virðismeta ogn og fyritøku,
- tá ið sølan av fyritøkuni verður marknaðarførd,
- tá ið samráðingar eru við keypara.

Ella um týðandi lið vórðu lopin um ella avgreidd, og fólk ikki hugsaðu seg nóg væl um. Varð farið fram eftir fummum, ella vóru týðandi lið í tilgongdini umlopin, skal ríkisgrannskoðanin kanna, hvørt tað hevði skaðiliga ávirkan (sum kann verða gjørd upp í tølum) á úrslitið av einskiljingini, t.d. inntøkumiss.

## 3.7 **Hvussu fyritøka verður virðismett undan sølu** (leiðregla 9)

### *3.7.1 Evni:*

Hvørji høvuðsevni skal ríkisgrannskoðanin kanna, tá ið seljari hevur virðismett fyritøku, áðrenn hon verður einskild?

### *3.7.2 Hví evnið er umráðandi:*

At fyritøka verður virðismett óheft er umráðandi í væl fyriskipaðari sølu, tí hon ger seljaran føran fyri at meta um, hvørt tilboðini frá keyparum eru nøktandi, og virðismetingin kann vera ein stuðul í seinni samráðingum við keyparar.

### *3.7.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin eigur at staðfesta, hvørt seljarin fekk fyritøkuna virðismetta, áðrenn hon varð seld. Um ikki, eigur ríkisgrannskoðanin at kanna orsøkirnar til tess, og tá ið ríkisgrannskoðanin kannar málið, eftir at sølan er farin fram, má hon hugsa um at útvega sær sína egnu virðismeting. Hevur seljarin fingið fyritøkuna virðismetta, skal ríkisgrannskoðanin staðfesta, hvørt metingin:***

- ***var grundað á hóskandi fortreytir***
- ***var óheft av keypara og av leiðsluni á fyritøkuni***
- ***bygdi á viðurkendar meginreglur um at virðismeta fyritøkur, og***
- ***er nyttug leiðbeining hjá seljara at nýta, tá ið mett verður um innkomin tilboð og í samráðingunum, sum førdu til endaligu søluna***

### *3.7.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Tað verður hildið at vera góður skikkur, at fyritøka verður mett, áðrenn hon verður seld, og serliga, at fyritøkan verður mett sum ein “going concern” (t.e. við framhaldandi rakstri fyri eygað), so seljarin hevur eitt mát, sum innkomin tilboð kunnu verða borin saman við. Virðismetingin kann eisini verða nýtt til at eftirkanna sjálva sølutilgongdina, tá ið útboð verður brúkt, og bjóðari verður valdur burturúr, sí “Øki 3”, leiðreglur 13-20. Ein virðismeting kann stundum vera nógv ymisk virði, sum eru treytað av ymiskum ætlanum.

Víkja tilboðini nógv frá virðismetingini, kann spurningur verða settur við, um sølan er nóg væl marknaðarførd, ella um nóg nógv kapping er um søluna. Tað er eisini góður siður, at seljari setir minstaprís á fyritøkuna. Tað merkir, at fyritøkan verður ikki seld undir ásetta prísin.

Viðhvørt kann seljarin seta uppá, at fyritøka er trupul at virðismeta, tí hon er so serstøk, einki er at bera saman við o.s.fr., men havast skal í huga, at keypararnir skulu virðismeta fyritøkuna, og teir hava ikki fleiri og betri upplýsingar, enn seljarin hevur. Tað er rættiliga óvanligt, um seljarin bókstaviliga ikki er førur fyri at meta um virðið á fyritøku. Seljarar vísa

viðhvørt á, at ein vælskipað kapping er besta trygdin fyri, at virðið fæst fyri søluna. Kapping er sjálvandi umráðandi, men tað er av alstórum týdningi hjá seljara, at hann hevur eitt samanburðargrundarlag, tá ið hann skal meta um tilboðini. Hevur seljari ikki megnað at útvegað eina virðismeting, kann tað vera tekin um, at hann ætlar at selja fyritøkuna fyri ein ónøktandi prís, og at hann ikki vil ábyrgjast fyri tað. Sjálvandi má samanhang vera millum, hvussu gjøgnumførdar og kostnaðarmiklar samanburðar-virðismetingarnar eru, og hvussu stórar og torgreiddar fyritøkurnar eru, sum einskildar verða.

Fortreytirnar, sum verða brúktar í virðismetingini, eiga at vera sambæriligar við endamálið, virðismetingin verður brúkt til. Verður virðismetingin t.d. brúkt til at meta um úrslitið av eini tilgongd, tá ið bjóðað verður um kapp fyri at keypa eina fyritøku sum eina "going concern", eigur virðismetingin at vera gjørd við støði í "going concern".

Virðismetingina kann eingin gera, ið hevur áhuga í søluúrslitinum, t.d. leiðslan á fyritøkuni, sum er til sølu. Sama um leiðslan bjóðar upp á fyritøkuna. Viðhvørt er neyðugt, at óheftur partur kannar virðismetingina, m.a. tá ið fíggjarráðgevar hjá seljara hava virðismett, og samsýningin hjá ráðgevunum er treytað av, um søluprísurin verður hægri enn virðismetingin (sí leiðreglu 39). Í slíkum førum hava ráðgevar áhuga í, at ásetta virðið er lágt.

Fyri at virðismeta eina fyritøku krevst, at tú hevur førleika og metingarevni. Grundarlagið, sum metingin verður grundað á, má fevna um kvantifiserðar upplýsingar um fyritøkuna, og metingin skal byggja á meginreglur, sum vera virdar millum yrkiskønar virðismetarar.

Ríkisgrannskoðanin skal eisini kanna, um seljarin hugsaði um at umskipa fyritøkuna undan søluni, m.a. fyri at fáa hægri søluprís (sí leiðreglu 6).

## 3.8 <u>Søluhættir</u> (leiðregla 10)

### *3.8.1 Evni:*

Hvørji viðurskifti skulu verða havd í huga, tá ið ríkisgrannskoðanin metir um søluhátt, ið seljari hevur brúkt?

### *3.8.2 Hví evnið er umráðandi:*

Søluhátturin kann hava stóran týdning fyri, hvussu einskiljingin hilnast. Stundum er avgerðin løtt, t.d. kann almenn uppboðssøla vera einfaldasti og bíligasti framferðarhátturin, tá ið smáar fyritøkur verða seldar. Tá ið talan er um stórar fyritøkur, er truplari at velja ímillum, serliga marknaðarførda sølu til strategiskan íleggjara ella sølu á almennum partabrævaútboði. Seinna loysnin hevur fleiri søluútreiðslur við sær, men eydnast at fáa íleggjararnar at kappast, kann søluprísurin hækka. Harafturat kann henda loysn hava annað árin, t.d. at innlendis kapitalmarknaðurin verður mentur.

Ríkisgrannskoðanin má kanna, hvørjar einskiljingarhættir seljarin hevði í huga, og hví seljarin brúkti júst henda søluhátt.

### *3.8.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, hvørjar søluhættir seljari hugsaði um, áðrenn hann avgjørdi søluhátt - hvørjar grundgevingar seljari brúkti, tá ið hann valdi júst ávísan søluhátt - hvussu hann megnaði at røkka aðalmálunum við einskiljingunum.***

### *3.8.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Hvussu nærlagdur seljari er (ella ikki er), tá ið hann avger søluhátt, kann varpa ljós á, hvussu væl seljarin hevur skilt virksemið hjá fyritøkuni, sum verður seld, og hvussu áhugaverd hon kann vera á marknaðinum. Er talan um stóra fyritøku, kann vera áhugavert hjá seljara so leingi, sum til ber, at halda møguleikarnar opnar annaðhvørt at selja til strategiskan íleggjara

ella á almennum partabrævaútboði. Seljari kann t.d. fara undir samráðingar við strategiskan íleggjara, bæði fyri at kanna marknaðin og fyri at leggja trýst á stjórarnar í fyritøkuni (teimum hóvar kanska betur alment partabrævaútboð, tí tá tykist møguleikin størri at varðveita størvini), sum eru meira hjálpsamir í sambandi við tey prospektir, sum skulu verða fyrireikað, um fyritøkan skal verða seld á almennum partabrævaútboði.

Hugsar seljarin seg ikki væl um, hvat slag av fyritøku hann skal selja, áðrenn hann velur søluhátt, kann hann fáa minni fyri søluna. Eitt dømi er um, at ein seljari skuldi avhenda eina fyritøku, sum veitti ymiskar KT-tænastur til nøkur almenn sjúkrahús. Talan var um áhugaverda íløgu, tí sjúkrahúsini høvdu stóran tørv á tænastum til sínar KT-skipanir. Í staðin fyri at marknaðarføra fyritøkuna væl og virðiliga sum sølu av fyritøku beinleiðis til aðra fyritøku, viðgjørdi seljarin søluna sum eina tænastuveiting (service procurement exercise). Ríkisgrannskoðanin staðfesti, stuðlað av eini virðismeting, at seljarin fekk eina nógv verri avtalu fyri skattgjaldaran. Við støði í frágreiðingini frá ríkisgrannskoðanini hevur heilsumálaráðið í tí landinum avgjørt, at í framtíðini verða avhendanir viðgjørdar sum søla av fyritøku beinleiðis til aðra fyritøku.

## 3.9 <u>**Rættlæti seljara í sambandi við sølu**</u> (leiðregla 11)

### *3.9.1 Evni:*

Avgreiddi seljarin søluna við rættlæti og við skynsomum atliti at, hvussu tað almenna eigur at bera seg at?

### *3.9.2 Hví evnið er umráðandi:*

Einskiljing hevur við sær, at embætismenn avhenda almenna ogn til privatar at eiga. Ein og hvør avhendan skal lúka lógarásett krøv um rætta roknskaparliga skráseting av almennum inntøkum og útreiðslum. Avhendanin má fara fram á rættvísan hátt, og sambært teimum ásetingum, ið galda fyri tey, ið hava ábyrgd av at ansa eftir ognum skattgjaldarans. M.a. at tryggja, at nýggju eigararnir lúka tær skyldur, teir eiga at taka á seg. Ósambærilig áhugamál kunnu vera, t.d. at seljari og ráðgevar hansara vilja meta varliga um virðini hjá fyritøkuni fyri at økja um møguleikan fyri, at sølan verður væleydnað (sí leiðreglu 9). Men tað kann skaða áhugamálini hjá skattgjaldaranum, um tað hevur við sær, at lægri søluprísur fæst fyri fyritøkuna.

Embætismenn mugu ikki fáa ágóða, sum ikki er tilætlaður, av søluni - hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis. Funnist kann verða at embætismonnum fyri mátan, einskilt varð, og teir "vóna", at ríkisgrannskoðanin skal verja teirra umdømi.

Ríkisgrannskoðanin kann hava ilt við at fáa hendur á álítandi upplýsingum og kann verða avvíst við teirri grundgeving, at talan er um handilsligar loynidómar. Til dømis tá talan er um at almannakunngera staklutir sum, hvørjir hava boðið, hvussu nógv teir hava boðið og goldið.

### *3.9.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, hvørt hóskandi trygdartiltøk vórðu fyriskipað, fyri at tryggja at sølan fór rætt og reiðiliga fram. Ríkisgrannskoðanin skal kanna skuldsetingar um óhóskandi atferð og staðfesta, hvørt mannagongdirnar vórðu fylgdar.***

### *3.9.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Vandi er fyri, at teir, ið hava ábyrgdina av søluni, royna at fáa persónligan vinning heldur enn at fáa skattgjaldaranum sum mest burturúr. Váðin kann vera so ymisligur, og váðin kann vaksa í stórum í tí ógreiðu og óvissu, sum eru í slíkum avhendingum.

Til dømis kann seljari lata samstarvsfeløgum fyritøkuna, afturfyri at hann fær part av virðinum, sum skattgjaldarin missir, ella kann seljari keypa fyritøkuna sjálvur undir lagaligum treytum. Leiðslan á fyritøkuni, sum verður seld, kann eisini vera freistað til at goyma virði av ymiskum slagi. Síðani kann leiðslan, um fyritøkan verður einskild, fáa ágóðan. Annaðhvørt beinleiðis við at beina av vegnum virði (t.d. ognir, ið eru til yvirs), ella óbeinleiðis, við at góður prísur fæst fyri fyritøkuna, og at teirra umdømi sum stjórar á tann hátt verður styrkt.

Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, um seljarin hevði hóskandi mannagongdir fyri, hvussu bjóðarar vórðu vrakaðir, og hvussu áhugamálini hjá almenninginum í royndum vórðu vard.

Ríkisgrannskoðanin eigur at staðfesta, hvør hevði ábyrgdina av at góðkenna og avgreiða søluna, og hvussu henda ábyrgd varð býtt út á fólk.

Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, um staturin fekk allan peningin frá søluni, ella um partur av honum hvarv "í aðrar lummar".

Gáloysni seljarans kann hava við sær, at einskiljingin verður framd, og eingin gevur sær far um áhugamálini hjá almenninginum. Hetta hevur komið fyri, t.d. tá ið seljarin ikki gav øllum bjóðarum somu atgongd til upplýsingar um fyritøkuna. Á tann hátt komu nakrir bjóðarar at standa sterkari enn aðrir, og soleiðis varð kappingin um fyritøkuna doyvd.

Ósambærilig áhugamál kunnu koma fyri, tá t.d. leiðsla og/ella ráðgevar, sum kenna trúnaðarupplýsingar, hava fingið serstøðu sum bjóðarar.

Í mongum førum, tá ið einskiljingin ikki er farin rætt fram, fær almenningurin tað at vita. Slíkar upplýsingar kunnu hjálpa ríkisgrannskoðanini í kanningunum. Men slíkar fráboðanir kunnu vera ófullfíggjaðar ella skeivar, og embætismenn og onnur, eitt nú bjóðarar, kunnu venda sær til ríkisgrannskoðanina við vón um, at hon gevur teimum uppreisn. Eru álítandi upplýsingar ikki tøkar, kann tað seta ríkisgrannskoðanina í óhepna støðu. Sjálvt um slík prógv eru til, kunnu onnur, ið eru við í einskiljingini, muta ímóti, at upplýsingarnar verða almannakunngjørdar, og vísa á, at talan er um handilsloynidómar.

*Royndir vísa, at tað tænir áhugamálunum hjá øllum, ið vilja, at sølan fer rætt fram, at allir luttakarar í søluni vita, at ríkisgrannskoðanin, fyri at verja áhugamálini hjá almenninginum, púra óheft og nágreiniliga kann kanna søluna, og at úrslitið av kanningini kann verða almannakunngjørt.*

## 3.10 <u>Hvussu mál, ið liggja eftir, verða viðgjørd</u> (leiðregla 12)

### *3.10.1 Evni:*

Hvørji stig skal ríkisgrannskoðanin taka til tess at meta um, hvussu staturin viðger mál, ið ikki eru loyst, eftir at almenn fyritøka er seld?

### *3.10.2 Hví evnið er umráðandi:*

Í flestu førum situr staturin eftir við ábyrgdini av óloystum málum, tá ið almenn fyritøka er seld. Hvussu skjótt og væl hesi mál verða loyst ávirkar uttan iva búskapin hjá statinum, bæði bráðfeingis og í longdini, tí ábyrgdin kann føra til krøv um at gera almennan pening upp, og krøv um, at alment tilfeingi verður umsitið væl og virðiliga. Ríkisgrannskoðanin skal tí kanna, hvussu mál, ið liggja eftir, tá ið almenn fyritøka er seld, verða viðgjørd.

### *3.10.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal meta um, hvørt staturin hevur nóg góðar fyriskipanir at loysa tey mál, ið liggja eftir, tá ið einskilt er. Hon skal staðfesta, um almennir roknskapir ella tjóðarroknskapur geva rætta mynd (uppgjørd í nøgd, tá ið tað ber til) av teim ognum ella skyldum, sum liggja eftir hjá tí almenna.***

#### *3.10.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Nógvar orsøkir kunnu vera til, at óloyst mál eru eftir eina einskiljing. Nøkur kunnu vera íkomin, tí staturin gjørdi av, at einskiljingin skuldi ikki fevna um allar lutir, ella at staturin av øðrum orsøkum ikki kundi sleppa sær undan øllum virksemi ella ábyrgdum, sum standast av fyritøkuni, ið verður seld, t.d.:

- at umsita skyldur hjá partaeigarunum,
- eitt ófullfíggjað lógarverk,
- rættarmál, har úrskurður ikki er sagdur,
- skyldur mótvegis starvsfólki (tænastumannaeftirlønir) ella ognum, sum vórðu hildnar uttanfyri søluna.

Aðrir spurningar kunnu stinga seg upp sum beinleiðis avleiðing av sølutilgongdini, t.d. hvussu verða endurgjøld og veðhøld gjørd upp í sølu- og keypsavtaluni, ella hvussu skulu tey umsita ognir, ið liggja eftir?

Dømi um tílíkar skyldur eru:

- at endurgjøld verða veitt teimum, sum hjálpa seljara í sambandi við partabrævasølu (íløgubankar o.o.),
- leiðslan á fyritøkuni sleppur undan ábyrgd í sambandi við almannakunngjørd prospekt,
- lán og skyldur hjá fyritøkuni, sum er einskild,
- mál sum ikki síggjast í fíggjarstøðuni.

Dømi um eina skyldu, sum liggur eftir, kann vera umsitingin av einum leigusáttmála, tá ið keyparin hevur atgongd til lendi, sum er almenn ogn og ikki er fevnd av søluni, t.d. lendi undir jarnbreyt, sum er einskild.

Aðrir vandar kunnu vera t.d., at eingin loysn er, hvussu mál, ið liggja eftir, skulu verða umsitin; skjøl verða burtur; og vandin fyri, at stovnurin (seljarin) missir vitan, tá ið starvsfólk fara í onnur størv.

Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørji lyfti seljarin gav tí, ið keypti fyritøkuna, og um tey vórðu mett í virði (kvantifiserað), og hvussu seljarin royndi at verja áhugamálini hjá skattgjaldaranum, t.d. við at áseta tíðaravmarkingar, fíggjarlig mørk ella aðrar avmarkandi avtalur.

Ríkisgrannskoðanin skal greidliga skilja, hvørji óloyst mál eru eftir einskiljingina og fáa vissu fyri, at staturin tekur sær væl og støðugt av sínum ognum og skyldum, so leingi tær eru. Óloystu málini kunnu fevna um viðurskifti, sum fara út um tær skyldur, sum liggja eftir hjá statinum. T.d. í sambandi við hópeinskiljingar kann tað henda, at nógvar fyritøkur verða einskildar eftir stutta tíð, og í tilgongdini eru týdningarmiklir spurningar um ábyrgdirnar hjá nýggju eigarunum ikki viðgjørdir. Ríkisgrannskoðanin má støðugt hava umsjón við, hvørjar skyldur liggja eftir hjá statinum, serliga um tær eru ógreiðar, og um støða ikki var tikin til tær, tá ið einskilt varð.

# 4 Øki 3: Trade sales (beinleiðis søla av landsfyritøku til aðra fyritøku)

## 4.1 <u>Uttanhýsis ráðgeving, ið seljari hevur fingið sær</u> (leiðregla 13)

### *4.1.1 Evni:*

Hvørji stig skal ríkisgrannskoðanin taka fyri at tryggja sær, at seljari fyri rímiligan kostnað útvegaði sær góða uttanhýsis ráðgeving, sum hann brúkti í allari sølutilgongdini?

### *4.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Ofta tilnevnir seljari ráðgevar, ið skulu stuðla honum í at umsita sølutilgongdina og geva ráð viðvíkjandi søluni. Góð uttanhýsis ráðgeving kann hava avgerandi týdning fyri, hvussu væl sølan eydnast.

### *4.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørja mannagongd seljarin nýtti, tá hann gjørdi av, hvørjar serfrøðingar og óhefta uttanhýsis ráðgeving honum tørvaði fyri at fremja søluna. Og hvussu seljarin tryggjaði sær, at ráðgevingin var so holl og ódýr, sum til ber.***

### *4.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Bert í undantaksføri hevur seljari allan tann førleika, ið krevst fyri at hava umsjón við øllum lutum, tá ið almenn fyritøka verður seld aðrari fyritøku. Førleikin, ið er neyðugur til tess at tryggja eitt nøktandi úrslit, kann vera ymiskur, alt eftir hvør fyritøka verður seld. Vanliga heitir seljari á nakrar útvaldar søluráðgevar um at bjóða upp á tænastuna at ráðgeva og stuðla honum í sølutilgongdini. Søluráðgevar skulu ikki bara hava neyðuga førleikan og hava kravda kunnleikan til marknaðin, sum fyritøkan virkar á, men teir skulu heldur ikki hava ósambærilig áhugamál í fyritøkuni, sum verður seld. Í lítlum búskapum kann hetta seinna fyrilitið útiloka summar søluráðgevar, tí har er oftari áhugamál, sum skarast.

Ríkisgrannskoðanin má kanna, um ein mannagongd var fyriskipað at velja út ráðgevar, sum bæði tryggjaði seljaranum óhefta ráðgeving, og at ráðgevingin hevði neyðuga førleikan. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt samsýningin, sum varð goldin søluráðgevunum, var rímilig, gjøgnumskygd, og um hon eggjaði ráðgevunum til at veita seljaranum best møguliga tænastu. Verður samsýning goldin sum prosentpartur av endaliga søluprísinum, skal ríkisgrannskoðanin vissa seg um, at avleiðingin av at fáa hægri sølupr ís ikki er, at tað tók ov langa tíð at gera avtaluna, ella at lyftir um veðhald og endurgjald máttu verða givin.

Ógvuliga ymist er, hvussu søluráðgevar verða løntir. Summir fáa fasta upphædd, aðrir fáa prosentpart av søluprísinum, og aftur aðrir verða tímaløntir. Allir lønarhættir hava fyrimunir og vansar. Men upphæddirnar, talan er um, eru sjáldan týdningarleysar, hvørki í tølum, politiskt ella fyri almenningin. Tí vil samfelagið vera sannført um, at upphæddirnar til søluráðgevararnar eru rímiligar, alt eftir umstøðunum. Um sølukostnað, sí eisini leiðreglu 39 (Um at leggja fíggjarætlan og hava eftirlit við henni).

## 4.2 <u>**Leiðslan á almennu fyritøkuni**</u> (leiðregla 14)

### *4.2.1 Evni:*

Hvønn grannskoðanarváða skal ríkisgrannskoðanin hava í huga við atliti at leiðslu og starvsfólkum á almennari fyritøku, sum verður seld?

### *4.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

Fyri at varðveita rættlæti í søluni og fyri at tryggja besta søluúrslitið, hevur tað týdning at tryggja, at leiðsla og starvsfólk ikki gera nakað, ið máar støðið undan sølutilgongdini.

### *4.2.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal staðfesta, hvørt leiðsla og starvsfólk á almennu fyritøkuni, sum varð seld, bóru seg dugnaliga at, á ein hátt sum miðvíst stuðlaði upp undir rættlætið í sølutilgongdini, og sum best arbeiddu fyri áhugamálum seljarans.***

### *4.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Leiðslurnar á almennum fyritøkum, sum eru til sølu, eru undir nógvum trýsti, meðan einskiljingin fer fram. Ofta verður heitt á leiðsluna, og væntað verður av henni, at hon letur roknskaparligar og aðrar upplýsingar um fyritøkuna, eisini at hon svarar fyrispurningum frá seljara, frá søluráðgevum og bjóðarum, sum øll fáa júst somu sømdir. Samstundis skal leiðslan røkja sínar dagligu skyldur og hava ábyrgd, sum millum annað kann vera at taka sær av tí ampa, sum er á starvsfólki, tí óvist er, hvussu einskiljingin ávirkar teirra framtíð. Starvsfólk í leiðsluni skulu vera tøk í einskiljingartilgongdini, samstundis sum tey skulu taka støðu til, hvørja ávirkan einskiljingin hevur á teirra støðu og starvsmøguleikar. Ynskiligt er, at høvuðsfólk í leiðsluni í øllum førum verða við í tilgongdini, og møguliga er neyðugt at eggja hesum bólki at verða verandi í starvi, til einskiljingartilgongdin er av (við partabrøvum fyri lægri prís o.s.fr.).

Hesi starvsfólk hugsa eisini um sína egnu framtíð, og tí kunnu tey verða freistað til at vísa einum bjóðara vælvild fram um annan fyri at tryggja síni egnu setanarviðurskifti í framtíðini, annaðhvørt hjá tí almenna ella hjá nýggja eigaranum. Tey kunnu skifta trúskap frá seljara til keypara, tá ið sáttmálin er undirskrivaður.

Ríkisgrannskoðanin má gáa um, hvørja ávirkan tað kann hava á úrslitið av einskiljingar-tilgongdini, og ríkisgrannskoðanin má sannføra seg um, at seljarin visti um og byrgdi upp fyri hesum vanda, t.d. við at áseta greiðar reglur fyri samskiftinum, ið leiðsla og starvsfólk hava loyvi at hava við bjóðarar.

Í “Øki 4” (leiðreglur 21-23) í hesi vegleiðing verða aðrir spurningar viðgjørdir, sum stinga seg upp, tá ið leiðsla ella starvsfólk bjóða upp á fyritøku.

## 4.3 <u>**Hvussu almenn fyritøka verður marknaðarførd**</u> (leiðregla 15)

### *4.3.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, hvussu sølan av fyritøkuni varð marknaðarførd?

### *4.3.2 Hví evnið er umráðandi:*

Ein væleydnað søla er, tá ið kapping hevur verið millum bjóðararnar. Seljarin má hugsa um, hvør søluháttur hóskar best fyritøku av tí slagi, ið verður seld, og hvussu bjóðarar verða kunnaðir um henda íløgumøguleika. Vandi er fyri, at seljari, orsakað av vantandi royndum ella stuttskygni, ikki kannar marknaðin nóg gjølla.

### *4.3.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu tað eydnaðist seljara at vekja ans millum keyparar fyri innløgumøguleikunum hjá fyritøkuni, ið boðin varð til sølu.***

### *4.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Roknað verður ikki við, at kapping tekur seg upp, fyrr enn seljari tekur stig til at eggja viðkomandi bjóðarum at halda seg til. Dømi eru um, at fyritøkur eru seldar einasta bjóðaranum, tí seljarin vendi sær til starvsfólk og bað tey leggja inn boð, og sannlíkt var, at einki annað boð fór at verða. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um fyritøkan varð lýst til sølu í vinnubløðum o.l., og um seljarin hugsaði um at gera eina hóskandi marknaðarkanning fyri at finna fram til keyparar, og hvat úrslitið var av kanningini. Vóru miseydnaðar royndir gjørdar, áðrenn fyritøkan varð seld, eigur ríkisgrannskoðanin at kanna orsøkina, hvør eykakostnaður stóðst av tí, hvat vit kunnu læra av tí, og hvussu forðað kann verða fyri slíkum miseydnaðum søluroyndum í framtíðini.

Eisini skal ríkisgrannskoðanin kanna, um seljarin hevði nóg gott fyrilit fyri lógarásetingum, bæði innanlands og altjóða krøvum, sum kundu hava ávirkan á, hvussu fyritøkan varð marknaðarførd. Og eisini hvørt seljarin leyk altjóða útbjóðingarreglur um at veita almenna tænastu ella keypa almenna ogn.

Ríkisgrannskoðanin eigur serliga at ansa eftir, um seljari – fyrilitarleyst – hevur lagt dent á avmarkingar, sum umbering fyri ikki at vera nóg ágrýtin at marknaðarføra fyritøkuna, og at tað hevur minkað um møguleikan at fáa fullan prís fyri fyritøkuna.

## 4.4 Kunning til "áhugaðar keyparar" (leiðregla 16)

### *4.4.1 Evni:*

Hvussu verða bjóðarar kunnaðir?

### *4.4.2 Hví evnið er umráðandi:*

Av ymiskum lógarásetingum, m.a. fyrilitum fyri handilsligum trúnaðarupplýsingum, men eisini fyri at vekja ans og birta upp undir kappbjóðing, kann seljarin í fyrstu atløgu gera av ikki at geva øllum hugsandi bjóðarum víðfevndar upplýsingar um fyritøkuna. Hinvegin skal seljarin eggja til at bjóða fyrstu ferð og minka um vandan fyri, at bjóðarar, sum verða valdir út, lækka tilboðini seinni í tilgongdini.

Atgongdin til kunningartilfarið skal vera javnbjóðis, annars er vandi fyri, at bjóðararnir missa álitið á, at sølan fer rætt og reiðiliga fram.

### *4.4.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt seljarin hugsaði um, nær onkur kundi fáa fyrimunir, tá ið hann útvegaði bjóðarum upplýsingar, og um seljarin tryggjaði sær, at allir bjóðarar vórðu javnbjóðis kunnaðir um smálutirnar.***

### *4.4.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Um seljari ikki tryggjar øllum bjóðarum nóg góðar upplýsingar javnbjóðis, er vandi fyri, at bjóðarar taka seg aftur, lækka boðið nógv ella lækka boðið seinni í sølutilgongdini, um t.d. upplýsingar, sum seinni eru latnar teimum, fær teir at lækka sína virðismeting av fyritøkuni. Um keypari ikki verður varugur við hesar upplýsingar fyrrenn eftir søluna, kann tað hava við sær, at endurgjaldskrav verður reist.

## 4.5 Mett verður um tilboð (leiðregla 17)

### *4.5.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, hvussu seljari viðgjørdi innkomnu boðini?

### *4.5.2 Hví evnið er umráðandi:*

Um seljari ikki hevur reglur fyri, hvussu innkomnu tilboðini skulu verða viðgjørd, er vandi fyri, at úrslitið av søluni ikki verður tað best møguliga. Tað kann vera trupult at staðfesta nøktandi reglur, serliga um endamálini við søluni eru í andsøgn við hvørt annað, og um nøkur teirra eru kvalitativ, t.d. at geva kensluna av, at sølan er væleydnað.

Verða boðini ikki javnbjóðis viðgjørd, verður trupult hjá seljara at vísa á, í hvønn mun søluavtalan leyk sølutreytirnar, og vandi er fyri, at seljari verður ákærdur fyri at hava borið seg óreiðiliga at.

### *4.5.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna sambært hvørjum reglum, seljarin metti um tilboðini, sammeta við endamálini við søluni og eftirkanna, hvussu hegnisliga seljari nýtti hesar reglur, tá ið hann metti um innkomnu tilboðini.***

### *4.5.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Um greiðar ásetingar ikki eru fyri, hvussu tilboðini skulu verða mett, kann seljari ikki meta um, um tilboðini røkka endamálunum við einskiljingini. Um eingin ætlan er fyri, hvussu mett verður um tilboð, m.a. hvussu ymisku krøvini verða raðfest, verður trupult at grundgeva fyri, hví tað er rætt og rættvíst at taka ein ávísan bjóðara burturúr. Tað kann vera trupult, tí at endamálini við søluni draga ofta hvørt sína leið, og øll teirra kunnu ikki verða mátað (í tølum). Í slíkum førum kunnu seljarar viga krøvini ymiskliga, men í roynd og veru verða slík krøv óformliga samansett eftir egnum ynski, og tí er trupult at eftirkanna, um framferðin er tann sama í øllum førum. Sjálvt um tað eydnast seljara at nýta somu krøv javnan, er vandi fyri, at metingin verður ov ósmidlig. Ov stórur dentur verður lagdur á tað, sum kann verða mált og mátað (t.d. prís), og minni dentur verður lagdur á meira kvalitativar síður, sum ikki hava minni týdning (t.d. hvørjir møguleikar eru at velja ávísan bjóðara – royndir, fíggjarlig styrki, vitan o.s.fr.), og tað kann gloppa dyrnar til misnýtslu.

Vandin fyri at nýta eina ov mekaniska (stirvna) meting veksur, tá ið seljari veruliga vil minka møguleikan fyri korruptión millum teirra, ið meta um fyritøkuna. Sami veikleiki kann gera um seg, um seljari – í staðin fyri at leggja dent á ymisklig krøv – tekur eitt endamál framum, sum kann verða mátað í tølum, og sum sær øll onnur endamál sum avmarkingar, ið skulu verða fyribeindar.

Fáa bjóðarar einki at vita um, hvussu mett verður um boð, kunnu teir ikki lata tilboð inn, sum eftir sannlíkindum lúka krøvini hjá seljara, sama hvussu seljari metir um tilboðini. Krøvini eiga at hóska til júst ávíst lið í einskiljingartilgongdini, og tey eiga ikki at vera so ósmidlig, at tey forða fyri, at nýhugsandi og øðrvísi tilboð verða send inn. Ríkisgrannskoðanin skal meta um, hvussu væl tað eydnaðist seljara at handfara hesar truplu spurningar. Í summum førum ber til at kanna tað í einari einstakari sølu. Í øðrum førum, tá ið fleiri sølur fara fram í senn, kann tað vera skilabetri hjá ríkisgrannskoðanini at kanna tær skipanir, sum seljarin hevur brúkt til at meta krøvini eftir.

At grannskoða, hvussu seljari fer um tilboðini, setur ivaleyst tekniskt størstu krøvini, tá ið einskiljing verður grannskoðað. Ríkisgrannskoðanin má búgva seg út við rætta førleikanum til hetta arbeiðið (sí leiðreglu 1 og 2).

## 4.6 <u>Um at velja nakrar bjóðarar burturúr</u> (leiðregla 18)

### *4.6.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, hvussu seljari avgjørdi, hvørji tilboð skuldu verða vald burturúr?

### *4.6.2 Hví evnið er umráðandi:*

Fyri at kunna samráða seg fram til endaliga sølu, má seljari skerja talið á bjóðarum og kortini ikki skerja kappingina millum boðini.

### *4.6.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt reglur og mannagongdir seljarans at velja nakrar bjóðarar burturúr, vóru væl umhugsaðar og samsvaraðu við endamálini við søluni. Eisini***

***hvussu seljarin fekk javnvág millum at samráðast við ikki ov fáar bjóðarar og ikki ov nógvar.***

### *4.6.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Um so og so nógv innleiðandi tilboð lúka krøv um einskiljing, má seljari taka støðu til, um hann skal minka um talið á bjóðarunum í næsta bjóðingarumfari. Royndirnar vísa, at seljarar ofta gera tað, tí teir vóna, at einskiljingin fer at ganga skjótari. Ein grundgeving er, at tess fleiri bjóðarar eru við í øðrum bjóðingarumfari, tess minni eru sannlíkindini hjá einstaka bjóðaranum fyri, at hansara boð vinnur. Tá ið bjóðarar fækka í tali, veksur kappingin teirra millum. Um seljari ikki skørar í hesi kapping og streingir á at fullføra søluna, fara teir bjóðarar, sum bodnir eru við til annað umfar, at lækka upprunaliga tilboðið. Tað kann minka um endaliga søluprísin, og tað hevur hent í fleiri førum.

Seljari má eisini síggja til, at hann heldur bjóðarum, sum veruliga ætla nakað, til kappingina so leingi, sum til ber. Tað kann henda, at bjóðari, sum endaði við vinna við sínum boði, var aftarlaga í fyrsta bjóðingarumfari. Tí eru fleiri seljarar komnir til ta niðurstøðu at royna so vítt til ber at hava minst trý boð við í kappingini so leingi sum gjørligt. Ríkisgrannskoðanin eigur at meta um hesi viðurskifti, og um avgerðirnar, seljarin tók, tá ið hann tók bjóðarar burturúr, gjørdu sítt til, at einskiljingin var væleydnað ella minni væleydnað.

Tá ið ríkisgrannskoðanin letur inn frágreiðing um hetta týðandi liðið í einskiljingartil-gongdini, er ríkisgrannskoðanin ógvuliga sannlíkt undir stórum trýsti frá lóggávutingi og almenningi um at upplýsa nøvnini á teimum, sum hava latið inn tilboð, hvussu nógv teir bjóðaðu, og hvørjar treytir vóru knýttar at boðnum. Teir, ið bjóða, royna hinvegin ofta at fáa lyfti frá seljaranum um, at upplýsingar, um hvørjir teir eru, og hvat teir hava boðið, verða latnar teimum í trúnaði. Serliga um boðið ikki vinnur. Í slíkum førum má ríkisgrannskoðanin taka støðu til, um tað er í andøgn við áhugamálini hjá almenninginum at halda upplýsingarnar loyniligar. Kemur ríkisgrannskoðanin til ta niðurstøðu, at slíkar próvgrundir eru “tvingandi” (t.d. fyri ikki at forða fyri at tilboð verða givin í komandi einskiljingum), skal ríkis-grannskoðanin hugsa um at lata hesar upplýsingar til lóggávutingið í einari frágreiðing, sum verður hildin loynilig.

## 4.7 <u>Um at taka ein bjóðara fram um aðrar (preferred bidder)</u> (leiðregla 19)

### *4.7.1 Evni:*

Hvørjar partar av seinastu samráðingunum, sum seljari hevði við endaliga bjóðara, skal ríkisgrannskoðanin kanna?

### *4.7.2 Hví evnið er umráðandi:*

Í fyrsta og øðrum umfari í sølutilgongdini eru tilboðini mangan treytað. Einasti máti at sleppa av við treytaðu tilboðini kann vera at taka ein bjóðara burturúr til samráðingar við tí í hyggju at skriva undir sølusáttmála.

### *4.7.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um seljari hevði metingarstøði at arbeiða eftir, tá ið hann tók ein bjóðara fram um aðrar. Um hetta samsvaraði við endamálini við søluni, og um metingarstøðið varð brúkt.***

#### *4.7.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Seljari eigur at kunna vísa á, at bjóðari, sum varð tikin burturúr, var bjóðarin, sum best leyk søluendamálini; sum fór at verða góðtikin av øllum luttakarum, sum høvdu áhuga í einskiljingini; og ein, sum ikki fór at taka boðið aftur ella at royna at minka munandi um boðið í teimum endaligu samráðingunum. Ríkisgrannskoðanin eigur at sannføra seg um, at tá ið seljari tók bjóðaran burturúr, hevði seljarin tikið støðu til teir trupulleikar, ið kundu stinga seg upp í samráðingunum, og at seljarin hevði vissu fyri, at bjóðarin, sum var tikin burturúr, hevði fíggingina í lagi og kundi fullføra keypið.

### 4.8 <u>Endaligu samráðingarnar</u> (leiðregla 20)

#### *4.8.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin kanna endaligu samráðingarar millum seljara og bjóðara, sum er tikin framum?

#### *4.8.2 Hví evnið er umráðandi:*

Vandi er fyri, at bjóðari, ið er tikin framum, í teimum seinastu samráðingunum, ger sær dælt av sterku samráðingarstøðu síni sum tann, ið er tikin framum.

#### *4.8.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørji stig seljari tók at forða fyri vandanum, at útvaldi bjóðarin móti endanum á samráðingunum royndi at lækka munandi um boðið, og at endaligu sølutreytirnar ikki vóru verri enn tær, ið annar bjóðari kundi boðið.***

#### *4.8.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Ein útvaldur bjóðari tingast vanliga einsamallur við seljaran, og um seljarin ikki hugsar seg væl um í hesum liði í einskiljingartilgongdini, kann útvaldi bjóðarin trýsta søluprísin niður ella krevja aðrar veitingar, t.d. endurgjøld.

Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørji tiltøk seljarin setti í verk fyri at minka um henda váða. Trygdaratgerðir kunnu vera:

- minstiprísur, sum byggir á eina djúptøkna meting av fyritøkuni (sí leiðreglu 9);
- at upplýsingar, sum kunnu fáa bjóðara at lækka sína meting av virðinum á fyritøkuni, sum verður seld, verða almannakunngjørdar so tíðliga, sum til ber;
- at tiltøk verða sett í verk, sum tryggja, at spenningurin í samráðingunum við útvalda bjóðaran verður varðveittur, soleiðis at ein avtala verður gjørd skjótast gjørligt, sum eisini samstundis gevur eitt nøktandi úrslit;
- at dyrnar ikki verða latnar aftur fyri øðrum bjóðarum, soleiðis at teir kunnu verða bodnir aftur til samráðingarborðið, um útvaldi bjóðarin roynir at vinna sær ov stórar fyrimunir.

## 5 Øki 4: Søla til leiðslu ella starvsfólk (Management Buy-Outs)

### 5.1 <u>Um at tryggja rættvísa kapping</u> (leiðregla 21)

#### *5.1.1 Evni:*

Í hvørjum trygdarreglum skal ríkisgrannskoðanin leita sær ráð, tá ið leiðsla og starvsfólk umframt uttanhýsis bjóðarar, kunnu bjóða upp á fyritøkuna?

### *5.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Seljari kann eggja leiðslu og starvsfólki til at bjóða upp á fyritøkuna, bæði fyri at vísa uttanhýsis bjóðarum, at fyritøkan er verd at keypa og fyri at eggja leiðslu og starvsfólki til at verða verandi, meðan fyritøkan verður seld. Leiðslan kennir fyritøkuna betur enn nakar, so setir seljarin ikki í verk serligar trygdaratgerðir, er vandi fyri, at uttanhýsis bjóðarar verða stygdir burtur til bága fyri søluna.

### *5.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu seljarin royndi at tryggja sær rættvísa viðgerð av leiðslukeyparabólki og uttanhýsis bjóðarum, herímillum hvussu kunningartilfar varð útvegað ymisku pørtunum.***

### *5.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Leiðslan á fyritøkuni kann hava fyrimunir í sambandi við sølusamráðingarnar. Tætta sambandið og kunnleikin hjá leiðsluni um virksemi, styrki og veikleikar hjá fyritøkuni, kunnleikin um viðskiftafólkið og framtíðarútlitini gevur leiðsluni ein “inside” fyrimun, tá ið bjóðað verður upp á fyritøkuna. Leiðslan kann eisini royna at styggja burtur uttanhýsis bjóðarar við at geva svartskygdar upplýsingar um vinnuútlit.

Fyri at byrgja upp fyri hesum váða skal seljarin hugsa um at halda leiðslu og starvsfólk, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru partar av leiðslubólki, sum ætlar at keypa fyritøkuna, burtur frá at taka avgerðir. Tað verður eisini mælt seljara til at áseta reglur fyri, hvussu leiðslukeyparabólkurin skal bera seg at, reglur sum t.d. áleggja teimum at skráseta síni áhugamál og at greina út, hvørjar upplýsingar teir kunnu geva teimum, ið skulu fíggja ætlaða keypið.

Heilt óheft eigur at verða farið ígjøgnum tær upplýsingar, sum verða latnar øllum bjóðarum, fyri at tryggja, at tær eru sannar.

Neyðugt er hjá ríkisgrannskoðanini at kanna, hvørt seljari tryggjaði so væl, sum til bar, at allir bjóðarar javnbjóðis sluppu framat somu upplýsingum um fyritøkuna, og at væl varð hugsað um dygt eftirlit við, at “inside information” ikki varð misnýtt. Hetta er serliga týdningarmikið, tá ið partur av leiðsluni er ein av bjóðarunum. Eitt tiltak kann vera, at eitt “dáturúm” verður skipað, sum allir bjóðarar undir eftirliti kunnu nýta. Seljari, ella umboð fyri seljara, skal altíð vera til staðar, tá ið fundir eru millum leiðslu á fyritøkuni og bjóðarar, fyri at tryggja, at allir bjóðarar javnbjóðis sleppa fram at somu upplýsingum. Allar upplýsingar, sum bjóðari biður um, og sum verða útvegaðar bjóðarum, skulu verða skrásettar, fyri at tryggja at hesar upplýsingar eisini verða sendar øllum øðrum bjóðarum. Á henda hátt eigur seljari at stremba eftir at tryggja uttanhýsis bjóðarum somu upplýsingar sum innanhýsis bjóðarum um tíðina, sum farin er, og um framtíðarútlitini hjá fyritøkuni.

Viðhvørt hevur seljari gjørt av ikki at loyva leiðslu ella starvsfólki at bjóða uppá fyritøkuna, fyrr enn ein uttanhýsis bjóðari er valdur burturúr. Tá er komið hagar, at keypari og leiðslukeyparabólkur kunnu sleppa at samráðast við seljaran.

## 5.2 Um at eggja til keyp (leiðregla 22)

### *5.2.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin hava í huga, tá ið hon metir um, hvussu skilagott tað er at eggja leiðslu og/ella starvsfólki at bjóða upp á fyritøkuna?

### 5.2.2 Hví evnið er umráðandi:

Ov ógvuslig tilstuðling, sum birtir uppundir, at leiðsla og/ella starvsfólk bjóða upp á fyritøkuna, serliga um áeggjanin er illa útgreinað ella ikki almannakunngjørd, kann styggja bjóðarar burtur, og tí hava skerdan søluprís við sær.

### 5.2.3 Leiðregla:

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um einhvør eggjan, sum varð boðin leiðslukeyparabólkinum, var væl umhugsað og samsvaraði við endamálini við søluni, og ríkisgrannskoðanin skal meta um, hvørja ávirkan tað hevði á søluvinningin, og um allir bjóðarar vórðu kunnaðir um smálutirnar í eggjanini.***

### 5.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:

At seljarin eggjar leiðsluni til at bjóða upp á fyritøkuna, er fyri at skapa kapping við uttanhýsis bjóðarar, og/ella tryggja áhugamálini hjá fyritøkuni og varðveita góða moralin hjá leiðslu og starvsfólki.

Tilstuðling til leiðslu og starvsfólk kann til dømis vera hjálp at rinda fyri kostnaðin at geva eitt boð. Ella at seljari avger at taka boðið frá leiðsluni framum, um tað bert víkur ávísan prosentpart frá besta boðnum, og um boðið annars er nøktandi í aðrar mátar.

Innihaldið og virðið í slíkum tilstuðlingum, og tær umstøður, har tær kunnu verða nýttar, eigur seljari at hugsa væl um, og hesar upplýsingar eiga at verða givnar øllum bjóðarum frammanundan. Ber tað til, eiga tær at vera almannakunngjørdar, annars kunnu uttanhýsis bjóðarar verða stygdir burtur. Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, um seljarin hugsaði um at taka fíggjarliga stuðulin til leiðslukeyparabólkin aftur, tá ið leiðslukeyparabólkurin hevði funnið aðra vinnuliga fígging.

Í summum førum er einki virði í tilstuðlingini, t.d. um leiðslukeyparabólkurin ikki hevur førleikan til at reka fyritøkuna við góðum úrsliti. Í øðrum førum kunnu boð frá leiðsluni, um tey verða stuðlað, hava við sær eitt betri søluúrslit enn annars møguligt. Dømi er um, at tá ið 10 deildir í almennari fyritøku vórðu seldar, vórðu 4 seldar leiðslukeyparabólkum, sum samanlagt bøttu søluinntøkurnar, og boðini frá uttanhýsis bjóðarum vóru hægri av teirri kapping, teir fingu frá leiðslukeyparabólkunum.

Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt sølutreytirnar høvdu ta ávirkan, at vinningurin endaði í hondunum á nøkrum fáum útvaldum í leiðsluni, sum hvørki var til fyrimunar fyri vanliga starvsfólkið ei heldur skattgjaldaran.

## 5.3 <u>Um at tryggja best møguligan søluprís</u> (leiðregla 23)

### 5.3.1 Evni:

Hvat skal ríkisgrannskoðanin kanna fyri at staðfesta, um seljarin fekk fult virði fyri at selja fyritøkuna til leiðsluna?

### 5.3.2 Hví evnið er umráðandi:

Nógv dømi eru um, at leiðslukeyparabólkar hava keypt fyritøkur og síðan eftir stuttari tíð selt tær aftur við stórum vinningi til sín sjálvs og teir, ið hava fíggjað keypið. Hetta kann seta einskiljingartilgongdina í ringt ljós, tí upprunaliga sølan ikki gav skattgjaldaranum best møguligan prís.

### *5.3.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørji stig seljarin tók, við atliti at sølutreytunum, fyri at minka um váðan fyri, at almenna fyritøkan varð keypt bíliga av leiðslukeyparabólkinum, tí teir forðaðu øðrum bjóðarum at sleppa framat.***

### *5.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Av tí at leiðslan hevur stóra vitan um fyritøkuna, er váðin tann, at leiðslan keypir fyritøkuna fyri ein lágan prís og við lagaligum sølutreytum. Tað gevur leiðsluni møguleika at selja fyritøkuna fyri fult virði stutt eftir søluna. Størsta trygdin móti hesum váða er ein sølutilgongd, sum fer fram í kapping – stuðlað av einari virðismeting, seljarin hevur gjørt av fyritøkuni (sí leiðreglu 9) – sum er grundað á, at allir bjóðarar hava javnbjóðis atgongd til týdningarmiklar upplýsingar. Aðrar trygdaratgerðir eru, at ein ella fleiri óheftir limir av leiðsluni verða settir í leiðsluna við teirri uppgávu at geva seljaranum eina greiða mynd av lívførinum og útlitunum hjá fyritøkuni. Metingarnar hjá óheftu limunum í leiðsluni verða samanbornar við metingarnar hjá leiðslukeyparabólkinum og hjá øðrum bjóðarum. Harafturat skulu óheftu limirnir í leiðsluni tryggja, at onnur mál, eitt nú at allir bjóðarar hava javnbjóðis atgongd til upplýsingar, verða tryggjað. Harafturat skulu skipanir, sum forða fyri ósambæriligum áhugamálum, vera settar í verk.

Seljari kann halda tað vera skynsamt at halda limum í leiðslukeyparabólkinum burtur frá at taka avgerðir á serligum økjum, eitt nú tá ið einskiljingin verður fyrireikað; eisini tá ið ognir og tilfeingi verða umskipað; tá ið partar av fyritøkuni verða seldir, áðrenn sjálv einskiljingin verður framd; tá ið skuldarviðurskifti verða umskipað; og ymiskar íløgur verða avgjørdar. Avgerðir, ið ávirka virðið á fyritøkuni.

Ríkisgrannskoðanin eigur eisini at kanna, hvørt seljarin hevur fyrilit fyri grannskoðanar-frágreiðingum um umskipanirnar, serliga um ríkisgrannskoðanin hevur funnið brek í um-skipanunum.

Tá ið sølan er tann fyrsta av fleiri nýggjum og kendum sølum, og tá ið marknaðurin í fyrstani er ivasamur, um einskiljingarnar fara at eydnast, eigur seljari at samráða seg fram til ein part av yvirskoti, sum fæst innan ávíst tíðarbil eftir einskiljingina. Serliga um fyritøkan verður seld víðari.

Í slíkum førum skal seljari hava í huga, at ein slík fyriskipan kann hava við sær, at lægri prísur fæst fyri fyritøkuna, um hon verður seld leiðsluni. Eitt dømi er um eina fyritøku við stórum virðum, sum ein lítil leiðslu- og starvsfólkabólkur keypti. Bólkurin hevði fingið fígging frá váðafúsum íleggjarum, svarandi til 750 mió.$. Sjey mánaðir seinni seldi bólkurin fyritøkuna fyri 1.200 mió.$. Leiðslukeyparabólkurin fekk ein fjórðing av vinninginum, váðafúsu íleggjararnir fingu restina. Ríkiskassin fekk einki av hesum stóra vinningi.

# 6 Øki 5: Hópeinskiljing/breiður keyparaskari (Mass Privatisations)

## 6.1 <u>Um at læra almenningin at vera íleggjarar</u> (leiðregla 24)

### *6.1.1 Evni:*

Hvørji stig skal ríkisgrannskoðanin taka til tess at tryggja, at almenningurin hevur nóg góðar upplýsingar um og skilir nóg væl hópeinskiljingartilgongdina, so at dygg undirtøka verður tryggjað frá tí partinum av almenninginum, sum kann hugsast at gera íløgur?

### *6.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Aðalmálið við hópeinskiljingum er sum skjótast at spjaða partabrøvini í almennum fyritøkum, sum verða seldar, til almenningin sum stakar íleggjarar. Hópeinskiljing verður nýtt í londum,

har almenningurin hevur lítlar ella ongar royndir sum íleggjarar. Fyri at stuðla almenninginum at gerast íleggjarar krevst, at seljari og ráðgevar hansara læra almenningin um einskiljingartilgongdina, um hvønn týdning, tað hevur, at eiga partabrøv, um rættindini hjá partaeigarum, um hvørji partabrøv verða seld o.s.fr.

### *6.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, hvussu almenn upplæring og almenn kunningarátøk virka og tær mekanismur, sum vórðu brúktar, tá ið týðandi upplýsingar vórðu latnar um almennar fyritøkur, sum seldar verða í eini "hópeinskiljing". Ríkisgrannskoðanin skal tryggja sær, at bæði upplýsingaháttur og upplýsingarnar sjálvar vóru nóg góð til, at íleggjarar kunnu taka væl grundaðar avgerðir.***

### *6.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

At broyta ognarviðurskifti er vanliga eitt týðiligt endamál við hópeinskiljing. Ætlanin við hópeinskiljing er at gera nakað við tann ójavna í ognarviðurskiftunum, sum hildið verður, at aðrir einskiljingarhættir hava við sær, serliga tí at arbeiðsfólk og almenningurin í síni heild hildu seg verða fevnd av kollektiva ognarrættinum, sum gamli planbúskapurin var grundaður á. Fyri at røkka hesum máli verður miðað eftir, at hópeinskiljingar fáa so nógvar íleggjarar, sum til ber, úr almenninginum. Kundi hent, at almenningurin sum heild ikki hevur nevniverdar royndir við privatum ognum, og at almenningurin veit lítið um týdning og rættindi, sum fylgja við partabrævaognum.

Kortini, so er eitt mát fyri, hvussu væleydnað hópeinskiljing hevur verið, júst hvussu væl borgararnir tóku undir sum íleggjarar. Almenn kunningarátøk og sakligar upplýsingar, sum lættar eru at fáa fatur á, um íløgumøguleikar eru týdningarmiklar, um almenningurin skal "broytast" til íleggjarar. Sjálvt í framkomnum marknaðarbúskapum er meginparturin av partabrøvunum ogn hjá pensiónsgrunnum og íløgufeløgum. Í USA, har lætt er at verða kunnaður um íløgur, eiga bara 22% av íbúgvunum virðisbrøv og partabrøv.

Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna slag, tíðarbil, útbreiðsluhátt, og hvussu nýtiligar fráboðanirnar í almennu kunningarherferðunum vóru, sum vórðu brúktar til at stuðla uppundir, at almenningurin ger íløgur. Harafturat skal ríkisgrannskoðanin kanna, um grundleggjandi upplýsingar vórðu útvegaðar um hvørja fyritøku, um upplýsingar um fíggjarlig avrik vóru álítandi, kanna starvssetanir, leiðslubygnað, og hvussu høvuðsframleiðsla og marknaðurin hjá einstøku fyritøkuni var lýst. Ríkisgrannskoðanin skal ansa eftir váðanum við, at inntøkur, yvirskot og fíggjarlig støða hjá fyritøkuni eftir øllum sannlíkindum eru yvirmett, og at ábyrgdin hjá leiðsluni mótvegis partaeigarunum ikki er nóg greidliga greinað.

## 6.2 <u>Millumgongumenn</u> (leiðregla 25)

### *6.2.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin kanna, um eftirlitið við millumgongumonnum virkar?

### *6.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

Orsakað av vantandi royndum hjá einstaka íleggjaranum, verða millumgongumenn teir, ið umsita meginpartin av ognunum umvegis íleggingargrunnar og -feløg. Vandi er fyri, at millumgongumenn skúgva sínar ábyrgdir til viks og í staðin nýta kunnleika sín um partabrævamarknaðin til at lumpa óvitandi íleggjarar.

#### *6.2.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna teir lógarfestu og stýrandi karmar, sum millummenn virka innanfyri í sambandi við hópeinskiljing. Ríkisgrannskoðanin skal vissa seg um, at stýrandi karmarnir virkaðu, sum ætlað.***

#### *6.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Í kjalarvørrinum á hópeinskiljing kemur ein rúgva av millumgongumonnum, íløgugrunnum, íløgufeløgum, umboðssølumonnum og sølumonnum á marknaðin. Tey fevna bæði um tey, ið hava veruliga kunnleika um marknaðarmekanismurnar, og tey, sum siga seg hava kunnleika.

Eins og íleggjarar vita lítið um síni rættindi sum beinleiðis partabrævaeigarar, vita teir stundum heldur ikki um síni rættindi, tá ið teir hava við millummenn at gera. Dømi um tað er m.a. pyramiduspølini, sum hava breitt seg um mong lond. Úrslitið av hesum spølum hevur verið stórur fíggjarligur missur, umframt politiskur og sosialur ófriður, og dømi eru um, at almennar valdsgerðir hava staðist av hesum. Fyri at verja almenningin ásetir stjórnin vanliga stýrandi karmar, bæði fyri at stýra, hvussu millumgongumenn taka seg fram, og hvussu teir reka sítt virksemi.

Fyri at tryggja móti váðanum at millumgongumenn misnýta sínar partaeigarar er sannlíkt, at stjórnin áleggur ymisku millumgongumonnunum skyldur mótvegis viðskiftafólki og/ella partaeigarum. Tað kunnu vera skyldur í sambandi við íløgupolitikk, frágreiðingar um fíggjarligu gongdina (bæði um beinleiðis íløgur, íløgur í grunn ella um sjálvt íløgufelagið), og um luttøku í góðari virkisleiðslu. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu væl tað eydnaðist eftirlitsmyndugleikanum at taka við síni ábyrgd, hvussu góð umsjónin var, og hvussu valdið varð útint.

### 6.3 __Sølutilgongd__ (leiðregla 26)

#### *6.3.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um gjøgnumskygnið, virkisførið og rættvísið í sølutilgongdini?

#### *6.3.2 Hví evnið er umráðandi:*

Hvussu væl eydnað ein hópeinskiljing er, er treytað av, at nóg stórt útboð og eftirspurningur er eftir partabrøvum, sum eru verd at keypa. Er sølutilgongdin ikki gjøgnumskygd, úrslitagóð og rættvís, kunnu leiðslur í fyritøkum, ið verða seldar, ella seljari, ið umsitur slíkar fyritøkur, halda tær frægastu fyritøkurnar uttan fyri søluna, ella skapa fløskuhálsar og seinka tilgongdini.

#### *6.3.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna øll týðandi stig í sølugongdini, m.a. hvussu upplýsingin hevur riggað, mannagongdir, tá ið boðið verður (eisini tá ið boð verða latin inn), innheinting og uppgerð, hvussu ogn er skrásett eftir søluna, um krøv til virkisleiðslu eru hildin, og mannagongdir, tá ið partabrøvini verða skrásett á virðisbrævamarknaði.***

#### *6.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Skal ein stjórn fáa almenningin at líta á einskiljingarætlanirnar, og skal tað eydnast henni at fáa bæði fyritøkur, sum skulu verða seldar, og almenningin at gera íløgur, er neyðugt, at allir partar halda sølutilgongdina vera gjøgnumskygda, virkisføra og rættvísa. Um tilgongdin ikki

verður hildin at vera góð, tá ið hugsað verður um hesi krøv, styggir tað fremmandar íleggjarar og altjóða umboðssølur.

Serligir ampar, ið seljarar hava rent seg í, eru óvissan um, hvør ið eigur rættin til ognirnar, serliga til lendi og bygningar, tá ið ivi tekur seg upp um løgfrøðiliga undirstøðukervið, ella spurningur verður settur við kredittvirðið hjá fyritøku og við førleikan hjá leiðslum.

Sølutilgongdin fevnir eisini um at skráseta ognarrættin eftir søluna. Ríkisgrannskoðanin hevur kanska tørv á at kanna rættlætið hjá teimum, ið skráseta partabrævaogn, og hvussu stýrandi karmarnir virka. Tað hevur eisini stóran týdning, at partaeigarar kunnu keypa og selja partabrøv í einari fyritøku, uttan at leiðslan blandar seg ella skal góðkenna sølu/keyp (open trading). Sølutilgongdin skal eisini síggja til, at nýggju íleggjararnir fáa nøktandi upplýsingar um síni rættindi sum partaeigarar, og at leiðslurnar á einskildu fyritøkunum fáa at vita sínar skyldur viðvíkjandi virkisleiðslu. Ríkisgrannskoðanin hevur kanska eisini skyldu til at kanna, hvussu skjótur seljarin hjá stjórnini var til at fullgera sølutilgongdina.

# 7 Øki 6: Uppboðssølur (Auctions)

## 7.1 <u>Kapping</u> (leiðregla 27)

### *7.1.1 Evni:*

Hvussu kann ríkisgrannskoðanin vissa seg um, at kappbjóðingin fer fram á rættan hátt?

### *7.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Greiðar reglur skulu vera, sum tryggja, at hóskiliga nógvir bjóðarar eru kunnugir við allar viðkomandi upplýsingar um uppboðssølumannagongdina; at bjóðarar eru við í góðari trúgv, og at kappingin er gjøgnumskygd og rættvís.

### *7.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu fram verður farið, tá ið almennar fyritøkur verða fyrireikaðar til at verða seldar, og hvussu upplýsing verður savnað og almannakunngjørd um tær. Upplýsingarnar fevna um, nær uppboðssølan verður, hvussu bjóðarar kunnu verða skikkaðir og skrásettir, hvussu "fyrsta boð" og "lægsti prísur" verða útroknað, at tryggjað verður, at uppboðssølumannagongdirnar eru klárt allýstar og í samsvari við lóggávu, kanna at kappingin fer rætt fram (eisini at vera fyrireikaður til vandan fyri avtalaðum spæli millum bjóðarar), hvussu "vinnandi bjóðari" verður valdur, og at sølutilgongdin verður fullførd skjótast til ber.***

### *7.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

At skipa fyri kappingarmerktari uppboðssølu byrjar við, at teir, ið skipa fyri, brúka greiðan virðismetingarhátt. Virðið á fyritøku ella ogn er vanliga grundað á fíggjarstøðuna, og ein multiplikator verður ofta brúktur, um høg inflatión talar fyri tí. Byrjanarprísir, ið eru uppskrúvaðir, kunnu forða ávísum bjóðarum í at verða við, og tað økir um møguleikan fyri avtalaðum spæli millum bjóðarar.

Tað er týdningarmikið, at almenningurin hevur kunnleika um og stuðlar uppboðssølutilgongdini. Ríkisgrannskoðanin skal kanna eftir, um reglurnar fyri, hvussu uppboðssølan fer fram, vóru kunngjørdar væl undan uppboðssøludegnum.

Tað eigur at vera ein greið mannagongd, sum tryggjar, at nóg góðar upplýsingar eru tøkar um fyritøkuna ella ognina, sum verður seld, so at bjóðarar hava høvi at kanna viðurskiftini væl og virðiliga framman undan uppboðssøluni. Bjóðarar fáa ofta týðandi upplýsingar við at samskifta beinleiðis við einskiljingarmyndugleikarnar, men kunningarátøk og lýsingarátøk fáa

fleiri at verða við í uppboðssøluni. Teir, ið skipa fyri uppboðssøluni, eiga at gera púra greitt, hvør ið kann vera við í uppboðssøluni. T.d. skal tað vera alment, hvussu fyriskiparar allýsa fysiskar og juridiskar persónar, og reglurnar fyri útlendskari luttøku skulu eisini vera greiðar.

Kappingin millum bjóðarar eigur at vera gjøgnumskygd, tí ofta hava bjóðarar, sum ætla at verða við í uppboðssølu, heilt ymisk mál. Útlendskur íleggjari og starvsfólk á fyritøkuni kunnu hava heilt ymiskar ætlanir við at keypa eina ogn.

Hugsandi er, at ósemja kann taka seg upp millum bjóðandi partar. Teir, ið hava ábyrgdina av uppboðssøluni, mugu vera partleysir í veru og atferð. Ein máti er at seta nevnd at hava eftirlit við uppboðssøluni. Nevndin kann leggja uppí, um teir varnast óreglusemi. Um nevnd hevur eftirlit við uppboðssøluni, skal ríkisgrannskoðanin tryggja sær, at nevndin hevði umsjón við, at sáttmálarnir vórðu undirskrivaðir, og at avtalaða søluupphæddin varð innsett.

Ríkisgrannskoðanin skal kanna, at nevndin ella tey, ið annars høvdu ábyrgd av at stíla fyri uppboðssøluni, tóku stig til at tryggja, at bjóðarar hildu tær reglur, sum skuldu forða fyri, at snýtt varð við uppboðssøluni, t.d. reglurnar, sum kravdu, at upplýst varð, hvør bjóðarin var.

Ríkisgrannskoðanin skal kanna:

- um allir partar fingu somu upplýsingar,
- um bjóðingarhátturin og reglurnar vóru greidliga lýst,
- um bjóðingartilgongdin varð umsitin av einari eind, sum ikki hevði ósambærilig áhugamál í sambandi við úrslitið av uppboðssøluni,
- um uppboðssølan var almenn.

Verða hesi krøv ikki hildin, missa bjóðarar og almenningur álitið á, at uppboðssølan fór rættvíst fram, og at kappingarmátturin, sum avger, um ein uppboðssøla er væleydnað, fjarar eftir øllum sannlíkindum burtur.

## 7.2 <u>**Sølutilgongdin**</u> (leiðregla 28)

### *7.2.1 Evni:*

Hvørji stig skal ríkisgrannskoðanin taka til tess at tryggja, at søla á uppboði førir til, at handil verður avgreiddur, og at avtalaði prísurin verður goldin?

### *7.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

Sølutilgongdin byrjar við, at bjóðarar verða skrásettir, og endar við, at tryggjað verður, at ognarrættindini verða vird. Tá ið bjóðarar verða skrásettir, kann seljari avmarka bjóðararnar til einans at fevna um teir, ið megna at átaka sær ognarrættin yvir fyritøkuni. Bjóðarar kunnu verða bidnir um at skriva undir avtalu um at halda reglurnar fyri uppboðssøluna. Leiðreglur (møguliga lógarfestar) eiga at vera fyri, hvussu ognarrætturin verður skiftur, og bæði keyparar og seljari eiga at kenna tær. Ásetingar eiga eisini at vera fyri, hvussu ognarskiftið fer fram eftir uppboðssøluna, peningastovnskonta skal vera stovnað, sum søluprísurin verður settur inná, og avgjørt skal verða, hvør ið skal hava sølupeningin.

### *7.2.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna skrásetingar- og sølumannagongdir í sambandi við uppboðssølu, frá byrjan til enda. M. a. vóru hepnu bjóðararnir nóg væl stuðlaðir til at halda sínar skyldur?; fór avhendan av ognarrætti fram í samsvari við lógir og reglugerðir?; vóru mannagongdir ásettar fyri, hvussu ósemjur millum seljara og keypara skulu verða loystar?***

### *7.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Greitt er, hvat úrslitið av eini uppboðssølu eigur at vera: bjóðari fær ognarrættin til áður almenna fyritøku ella ogn, tá ið hann rindar seljara alla upphæddina. At sjálv uppboðssølan er av, merkir ikki, at sølan er fullgjørd. Royndir vísa, at við ongari veruligari tilstuðling, sum byrjar við, at bjóðarin verður skrásettur, kann bjóðarin bjóða hægri prís enn marknaðarvirðið, og ikki hava ætlanir um at rinda søluprísin. Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, hvørji tiltøk vórðu sett í verk fyri at forða fyri hesum váða. Í summum londum skal hvør bjóðari rinda ávísa upphædd sum trygd. Hinvegin kann kravið um slíka trygd avmarka kappingina, um fleiri fyritøkur verða seldar samstundis um uppboðssøluna. Í reglunum fyri uppboðssøluni kann vera ásett, at um bjóðari ikki ger sína skyldu, missir hann veittu trygdina, og bjóðari, ið hevur næst hægsta boðið, hevur rætt til at fáa fyritøkuna ella ognina fyri tann prísin. Hesar og aðrar líknandi reglur og mannagongdir eiga at verða almannakunngjørdar, áðrenn uppboðssølan verður hildin. Um framferðin í sambandi við søluna og søluskjølini ikki lúka krøv sambært lóg, má sølan verða hildin at vera ógildug. Hetta vekir iva um evnini hjá teimum, sum standa fyri uppboðssøluni, hvørt teir duga at avgreiða ognarsølu, og tað hevur við sær, at íleggjarar missa álit á teimum.

Ríkisgrannskoðanin má kanna, hvussu uppboðssølukassin varð stovnaður, og hvør umsjón var við honum. Mett verður um, hvussu inntøkur av søluni verða býttar, til tess at meta um áhugamálini hjá ymiskum áhugabólkum (“stakeholders”). Ríkisgrannskoðanin má eisini kanna, um uppboðssøluhátturin (opin almenn boð ella loynilig skrivlig boð) útvegaði hægsta søluprís.

Stuðul og hjálp til keyparan aftan á uppboðssøluna er viðkomandi, tí avhendanin er ikki fullfíggjað, fyrr enn nýggi eigarin hevur lógligan rætt til fyritøkuna ella ognina. At mannagongdir verða settar í verk, sum taka sær av ósemjum, ið kunnu taka seg upp - so sum ósemjur, sum kunnu vera millum nýggju eigararnar og gomlu leiðsluna – stuðlar uppundir at fullfíggja avhendanina og økir um álitið, sum almenningurin hevur á uppboðssøluna. Harafturat eiga rættindini hjá nýggju eigarunum at selja víðari at vera greidliga ásett, fyri at økja um álit frá íleggjarunum.

# 8 Øki 7: Alment partabrævaútboð (Flotations)

## 8.1 <u>Leikluturin hjá seljara</u> (leiðregla 29)

### *8.1.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin hava í huga, tá ið hon eftirmetir leiklutin hjá seljaranum í partabrævaútgávuni?

### *8.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Partabrævaútgáva er ein stór uppgáva, eisini í londum við marknaðarbúskapi, har kapitalmarknaðurin er mentur, og har útlendskir íleggjarar eru við. Tá ið tað almenna stendur fyri partabrævaútgávu, kann tað køva eftirspurningin eftir “privatum” partabrøvum.

Um seljari setir prísin á partabrøvum ov lágt, verður eftirspurningurin ikki nøktaður, og almenningurin missir álitið á sølutilgongdini, um hann sær, at ein minniluti (nøkur útvald) ríkar seg upp av almennum ognum. Hinvegin er vandi fyri, at søluprísurin verður settur so høgt, at íleggjarar kenna seg snýttar og vilja ikki verða við í øðrum partabrævaútgávum.

Seljarin má leggja eina søluætlan, ið leggur uppfyri hesum báðum vandunum, og tryggja, at sølan fer fram soleiðis, at almenningurin heldur hana vera væl eydnaða, og at sølan soleiðis slóðar fyri øðrum partabrævaútgávum.

### 8.1.3 *Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um seljari gjørdi eina skynsama ætlan fyri partabræva-útgávuna við atliti at miðal- og langtíðarmálunum við einskiljingini.***

### 8.1.4 *Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Tað kann vera stór avbjóðing at fara undir partabrævaútgávu, serliga um tað er ein av fyrstu einskiljingunum hjá einum stati. Óvissa kann vera um, hvussu marknaðurin tekur ímóti útgávuni, og tað kann vera sera trupult at seta prís á partabrøvini, serliga um partabrævaútgávan er tann fyrsta av sínum slagi. Royndirnar vísa, at um tað er ein av fyrstu einskiljingunum, kann tað vera trupult hjá seljara at fáa góðan prís fyri partabrøvini, tí íleggjararnir royna at fáa eitt rímiliga stórt avkast.

Royndirnar vísa, at tá ið staturin hevur prógvað, at almennar fyritøkur kunnu vera skrá-settar á partabrævamarknaði, vaksa sjálvsálit og royndir hjá statinum, og staturin kann tí fáa betri avtalur fyri skattaborgaran, samstundis sum hann kann bjóða íleggjarum eina góða íløgu. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu væl tað eydnaðist seljaranum at nýta hesar royndir, tá ið hann ætlaði sær at selja partabrøv seinni.

## 8.2 <u>Hvussu seljarin umsat partabrævasøluna</u> (leiðregla 30)

### 8.2.1 *Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin eftirmeta, hvussu seljarin umsat partabrævasøluna?

### 8.2.2 *Hví evnið er umráðandi:*

Fyrsta stigið í væl eydnaðari partabrævaútgávu er ein væl umhugsað søluætlan. Næsta stigið er at seta søluætlanina í verk við at handfara søluna skjótt og væl. Hvussu hetta verður framt í verki, er treytað av, um staturin vil hava mest møguligt burtur úr søluni í krónum og oyrum, ella um staturin vil spjaða ognarrættin, ella at selja innan fyri ávísa tíðarfreist o.s.fr.

Í summum førum er fyrimunur við at selja partabrøvini í fleiri umførum, t.d. tá ið óvissa er um, hvussu marknaðurin metir virðið á fyritøkuni. Eftir fyrsta søluumfar er seljari betur førur fyri at áseta neyvan prís á partabrøvini í næsta søluumfari.

### 8.2.3 *Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu væl seljari umsat partabrævaútgávuna. Hugt verður at endamálunum og grundarlagnum undir ósamsvari millum prísin, partabrøvini vórðu seld fyri, (íroknað "target premium") og prísin, partabrøvini vórðu seld fyri á marknaðinum aftan á partabrævaútgávuna.***

### 8.2.4 *Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Um seljari umsitur søluna skynsamt, kann inntøkan frá partabrævaútgávuni vaksa rættiliga nógv. Nógvir tættir eru, sum seljari eigur at hava í huga, og ávirkanin, tættirnir hava, er ymisk frá einari partabrævaútgávu til aðra. Ríkisgrannskoðanin eigur at eyðmerkja allar týdningarmiklar partar av, hvussu seljarin umsat søluna, og kanningin hjá ríkisgrannskoðanini eigur at fevna um allar partar. T.d. um virðið, sum varð sett á partabrøvini, varð góðkent av øllum viðkomandi pørtum, t.d. gjøgnum "book-building" (sí leiðreglur 31 og 35), ella vóru ymiskar meiningar?

Um sølan fer fram í fleiri umførum, minkar váðin, sum stendst av, at skeivur prísur verður settur á fyrstu útgávuna, tí royndirnar vísa, at hevur statinum lyndi til at seta ov lágan prís á partabrøvini, fer ein søla í fleiri umførum við tíðini at geva nógv hægri úrtøku. Í einum føri

vóru øll partabrøvini seld í senn, og prísurin var alt ov lágur. Ráðharrastovan, sum hevði ábyrgdina av søluni, misti nógva inntøku. Ráðharrastovan visti, at ríkisgrannskoðanin og løggávutingið fóru at finnast at henni. Tí gjørdi ráðharrastovan av, at hon í tveimum stórum partabrævaútgávum seinni bara seldi 60% av partabrøvunum í fyrsta søluumfari.

Tá ið partabrøvini verða seld í fleiri umførum, má ríkisgrannskoðanin kanna, hvørt seljarin hugsaði um allar upplýsingar, hann hevði um útlitini hjá felagnum eftir fyrstu partabrævaútgávu, og um hann hevði hetta í huga, tá ið hann ásetti sølutíðspunkt, prísir og hvussu nógv søluumfør skuldu verða seinni.

Í teimum báðum partabrævaútgávunum, sum eru nevndar omanfyri, tá ið bara 60% av partabrøvunum vórðu seld í fyrsta umfari, seldi seljarin seinni tey síðstu 40% av partabrøvunum í fleiri væl umhugsaðum søluumførum, sum samantalt góvu skattgjaldaranum tað, ið svaraði til 3,5 mia.$ í eyka úrtøku.

## 8.3 **At keypa partabrøv, marknaðurin ikki keypir** (leiðregla 31)

### *8.3.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, at “underwriting” (sí niðanfyri) verður brúkt í partabrævaútgávu?

### *8.3.2 Hví evnið er umráðandi:*

At nýta “underwriting” hevur vanliga havt stóran týdning, tá ið partabrøv verða seld, bæði tá ið tað almenna og tað privata selja partabrøv. Leiðandi fíggjarligi ráðgevin hjá seljaranum (helst ein íløgubanki) savnar ein bólk av “underwriters”, vanliga íløgubankar, ið afturfyri eitt ómaksgjald (“underwriting commission”), ábyrgjast fyri partabrævaútgávuni. T. e., teir lova at keypa tey partabrøv, ið marknaðurin ikki keypir. Hesir, ið ábyrgjast fyri partabrævaútgávuni, gera ofta av, hvør veruligi søluprísurin á partabrøvunum er, tí teir vilja ikki ábyrgjast fyri útgávuni, um teir eru ónøgdir við prísin. Vanliga dámar “underwriters” ikki at taka váða á seg, so seljari kann enda við at rinda 2 ferðir sjálvt ómaksgjaldið til “underwriters”, sum kann verða samanborið við eitt tryggingargjald, og mista søluinntøku, tí “underwriters” ikki vilja taka veruligan váða á seg.

Staturin, sum seljari, kann taka henda váða á seg og soleiðis minka kostnaðin av útgávuni. Tí verður tað alsamt vanligari, at ábyrgjarar (“underwriters”) ikki verða nýttir. Royndirnar vísa, at tað hevur ikki havt ringa ávirkan á søluinntøkuna.

### *8.3.3 Leiðregla:*

***Stjórnir eru vanliga best fyri at átaka sær váða. Um partabrævaútgávan hevur ein, ið ábyrgist fyri partabrævasøluni (underwriter), skal ríkisgrannskoðanin kanna orsøkirnar til tess, og hvørja ávirkan tað hevði á nettosøluinntøkuna.***

### *8.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Tá ið seljari hevur fingið fleiri royndir í partabrævaútgávu, hevur hann funnið aðrar framferðarhættir enn at nýta “underwriting” fyri at áseta prísin á partabrøvunum soleiðis, at tað er sannlíkt, at øll partabrøvini, ið verða boðin út, verða seld, soleiðis at úrtøkan verður so stór, sum til ber. Eitt alternativ til “underwriting” er “book-building” -framferðarhátturin. Tað er, at seljarin, áðrenn hann setir prís á partabrøvini, yvirtalar stovnar sum íleggjarar (t.d. pensiónsgrunnar) og peningastovnar at geva ábendingar um, hvussu nógv partabrøv teir høvdu keypt fyri ymiskar prísir. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt seljari kannaði ymisku hættirnar fyri at sleppa undan “underwriting”, ella í øllum førum minka kostnaðin av “underwriting”, soleiðis at so gott úrslit, sum til ber, fekst burtur úr søluni.

## 8.4 <u>At eggja leiðslu og starvsfólki til at keypa partabrøv</u> (leiðregla 32)

### *8.4.1 Evni:*

Hvussu eigur ríkisgrannskoðanin at meta um ágóða, so sum partabrøv ella rætt til at keypa partabrøv, sum verður latin leiðslu og starvsfólki sum partur av partabrævaútgávu?

### *8.4.2 Hví evnið er umráðandi:*

Í øllum einskiljingarætlanum er tað umráðandi at fáa í lag samstarv við leiðslu, starvsfólk og umboð fyri fakfeløg. Grundarlagið fyri, um tað gongst einari privatari fyritøku væl, er tað arbeiði, starvsfólkið leggur í fyritøkuna. Nógv starvsfólk óttast fyri at missa starvið, tá ið fyritøkur verða einskildar, tí kann tillutan av partabrøvum, annaðhvørt ókeypis ella til lægri prís, eggja teimum til at samstarva. Seljarin skal finna javnvág millum at eggja starvsfólki til og at fáa sum mest burtur úr søluni.

Tað hevur týdning, at leiðsla, ið situr, ikki hevur óhóskandi ávirkan á avgerðir um tey partabrøv, ið verða tillutað teimum sjálvum.

### *8.4.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørjir ágóðar, so sum partabrøv tillutað til lagaligar treytir, vórðu latnir leiðslu og starvsfólki, og hvussu áhugamálini hjá hesum bólkum vórðu vigað upp ímóti áhugamálunum hjá øðrum íleggjarum í almennu fyritøkuni, sum varð einskild, og tey hjá statinum; og um treytirnar í.s.v. tílíkar framíhjá sersømdir vórðu almannakunngjørdar frammanundan, serliga tær, ið gagnaðu leiðsluni á almennu fyritøkuni.***

### *8.4.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Fyri at fáa sum best burtur úr partabrævaútboði og rættinum at keypa partabrøv eigur seljari at finna javnvág millum tey serligu krøv, sum eru til ávísa útgávu, við tørvin at varðveita grundleggjandi meginreglur so sum eins viðgerð (millum ymisku starvsfólkabólkarnar), búskaparlig atlit og einsháttaða viðgerð (millum ymisku partabrævasølurnar).

At lata leiðslu og starvsfólki partabrøv, ella rætt at keypa partabrøv, er viðkvæmt evni, og tað kann vekja áhuga hjá almenninginum og elva til ósemju. Tí er tað góður siður, at seljari, áðrenn hann gevur tilboðið, kunnger alment, hvørjir partar av leiðsluni og starvsfólkunum hava rætt til hvørjar tilstuðlanir, millum annað partabrøv (upphædd, virði, prísur ella onnur tilstuðlan). At veita slíkar møguleikar kann minka um mótstøðuna millum starvsfólk móti einskiljingini. Ein illa umhugsað ætlan fyri, hvussu tillutanin fer fram, t.d. um hildið verður, at hon gevur leiðsluni, ið situr, framíhjárættindi, kann hava júst øvuta úrslitið.

Leiðslan á fyritøkuni kann t.d. royna at virka fyri, at slíkar tilstuðlanir verða veittar, tí at tær ivaleyst fara at motivera starvsfólk væl eftir einskiljingina. Í slíkum førum er spurningurin, um tað í heila tikið er seljari, ið skal bera tann kostnaðin.

Opinleiki (herímillum almannakunngerð) er ein týdningarmikil liður, skal almenningurin hava álit á tilgongdini. Tí eigur ríkisgrannskoðanin at hava umsjón við, hvussu slíkar tilstuðlanir fara fram, og ríkisgrannskoðanin má kanna, um viðgerðin altíð var tann sama; um endamálini við at eggja fólki til vórðu rokkin; og um áhugamálini hjá leiðslu og starvsfólki vórðu hildin upp ímóti teimum hjá íleggjarunum og skattgjaldaranum.

## 8.5 **<u>At draga íleggjarar at sær</u>** (leiðregla 33)

### *8.5.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin hava fyri eygað, tá ið hon kannar, hvussu seljari royndi at vekja ans fyri partabrøvum sínum millum íleggjarar, ið kanska vóru?

### *8.5.2 Hví evnið er umráðandi:*

Hvussu væleydnað partabrævaútgávan er, er m.a. tengt at, hvussu væl tað eydnaðist seljara at finna og stuðla áhugan at keypa millum teir best skikkaðu íleggjararnar. Íleggjarar kunnu vera bæði einstaklingar og íløgufeløg, bæði innan- og uttanlands. Tað hevur týdning at skilja teir partar av innlendis og útlendis marknaðinum burturúr, sum munnu hava størsta áhugan í partabrævaútgávuni. Um seljari megnar at skapa kapping millum hesar partar, kann hann ivaleyst selja partabrøvini fyri ein góðan prís. Best er, um hann finnur íleggjarar, ið ætla at eiga partabrøvini leingi, og um eigaraskarin er stórur.

Tess meira spjaddur ognarrætturin til partabrøvini er, tess størri undirtøku fær einskiljingin millum fólk.

### *8.5.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvussu væl tað eydnaðist seljara at kortleggja marknaðin fyri partabrøv og styrkja kappingina millum teir ymisku íleggjarabólkarnar.***

### *8.5.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Seljari eigur at meta um, hvørt kapitalmarknaðurin í landinum er førur fyri at taka ímóti allari partabrævaútgávuni. Um ikki, verður seljari noyddur at selja í øllum førum ein part av útgávuni á altjóða marknaði.

Um eitt endamálið við partabrævasøluni er, beinleiðis ella óbeinleiðis, at fáa fleiri einstaklingapartaeigarar við, eigur seljari at hugsa um, hvussu stórur partur av útgávuni skal vera brúktur til at vekja áhugan hjá einstaklingaíleggjarum, t.d. við ókeypis bonus partabrøvum ella við serligum treytum (t.d. avdráttarskipanum).

Standa tilstuðlanir einstaklingum í boði, kann tað vera skynsamt at lata tilstuðlanirnar fevna um aðrar veitingar (t.d. at tey fáa avsláttur av tænastuni, sum einskilda fyritøkan veitir), fyri at sannføra hesar íleggjarar um, at teir skulu varðveita partabrøvini. Tiltakið at sannføra íleggjararnar um at halda fast við partabrøvini kann vera fyri bakkasti, um virðið á partabrøvunum fellur.

Sama um seljarin vil víðka eigaraskaran millum einstaklingar, so hava væleydnaðar partabrævasølur víst, at til tess fáa besta prísin, er tað best, at kapping kemur í millum stovnsíleggjarar (pensiónsgrunnar o.tl.) og einstakar íleggjarar. Tað ber til at siga við pensiónsgrunnarnar, at um teir ikki vísa nóg stóran áhuga, meðan “book-building” (sí orðalista) fer fram, verða fleiri partabrøv latin einstaklingum.

Tað er lættast at draga stórar vinnuligar íleggjarar til sín við at selja fyritøkuna beinleiðis (sí “Øki 3”), men tað ber eisini til at fáa slíkar íleggjarar at verða við í partabrævasølu. At royna at draga røttu íleggjararnar til sín og at spjaða partabrøvini til nógvar íleggjarar kann hava ávirkan á, hvussu væleydnað ein partabrævasøla verður og eisini tær sølur, sum verða seinni. Neyðugt er, at ríkisgrannskoðanin heldur eyga við, um serligar tilstuðlanir verða brúktar at draga ávísar bólkar av íleggjarum til sín.

## 8.6 <u>Søla miðað móti "einstøkum íleggjarum"</u> (leiðregla 34)

### *8.6.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, hvussu effektiv marknaðarføringin var mótvegis teimum smáu keyparunum í partabrævaútgávuni?

### *8.6.2 Hví evnið er umráðandi:*

Í einari partabrævaútgávu, sum miðar eftir støkum íleggjarum (eisini kallað smásølu-marknaður), hevur effektiv marknaðarføring størstan týdning, skal høgur prísur fáast fyri partabrøvini. Neyðugt er eisini, at seljari hevur sett sær mál fyri, hvussu hann fær so breiðan eigaraskara, sum til ber.

### *8.6.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørt seljarin hevði eina ætlan fyri, hvussu partabrøvini kundu verða marknaðarførd mótvegis einstøkum íleggjarunum, og hvørt ætlanin samsvaraði við endamálið við søluni, og hvussu effektivt ætlanin varð sett í verk.***

### *8.6.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Fleiri orsøkir kunnu vera, hví seljarin í eini partabrævasølu vil vaksa um áhugan millum smáu íleggjararnar. Nakrar av orsøkunum eru:

- fyri at fleiri einstaklingar skulu eiga í fyritøkunum,
- fyri at fáa almenningin at góðtaka og stuðla einskiljingini sum tilgongd,
- fyri at fáa fatur á peningatilfeingi út yvir tað, sum tøkt er hjá fíggjar- og peningastovnum,
- fyri at skapa kapping, tá ið prísur verður settur á partabrøv.

Tað er góður siður í marknaðarføring, at ætlanin við marknaðarføringini verður orðað og skjalfest, og ríkisgrannskoðanin eigur at kunna síggja, um ætlanin varð fullfíggjað. Tá ið ætlanin við marknaðarføringini hjá seljara verður greinað, eigur at verða tikið við, hví seljari royndi at fáa fatur á smáu íleggjarunum.

Tað kann vera andsøgn millum nøkur søluendamál hjá seljara og mál við marknaðarføringini. Dømi er, at málið at virka fyri, at mong skulu eiga partabrøv, talar fyri at seta lágan prís á partabrøvini, so nýggju smáíleggjararnir beinanvegin fáa eitt nøktandi úrslit av íløguni. Hetta kann vera í andsøgn við málið um at fáa hægst møguliga úrtøku fyri partabrævasøluna. Søla til smærri íleggjarar merkir ikki neyðturviliga, at málið um hægst møguliga úrtøku verður sett í vanda. Virkað kann verða fyri eftirspurningi frá smáum íleggjarum sum einum effektivum amboði at leggja trýst á stovns-íleggjarar, og tað kann hava við sær, at prísurin á partabrøvum verður hægri, enn hann hevði verið, um smáu íleggjararnir ikki vóru við.

Marknaðarføringin kann fevna um at geva smáum íleggjarum tilstuðlan til at keypa, men tað er ikki galdandi fyri stórar íleggjarar. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um eftirlit er við útreiðslunum av hesum tilstuðlanum, og hvørt tær eru rímiligar sammett við málini við marknaðarføringini. T.d. er tað ikki skynsamt at geva stórar tilstuðlanir, um einasta endamálið við at vekja áhugan millum smærri íleggjarar er at vekja ans hjá royndum privatum íleggjarum, sum eru áhugaðir í at keypa heilt nógv partabrøv.

Vanliga eru strong krøv fyri, hvat kann vera sagt við ein møguligan íleggjara í sambandi við partabrævasølu. Ríkisgrannskoðanin eigur at kanna, hvørt seljarin tryggjaði, at marknaðarføringin leyk hesi krøv.

## 8.7 <u>Hvussu prísur verður settur á partabrøv</u> (leiðregla 35)

### *8.7.1 Evni:*

Hvørjir eru høvuðsspurningarnir, ið ríkisgrannskoðanin skal taka støðu til, tá ið hon kannar, hvussu prísur varð settur á partabrøvini, sum givin vórðu út?

### *8.7.2 Hví evnið er umráðandi:*

Tá ið óvissur eru á marknaðinum, og tá ið tørvur er á at tryggja eina væleydnaða sølu, hóast tíðarætlanin er krevjandi, er vandi fyri, at prísurin á partabrøvunum verður settur ov lágt. Tað hevur við sær, at eftirspurningurin verður størri enn útboðið, og tað merkir, at íleggjarar verða vónsviknir, og at seljarin missir sølupening.

### *8.7.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, hvørji stig seljarin tók fyri at staðfesta tann sannlíka eftirspurningin fyri ymiskan prís (book-building). Og um arbeitt varð eftir besta leistinum, tá ið avgjørt varð, hvussu stór útgávan skuldi vera, og hvør søluprísur skuldi vera.***

### *8.7.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Hækkar prísurin á partabrøvunum heilt nógv eftir fyrsta søluumfar, meira enn vanligu hækkingina í partabrøvum annars, kann orsøkin vera ov lítil kapping millum keyparar undan søluni, ella at seljarin hevur sett prísin ov lágt - ella bæði.

Í sambandi við eina partabrævasølu er sannlíkt, at seljari roynir at røkka fleiri málum, sum eru í andsøgn, og tað ávirkar avgerðirnar um prísáseting. T.d. kann seljari vilja fáa mest møguliga úrtøku úr søluni, samstundis sum hann roynir at avgreiða søluna fyri eina almannakunngjørda tíðarfreist, ella at hann roynir at fáa so breiðan eigaraskara, sum til ber, og at einstøku eigararnir skulu eiga fleiri partabrøv. At andsøgn er millum fleiri av málunum, er eingin umbering fyri, at seljarin ikki roynir at fáa so góðan prís, sum til ber, fyri fyritøkuna.

So hvørt sum seljari fær fleiri royndir at standa fyri partabrævasølum, eydnast honum eisini betur at fáa í lag kapping millum einstaklingar, stovnsligar íleggjarar og fremmandar íleggjarar, og hann dugir alsamt betur at meta um sannlíka eftirspurningin fyri ymiskar prísir. Tað hevur við sær, at prísurin verður ásettur soleiðis, at úrtøkan sannlíkt verður so stór, sum til ber. Hesir hættir fevna eisini um “book-building”, t.e., at prísurin verður settur á partabrøvini síðst í skeiðnum, tá ið partabrøvini eru boðin út. Prísurin er grundaður á kappbjóðing millum íleggjarar, sum eru bidnir um at geva ábending um, hvussu nógv partabrøv, teir hava hug at keypa fyri ymiskan prís. Síðst í útbjóðingarskeiðnum kann ein prísur verða ásettur, sum bæði leggur upp fyri eftirspurning frá íleggjarum og fyri teim rørslum, sum eru á virðisbrævamarknaðinum í tíðini fram til partabrævasøluna.

Hetta er í andsøgn við støðuna, tá ið partabrøvini verða seld til millumgongumenn, sum skulu selja víðari; tá ið selt verður fyri “underwritten” prís (minstaprís) til íleggjarar, og tá ið eingin ábending er frá íleggjarum um, hvør eftirspurningurin er fyri ymiskar prísir. Í slíkum førum er váðin stórur fyri, at úrtøkan ikki verður so stór, sum hon kundi verið (sí leiðreglu 31).

Sjálvt um seljari brúkar bestu ráðgeving, sum er tøk, og bestu framferðarhættir, tá ið hann roynir at seta prís á partabrøvini soleiðis, at sannlíkt er, at besta úrtøkan fæst – samstundis sum atlit eru fyri øðrum málum – ber ikki til at gera tað við fullari vissu. M.a. har eingin kapitalmarknaður er. Slík hava viðurskiftini verið, tá ið prísurin hevur verið alt ov lágt settur í fleiri heilt stórum partabrævasølum.

Tá ið óvissar umstøður gera um seg, er skynsamt, at seljari selur partabrøvini í fleiri umførum (sí leiðreglu 30).

## 8.8 **At lata partabrøv** (leiðregla 36)

### *8.8.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin serliga hava fyri eygað, tá hon kannar, hvussu seljari læt íleggjarum partabrøv?

### *8.8.2 Hví evnið er umráðandi:*

Fyri at tryggja besta prísin á partabrøvunum roynir seljari at skapa kapping millum ymisku íleggjararnar. Hann kann m.a. gera tað við at almannakunngera frammanundan, hvussu partabrøv verða latin og soleiðis geva fatan av, at partabrævaútboðið er avmarkað. Tað kann eisini skapa kapping, um almannakunngjørt verður, at partabrøv verða latin langtíðaríleggjarum, tí tað kann minka um váðan, at partabrøvini stutt eftir útgávuna verða seld fyri skjótan vinning.

Verður tillutanin av partabrøvum ikki umsitin væl, og halda íleggjarar, at tillutanin ikki er rættvís, er vandi fyri, at trúvirðið hjá seljara verður skatt, og at aðrar partabrævasølur seinni fara at kenna sviðan av tí.

### *8.8.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um seljari varðveitti eftirlitið við partabrævatillutanini, hvat metingarstøðið var undir tillutanini, um seljari helt seg til metingarstøðið, og um tillutanin var óheft og skipað í samsvari við metingarstøðið fyri tillutanina.***

### *8.8.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Seljari má skilja ímillum teir tríggjar høvuðsbólkarnar av íleggjarum í sambandi við partabrævasølu: stovnsíleggjarar, einstaklingar og fremmandar íleggjarar. Ásetingar fyri, hvussu partabrøvini verða latin, eru treytaðar av seljarans søluendamálum. T.d. kann tað, at stórur partur av tøku partabrøvunum í stórum einskiljingum verða seld einstaklingum, vera høvuðsinnihaldið í politikkinum hjá stjórnini um, at partabrøvini skulu vera á mongum hondum.

Royndin at draga einstaklingaíleggjarar til sín kann vera ein týðandi táttur í einari stórari partabrævasølu, fyri at birta upp undir realistisk boð frá stovnsíleggjarunum (skapa kapping). Seljarar royna at síggja til, at eftirspurningurin eftir partabrøvum er størri enn útboðið og soleiðis tryggja besta prísin.

Í slíkum førum kann henda, at summir íleggjarar fáa ikki øll, kanska ongi, partabrøv, teir bjóða uppá. Tí er neyðugt, at seljari framman undan sølu kunnger tillutanarreglurnar, fyri at tryggja, at íleggjarar skilja, hvørjum grundarlagi partabrøvini verða latin eftir.

## 8.9 **At fáa prís í fasta legu** (leiðregla 37)

### *8.9.1 Evni:*

Hvat skal ríkisgrannskoðanin serliga leggja seg eftir, um hon kannar tað, ið gjørt varð fyri at fáa søluprísin í eina trygga legu fyri partabrøv, sum júst eru útskrivað, ella eftir seinni partabrævasølur?

#### *8.9.2 Hví evnið er umráðandi:*

Kann seljari ikki vissa marknaðin um, at prísurin á partabrøvunum eftir øllum sannlíkindum ikki fellur eftir eina partabrævaútgávu ella eftir partabrævasølu seinni, verður trupult at fáa høgan prís fyri partabrøvini, sum verða seld.

#### *8.9.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal staðfesta úrslitið av royndunum hjá seljara at fáa virðið á partabrøvunum í fasta legu; hvat hann gjørdi til tess at fáa virðið á partabrøvunum í fasta legu, í samsvari við tær reglur, ið stýra marknaðinum; hvussu royndirnar at fáa virðið í fasta legu vórðu fíggjaðar, og hvussu váði og søluvinningur/tap varð býtt millum partarnar.***

#### *8.9.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Tiltøk, sum skulu fáa marknaðin at vera støðugan (forða fyri, at virðið á selda partabrævinum fellur), verða brúkt í sambandi við stórar partabrævasølur. Tiltøkini fevna um at bjóða partabrøvini út á altjóða marknaðinum og at brúka framferðarhættir so sum “book-building” (sí leiðreglu 33). Orsøkin til tað er, at afturfyri at teir bjóða hægri prís, enn teir annars høvdu gjørt, vilja íleggjarar í feløgum – summi teirra hava stóran týdning fyri búskapin – hava onkra vissu fyri, at prísurin, teir hava givið, ikki fellur beint aftan á søluna.

Váðin fyri, at vanlig søla fær prísin á partabrøvunum at falla eftir eina einskiljing, kann verða avmarkaður við at selja partabrøvini til langtíðaríleggjarar. Harafturat verður onnur vissa veitt íleggjarunum fyri, at prísurin á partabrøvunum fæst í eina fasta legu, t.d. um stabiliseringsmekanismur eru settar í verk, sum loyva seljaranum ella einum umboði eitt avmarkað skeið eftir søluna at keypa ein part av nýútskrivaðu partabrøvunum á virðismarknaðinum fyri tilboðsprísin hjá seljaranum. Slíkar fyriskipanir mugu lúka ásetingarnar hjá lokalu virðisbrævamarknaðunum og lógarkrøv annars, so ein ikki verður lagdur undir at hava villleitt marknaðin.

Í nøkrum stórum partabrævasølum hava tílík tiltøk virkað uttan stórvegis trupulleikar, og tey hava gjørt sítt til, at góður prísur er fingin fyri partabrøvini. Tó er eitt dømi um, at seljarin sat eftir við nøkrum partabrøvum, sum hann hevði ætlað at selt. Tí var úrtøkan í fyrsta umfari minni enn ætlað, men seinni varð avlopið selt fyri góðan prís.

Stabiliseringsmekanismur kunnu fevna um ymiskar loysnir. T.d. kann tann, ið vegna seljaran, stendur fyri søluni (kendur sum globali samskiparin), viðhvørt samskipað við samtak av fíggjarligum millumgongumonnum, sum globali samskiparin stendur á odda fyri, taka sær av at stuðla upp undir útgávuprísin í tíðini eftir søluna. Afturfyri fær bólkurin ein prosentpart av útbjóðingini. Annað dømi er, at globali samskiparin hevur rætt til, men ikki skyldu til, fyri útboðsprísin at keypa fleiri partabrøv frá seljaranum í upp til t.d. 30 dagar eftir dagin, partabrøvini vórðu latin.

# 9 Øki 8: Sølukostnaður

## 9.1 <u>Hvussu serfrøðingar verða valdir</u> (leiðregla 38)

#### *9.1.1 Evni:*

Hvørjar kostnað/nyttu faktorar skal ríkisgrannskoðanin hava í huga, tá ið hon metir um, hvussu seljarin valdi út ráðgevar til søluuppgávuna?

### *9.1.2 Hví evnið er umráðandi:*

Tá ið seljari skal fremja søluna í verki, er sannlíkt, at hann hevur tørv á uttanhýsis serfrøði. Tað er sannlíkt, at henda hjálp er dýr, bæði í ásettum tølum og í prosentum av søluupphæddini. Listin av ráðgevum kann vera langur, og tað er sannlíkt, at hann fevnir um fíggjarligar ráðgevar, løgfrøðiligar ráðgevar, bankaráðgevar, grannskoðarar, serfrøðingar innan marknaðarføring o.s.fr. Tí er tørvur á, at seljarar gera greitt, hvørji uttanhýsis serfrøði tørvur er á, og at hann greinar tað út í sáttmálanum við serfrøðingin. Fyri at fáa besta virðið fyri pengarnar og fyri at kunna vísa, at uttanhýsis hjálpin varð vald út á rættan hátt, er skilagott, at seljarin velur hvønn serfrøðing sær út, eftir at tænastan er boðin út.

### *9.1.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal meta um, hvussu nágreiniliga seljari kannaði, um ráðgeving frá uttanhýsis serfrøðingum var neyðug, og um seljari valdi út serfrøðingarnar í útboði, og hugsað var um prís og góðsku.***

***Í teimum førum, tá ið tænasturnar ikki vórðu bodnar út (eingin ella avmarkað kapping), skal ríkisgrannskoðanin kanna, um seljari hevði einastandandi góðar "virði fyri pengar" orsøkir til at velja serfrøðingar og ikki bjóða tænastuna út.***

### *9.1.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Tað er góður skikkur at velja út uttanhýsis ráðgevar, eftir at tænastan er boðin út. Effektiv kapping leggur trýst á uttanhýsis ráðgevar, so teir geva so lág boð, sum til ber. Tað hevur helst eisini við sær, at uttanhýsis ráðgevar royna at finna besta háttin at røkka søluendamálunum, og tað hjálpir seljara at skilja, hvønn tørv hann hevur, og tað lættir um hjá seljara at taka neyvar avgerðir um, hvør uttanhýsis ráðgevi verður valdur út. At kappast um at verða valdur er eisini ein hjálp hjá seljara, tá ið honum verður kastað fyri, at hann veitir framíhjárættindi, tá hann tilnevnir ráðgevar.

Dømi er um ein ráðgevasáttmála uppá 6 mió.$, sum við ongari kapping varð givin einum felag, har ein av seljarans egnu stjórum áður hevði verið í leiðsluni. Slepst ikki undan, at ráðgevi verður tilnevndur við ongari kapping, eigur seljari at kunna vísa á, hvussu hann royndi at sleppa undan vansunum, serliga í sambandi við sáttmálaprísin.

Seljari hevur vanliga stóra nyttu av at kanna teirra tørv rættiliga væl og tosa við nógvar ráðgevar undan tilnevningini. Størstu nyttuna av ráðgevum hevur seljarin ofta í einskiljingum, tá ið hollur førleiki innan fígging, løgfrøði og marknaðarføring hevur havt týðiliga positiva ávirkan á úrtøkuna, ella tá ið truplir tekniskir spurningar skulu verða loystir fyri selja fyritøkuna á marknaðinum.

Tá ið seljari skal meta um, hvussu góð ráðgevingin er, sum verður boðin fram, kannar hann vanliga yrkisleiðina hjá ráðgevunum, ikki minst hvønn kunnleika teir hava til tær viðkomandi sølutilgongdirnar, og hvørt tað hevur eydnast teimum at menna søluframferðarhættir, sum eru til gagns hjá seljara. Hetta er serliga týdningarmikið, tá ið leiðandi fíggjarligi ráðgevin verður valdur. Hava teir dugað væl at marknaðarført fyritøku fyri íleggjarum fyri góðan prís? Hava teir hildið tilstuðlan og annan kostnað sum t.d. provisiónir, prenting og lýsingarútreiðslur so lágt sum gjørligt?

## 9.2 <u>Um at leggja fíggjarætlan fyri serfrøðingahjálp og at hava eftirlit við henni</u> (leiðregla 39)

### *9.2.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin meta um, hvussu hegniga seljari legði fíggjarætlan fyri uttanhýsis ráðgevingahjálp, og hvussu væl hann hevði eftirlit við útreiðslunum?

### *9.2.2 Hví evnið er umráðandi:*

Sannlíkt er, at einskiljingar, serliga stórar partabrævaútgávur og torgreiddar sølur til strategiskar íleggjarar, hava tørv á samskipaðari ráðlegging og væl stýrdari verkætlanarleiðslu frá seljara og hansara uttanhýsis ráðgevum. Óvæntaðir trupulleikar kunnu stinga seg upp, og neyðugt kann tí vera at broyta ætlanir, og tað hevur við sær, at útreiðslurnar til serfrøðingahjálp hækka. Tá ið seljari hevur valt sær uttanhýsis serfrøðingar og avgjørt søluætlan, ræður um, at seljari við neyvari fíggjarstýring stýrir útreiðslunum, sum standast av at fremja søluætlanina í verki.

### *9.2.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal meta um, í hvønn mun:***

- ***seljarin legði hóskandi fíggjarætlanir fyri samstarvið við serfrøðingar. Um tær bygdu á neyva ætlan, har úrslitini vórðu borin saman við fíggjarætlanina, so hvørt tilgongdin nærkaðist málinum við søluni;***
- ***seljaranum eydnaðist at samráðast við serfrøðingarnar av nýggjum, um eitthvørt óvæntað stakst upp;***
- ***seljarin tryggjaði sær, at serlig viðurskifti, sum t.d. søluprovisiónir (um søluinntøkan var hægri enn eitt vist), sum goldnar vóru serfrøðingunum, vóru "virði fyri pengarnar".***

### *9.2.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Ráðgevaútreiðslur kunnu vera stórar, tí ræður um, at seljari við harðari hond stýrir og hevur eftirlit við teimum og tryggjar sær, at hann fær fult virði fyri pengarnar.

Fíggjarætlanir eiga at byggja á grundarlag, sum greidliga er knýtt at arbeiðsætlanum og avtalum, sum eru gjørdar við ráðgevar. Dømi er um, at seljari var orsøk til, at útreiðslurnar vóru nógv hægri enn í fíggjarætlanini, tí upplýsingarnar, sum hann hevði givið roknskaparkønum at skriva frágreiðing eftir, vóru ógvuliga ófullfíggjaðar, og tí máttu roknskaparfólkini gera nógv størri arbeiði, enn ætlanin var.

Ráðgevasamsýningar eiga at samsvara við sáttmálabundnu uppgávurnar og tær upphæddir, sum vórðu avtalaðar, tá ið ráðgevin varð tilnevndur. Gjøldini eiga at leggja upp fyri serligum útreiðslum, t.d. slíkum, sum hava at gera við frávik í sáttmálanum, og sum stava frá ymiskum óvæntaðum, ið stingur seg upp.

Seljarar raðfesta ikki altíð eftirlit við sáttmálakostnaði nóg høgt. Tað hendir serliga, tá ið ráðgevar verða løntir eftir tíma- ella dagsgjaldi, og einki loft er á samlaða gjaldinum. Tað veksur um vandan fyri, at óvæntaður meirkostnaður verður, og tað stendst ofta av, at fíggjarætlanir ikki verða lagdar og eftirmettar vandaliga. Ríkisgrannskoðanin skal kanna, um samsýningarnar til ráðgevan, tá ið samanum kom, vóru størri enn upprunaliga væntað. Tað reisir spurningin, um fíggjarætlanirnar vóru nóg væl gjørdar, og um umsjónin hjá seljaranum við ráðgevaútreiðslum var skynsom. Tá ið ráðgevin bað um meira enn væntaðu útreiðslurnar, eigur ríkisgrannskoðanin at kanna, hvørt seljarin royndi at avmarka eykagjøldini sum frægast, t.d. við at samráða seg til lægri gjøld ella við at leggja loft á gjøldini í longda sáttmálanum.

Viðhvørt eru ásetingar í sáttmálunum við t.d. leiðandi fíggjarliga ráðgevan um, at eykasamsýning verður latin, tá ið sølan er fullfíggjað, um einskiljingin er væleydnað. Serliga skal verða ansað eftir, um hesi eykagjøld eru grundað á upphædd, um úrtøkan av einskiljingini fer upp um eina fast ásetta virðismeting, serliga um fast ásetta virðismetingin var ásett av leiðandi fíggjarliga ráðgevanum sjálvum. Í slíkum førum skal ríkisgrannskoðanin kanna, um seljari læt virdan serfrøðing virðismeta føstu virðismetingina.

## 9.3 <u>Framferðarhættir, tá ið farið verður ígjøgnum samlaða kostnaðin</u> (leiðregla 40)

### *9.3.1 Evni:*

Hvussu skal ríkisgrannskoðanin gera upp og greiða frá útreiðslum seljarans í sambandi við einskiljingina?

### *9.3.2 Hví evnið er umráðandi:*

Útreiðslur, sum seljari hevur havt í sambandi við einskiljingina, kunnu gerast ein rættiliga stórur partur av søluupphæddini, og tí skal seljari, sum hevur ábyrgd av útreiðslunum, hava eftirlit við teimum. Um framferðarhættirnir, ið ríkisgrannskoðanin nýtir, tá ið hon metir um kostnaðin av eini einskiljing, ikki eru álítandi og sambæriligir, ber ikki til nóg neyvt at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av ymiskum gerðum. At ríkisgrannskoðanin útvegar sær týðandi og gjøgnumskygdar upplýsingar um einskiljingarkostnaðin hjá seljara, hevur týdning fyri:

- tíðarbær ábyrgingarendamál, tí so nógv eru áhugað í, hvussu ríkisgrannskoðanin metir um, hvussu seljarin avgreiddi søluna av tí, sum ofta eru serligar og búskaparliga týðandi ognir
- almenn framtíðarpolitisk endamál, t.d. hvørt einskiljingar í framtíðini kunnu væntast at geva ta ætlaðu fíggjarligu úrtøkuna, tá ið hugsað verður um einskiljingarútreiðslurnar
- hvussu einskiljingar í framtíðini skulu verða stýrdar, t.d. at eftirmeta støddina á sølukommissiónum av upprunaligu almennu útboðunum
- at veita vissu fyri, at útreiðslurnar av einskiljingini vóru rímiligar samanborið við úrtøkuna, og
- at lætta um eina eftirmeting av einskiljingarúrtøkuni í kvantifiseraðum og ikki-kvantifiseraðum fyrimunum

### *9.3.3 Leiðregla:*

***Ríkisgrannskoðanin skal royna at lýsa, greina og greiða frá teim útreiðslum, sum eru beinleiðis knýttar at sjálvari sølutilgongdini.***

### *9.3.4 Grundgevingar fyri leiðregluni:*

Vanliga verður roknað við, at ríkisgrannskoðanin skrivar eina frágreiðing um tær almennu útreiðslurnar, sum eru brúktar til at avgreiða einskiljingina, og at ríkisgrannskoðanin mælir til at bøta um umsitingarligu mannagongdirnar fyri at fáa mest møguliga úrtøku í einskiljingum í framtíðini. Tað er týdningarmikið, at ríkisgrannskoðanin nýtir ein hóskiligan arbeiðshátt til at gjøgnumganga útreiðslurnar. At frámerkja, hvørjar útreiðslur beinleiðis kunnu hoyra til einskiljingartilgongdina, er sjáldan einfalt. Tað krevst av ríkisgrannskoðanini, at hon ger kvalitativar metingar, tí trupult er at skilja veruligan einskiljingarkostnað frá øðrum kostnaði, sum er heftur uppí, t.d. fyri at umskipa fyritøkuna. Men ber ikki til neyvt at meta um, hvat tað kostar at avgreiða eina einskiljing, verður tað eisini trupult hjá ríkisgrannskoðanini at gera av, um endamálini við at einskilja vórðu rokkin.
Tá ið ríkisgrannskoðanin greinar, eigur hon at:

- kunna seg um sambandið millum ymisku útreiðslusløgini, sum koma fyri í sambandi við einskiljingina, herímillum eisini útreiðslur av at umskipa;

- at gera ásetingar fyri, um útreiðslur beinleiðis kunnu verða knýttar at einskiljingini, t.d. gjøld til ráðgevar seljarans, sum eru eykaágóðar fyri væleydnaða einskiljing;
- eftirmeta allar viðkomandi útreiðslur, sum eru knýttar at sølutilgongdini fyri at gera av, um útreiðslur, sum ikki kunnu verða knýttar til ávíst einstakt virksemi, kunnu verða knýttar upp í sølutilgongdina;
- rokna út og bera saman einskiljingarkostnaðin við úrtøkuna av at einskilja;
- at taka støðu til, hvørt útreiðslurnar samantaldar kunnu verða mettar at vera “virði fyri pengar”, samanborið við útreiðslurnar av øðrum loysnum, t.d. at gera einki ella at lata fyritøkuna aftur.

# 10 Orðalisti

| **Enskt heiti** | **Umrøtt í leiðreglu nr.:** | **Frágreiðing um týdning** |
|---|---|---|
| Aftermarket | 30 og 37 | Tíðarbilið eftir at sølan av einum ný útgivnum partabrævi er byrjað á partabrævamarknaðinum. |
| Allocation | 36 | Ein framferðarháttur, ið verður nýttur at tilluta partabrøv millum íleggjarar í.s.v. eina partabrævasølu. |
| Auction | 27-28 | Almenn uppboðssøla, har fyritøkurnar verða seldar tí, ið hevur hægsta boðið. |
| Benchmark Valuation | 9 | Ein virðismeting av fyritøku undan søluni, sum seljarin ella onkur vegna seljaran fremur. |
| Bookbuilding | 31 | Ábendingar frá íleggjarum um, hvussu nógv partabrøv teir, fyri ymiskar prísir, eru áhugaðir í at keypa. |
| Clawback | 23 | Ásetingar í sølutreytunum, tá ið seljarin í eitt avmarkað tíðarbil – um ávísar fortreytir eru til staðar – fær ein part av vinningi, sum keyparin fær eftir søluna, t.d. um keyparin selir fyri-tøkuna víðari. |
| Competitive Tension | 18 | Ein tilgongd, har tvey ella fleiri boð hava við sær, at seljarin fær hægri søluúrtøku, tí kapping er millum boð-ini. |
| Due Diligence | 4 | Ein tilgongd, tá ið bjóðarar royna at staðfesta, um tær upplýsingar og tær fyritreytir, ið vóru galdandi, tá teir bjóðaðu, framvegis eru neyvar og rættar, tá ið sølan verður framd. |
| Flotation | 29-37 | Søla til einstaklingar, fíggjarstovnar ella einskildar fyritøkur av parta-brøvum, sum síðani kunnu verða seld á marknaði. |
| Global co-ordinators | 37 | Fíggjarstovnar, sum samskipa markn-aðarføringina av einari partabræva-sølu, ið verður seld á altjóða mark-naðinum. |

| **Enskt heiti** | **Umrøtt í leiðreglu nr.:** | **Frágreiðing um týdning** |
|---|---|---|
| Indemnities | 12-13-20 | Sølutreytir, tá ið seljari, um ávísar hendingar ásettar í sølutreytunum koma fyri, játtar at rinda kostnað, sum keyparin hevur átikið sær. |
| Intermediaries | 25 | Umboðsmenn, bæði fyritøkur og einstaklingar, sum umboða áhugamálini hjá og handla fyri einstøku íleggjararnar í einskildu fyritøkunum. |
| Liabilities | 12 | Útreiðslur, sum eru íkomnar eftir søluna, og sum keyparin ella staturin taka á seg. |
| Management and Employee Buy-out | 21-23 | Søla av almennari fyritøku til leiðslu og/ella starvsfólk, sum í framtíðini koma at leiða fyritøkuna. |
| Market Stabilisation | 37 | Ein atgerð har stjórnin í ásetta tíð, beint eftir fyrstu partabrøvini eru seld ella aðru partabrævasølu, stuðlar sølupnísinum. |
| Mass Privatisation | 24-26 | Alment kann verða sagt, at hugtakið fevnir um eina vanliga einskiljing, tá ið stórur partur av almenninginum luttekur sum íleggjari. Tað hendir ofta sum partur av, at farið verður í skundi burtur frá planbúskapi til marknaðarbúskap.<br>Fyriskipanirnar eru ymiskar frá landi til annað, so her er eingin einstøk allýsing. |
| Preferred Bidder | 19 | Tann bjóðarin, sum seljarin velur út at vera tann, ið hann ætlar at selja fyritøkuna til, eftir at samráðingar eru farnar fram, og løgfrøðiligu avtalurnar eru komnar upp á pláss. |
| Premium | 30 | Tann upphæddin (omanfyri útgávuprís), sum nýliga útskrivað partabrøv verða seld fyri á partabrævamarknaðinum. |
| Residual Management | 12 | Handfaring av ábyrgdum og skyldum, sum liggja eftir hjá statinum, eftir at fyritøkan er seld. |

| **Enskt heiti** | **Umrøtt í leiðreglu nr.:** | **Frágreiðing um týdning** |
|---|---|---|
| Restructuring | 6 | Ein tilgongd, tá ið seljarin fyrireikar fyritøkuna at verða selda (t.d. við broyttum løgfrøðiligum skapi). |
| Retail Market | 34 | Søla av partabrøvum til einstakar íleggjarar í.s.v. partabrævasølur. (Hin "møguleikin" er stovnsligir íleggjarar). |
| Success Fees | 39 | Ómaksgjøld, sum verða goldin ráðgevum fyri tænastur teirra, um so er, at sølan verður framd. |
| Trade Sale | 13-20 | Beinleiðis søla av almennari fyritøku til aðra (einskilda) fyritøku. Hugtakið fevnir eisini um "joint ventures" og partssølur. |
| Tranche Sale | 30 | Søla av parti av fyritøku í.s.v. partabrævasølu. |
| Underwriters | 31 | Talan er um, at avtala frammanundan sølu verður gjørd við fíggjarstovnar um, at teir keypa tey partabrøv, sum ikki verða seld í.s.v. eina partabrævasølu. Afturfyri fáa teir eina samsýning. |
| Warranties | 12-13 | Ásetingar í søluavtaluni, har seljarin veitir keyparanum vissu fyri ávísum viðurskiftum viðvíkjandi fyritøkuni, sum verður seld. |